# FERÐAVINNA Í FØROYUM

## EIN ÁBYRGDAFULL OG BURÐARDYGG LEIÐ



UTTANRÍKIS- OG
VINNUMÁLARÁÐIÐ

Handað landstýrissmanninum í
uttanríkis- og vinnumálum, 5. mai 2017.

# Innihaldsyvirlit


KAP. 1. BAKSTØÐI OG ARBEIÐSSETNINGUR ........ 5

1.1 Arbeiðsbólkurin og arbeiðsgongd ........ 5

1.2 Avmarking ........ 6

1.3 Soleiðis er heildarætlanin skipað ........ 7

1.4 Niðurstøða og tilmæli ........ 7

1.4.1 Burðardygg ferðavinna ........ 7

1.4.2 Bygnaðurin í vinnuni ........ 8

1.4.3 Náttúra og gongd í haga ........ 8

1.4.4 Førleikar og mentanartilboð ........ 8

1.4.5 Inntøkumøguleikar frá ferðavinnuni ........ 9

1.4.6 Álítandi hagtøl og vitan um búskaparliga týdningin av ferðavinnuni ........ 9

1.5 Ferðavinnumenning í Føroyum ........ 9

1.6 Burðardygg ferðavinna ........ 12

1.7 Ferðavinnan í tølum ........ 13

Gisting ........ 14

1.8 Búskaparligi týdningurin av ferðavinnuni ........ 15

1.9 Hagtøl framyvir ........ 17

KAP. 2. BYGNAÐUR OG SAMSKIPAN ........ 18

2.1 Uppgávu- og ábyrgdarbýtið innan ferðavinnuna ........ 18

2.1.1. Uppgávan hjá landinum ........ 19

2.1.2.Uppgávan hjá kommunum ........ 20

2.2. Endurskoða stuðulsskipanir og bygnað í ferðavinnuni ........ 20

2.2.1. Kunningardiskurin í Vága Floghavn ........ 22

2.3. Umskipa VFI og skipa menningardeild ........ 23

2.2.1. Lógarbroyting er neyðug ........ 25

2.2.2 Nýggj stuðulsskipan og miðvís ferðavinnumenning kring landið ........ 25

KAP. 3. NÁTTÚRA ........ 32

3.1 Náttúran og ferðavinna ........ 32

3.2 Uppgávur innan náttúruvernd og ferðavinnu ........ 33

*3.2.1 Kanna og kortleggja náttúruna* ........ 34

*3.2.2 Viðkvom og áhugaverd náttúra eigur at eyðmerkjast og verjast* ........ 35

*3.2.3 Koyring í haga og sigling fram við landi* ... 35
*3.2.4 Ferðamannaskip* ... 36
3.3. Gongd í haga ... 37
3.3.1 Rætturin at ferðast í náttúruni ... 37
3.3.2 Er almannarætturin galdandi í Føroyum? ... 39
3.3.3 Gjald fyri at ganga í haganum ... 41
3.3.4 Bygda- og varðagøtur ... 43

KAP 4. MENTANARTILBOÐ OG FØRLEIKAR ... 45
4.1 Førleikamenning ... 45
4.1.1 Ferðaleiðaraútbúgving ... 45
4.1.2 Aðrar útbúgvingar innan tænastuyrkið ... 46
4.1.3 Gransking og hægri útbúgvingar ... 47
5.1.4 Myndugleikagóðkenning/løggilding ... 48
4.2 Mentanartilboð ... 48
4.2.1 Fornminnissavnið ... 48
4.2.2. Bygdasøvn ... 49
4.2.3 Onnur átøk ... 49

KAP. 5 INNTØKUMØGULEIKAR FRÁ FERÐAVINNUNI ... 51
5.1 Ferðaavgjaldið ... 53
5.3 Dagføringar innan Strandferðsluna ... 55
5.5 Matstovuvinnan ... 56
5.6 Inn- og útflutningur av mati og drekka ... 58
5.7 Tjalding og húsvognar ... 59
5.8 Airbnb ... 60

KAP. 6 MYKINES ... 62
Fylgiskjal 1 – Fundarrøð kring landið ... 68
Fylgiskjal 2 – Ferðavinnukanning frá Hagstovuni ... 72
Fylgiskjal 3 – Frágreiðing um økisferðavinnu og kunningarstovur ... 86
Fylgiskjal 4 – Notat frá UVMR um Cruise-vinnu ... 98
Fylgiskjal 5 – Yvirlit yvir tilmæli ... 101

*Høvuðsniðurstøður:*

- ***Ein menningardeild eigur at verða skipað í Visit Faroe Islands við serskildari játtan og samleika. Í samstarvi við kommunur, kunningarstovur og vinnu skal deildin samskipa og stuðla upp undir, at ferðavinnutilboð verða ment kring landið.***

- ***Náttúran er ov lítið vard og tað hevur alstóran týdning at gera neyðugt lógarverk og seta orku av til náttúruvernd- og fyrisiting.***

- ***Tað grundleggjandi fyri, at føroysk ferðavinna kann mennast, er, at yvirskipaðu karmarnir eru væl skipaðir og at vit arbeiða eftir meginreglunum um burðardygga ferðvinnu:***

    - ***Náttúra og umhvørvi: Ferðavinnan skal skipast soleiðis, at umhvørvið ikki verður dálkað og náttúran verður varðveitt***

    - ***Sosialt: Ferðavinnan ger seg ikki inn á bygdalív og sosialar skipanir***

    - ***Búskapur: Ferðavinnan heldur á at kasta av sær og geva lokala umhvørvinum búskaparligan ágóða***

- ***Fyritreytin fyri at náa málinum um eina burðardygga ferðavinnu er, at allir partar av vinnuni, almennir myndugleikar, stovnar og kommunur kenna týdningin av hugtakinum "burðardygd" og at øll arbeiða fram í móti hesum sama máli.***

- ***Neyðugt er fáa greiðar reglur og mannagongdir fyri gongd í haga, herundir um spurningin at taka gjøld.***

- ***Landið - gjøgnum menningardeildina í Visit Faroe Islands - hevur yvirskipaða ábyrgd av at samskipa og stuðla undir menning av ferðavinnuni kring landið.***

- ***Kommunurnar hava høvuðsábyrgd av at menna og skipa ferðavinnuna í teirra øki, herundir kunningarstovuvirksemi.***

- ***Mentanartilboð - fornminni, søvn o.a. - og kunning til ferðafólk skulu fáa hægri raðfesting.***

- ***Dygdargóðar útbúgvingar, skeið og gransking eru grundleggjandi fyritreytir fyri, at førleikarnir styrkjast og fleiri vitanartung størv verða skapt í vinnuni.***

- ***Átøk eiga at verða gjørd fyri at styrkja inntøkumøguleikarnar hjá vinnu, kommunum og landinum.***

- ***Tað er umráðandi, at ein tvørgangandi stýrisbólkur við landsstýrisfólkum úr viðkomandi aðalráðum verður settur í eitt 5-ára skeið at samskipa og útinna átøkini, ið skulu til fyri at fáa eina burðardygga ferðavinnu.***

# Kapittul 1. Bakstøði og arbeiðssetningur

Við støði í orðingunum um ferðavinnu í samgonguskjalinum, setti landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum í januar 2016 ein arbeiðsbólk at orða eina virkisætlan fyri ferðavinnuna, sum skal vera grundarlag undir einari tilgongd at menna ferðavinnuna í Føroyum.

Arbeiðssetningurin var at:

“Orða eina virkisætlan fyri innlendis menning av ferðavinnuni og at lýsa fylgjandi tættir:

* Eyðmerkja avbjóðingar, avmarkingar ella forðingar innan føroyska ferðavinnu í dag

* Orða ítøkilig tilmæli til átøk ella broytingar, sum kunnu slóða fyri menning innan innanoyggja ferðavinnu

* Út frá hesum gera eina heildarætlan við ítøkiligum átøkum at seta í verk”

Ein so breiður arbeiðssetningur gevur arbeiðsbólkinum rættiliga fríar ræsur til at tulka, hvussu uppgávan verður loyst og, sum komið verður inn á niðanfyri, hevur arbeiðsbólkurin valt at leggja áherðslu á útvald, men grundleggjandi viðurskifti, sum eiga at vera upp á pláss í eini vælvirkandi ferðavinnu. Av tí at føroyska ferðavinnan er á einum byrjanarstøði, er tað natúrligt, at mong viðurskifti enn ikki eru í lagi. Ein týðandi partur av uppgávuni er tí at lýsa hesar grundleggjandi avbjóðingar og koma við okkara boði uppá, hvussu tær kunnu handfarast.

Samstundis mugu vit ásanna, at hetta samstundis er ein einastandandi møguleiki at byggja upp og menna eina ferðavinnu frá grundini og soleiðis sum vit ynskja hana í Føroyum; ein møguleiki frá byrjan at skipa teir karmar, sum ferðavinnan skal virka undir, áðrenn menningin hevur yvirhálað okkum.

Vit ásanna og viðurkenna, at tað er ein drúgv og áhaldandi tilgongd at menna ferðavinnuna. Fremsta endamálið við hesi ferðavinnuætlan er at byrja hesa stigvísu tilgongd, sum vónandi kann hava við sær, at vit sum frá líður koma so nær eini burðardyggari ferðavinnu sum til ber.

## 1.1 Arbeiðsbólkurin og arbeiðsgongd

Tey, sum hava mannað arbeiðsbólkin, eru:

Jóhan Pauli Helgason og Gunvør Balle frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum (skrivaratoymið)

Hanna á Reynatúgvu fyri Kunningarstovurnar

Eyðun Christiansen fyri Kommunufelagið

Maria Gunnleivsdóttir Hansen fyri Umhvørvisstovuna

Henny á Líknargøtu fyri Ferðavinnufelagið

Av tí at tað er sera avmarkað við kanningum um ferðavinnuna í Føroyum, valdu vit at skipa arbeiðið soleiðis, at meginparturin av fyrireikandi arbeiðinum byggir á samrøður og fundir við fólk, sum á ymsan hátt varða av ferðavinnuni. Skrivaratoymið hevur ferðast kring landið og havt eina langa røð av fundum (uml. 60 og yvir 100 fólk) við viðkomandi fólk frá kommunum, kunningarstovum, náttúruverndarfelagsskapum, ferðavinnusmiðjum og mong onnur. Í fylgiskjali 1 er eitt yvirlit yvir allar teir partar, bólkurin hevur samskift við í tilgongdini.

Vit vildu grunda frágreiðingina á tað, sum fólk kring landið eyðmerkja sum avbjóðingar og loysnir, soleiðis at tilmælini í so stóran mun sum til ber taka støði í serføroyskum viðurskiftum og tí menningarstigi, sum vit eru á í dag. Sostatt er frágreiðingin bygd á ein empiriskan framferðarhátt og er í minni mun bygd á teori og praksis úr øðrum londum, tó at vit hava fingið íblástur og vitan aðrastaðni frá, m.a. í sambandi við kanningarferð í Íslandi.

Kortini hava vit eisini tikið støði í ymsum viðkomandi frágreiðingum og kanningum, m.a. frá gamla Ferðaráðnum og Visit Faroe Islands, frá serritgerðum frá lesandi innan ferðavinnu, Ramsar-ætlanum, ferðavinnuætlanum úr øðrum londum v.m.

Arbeiðsbólkurin hevur havt regluligar fundir, sum oftast skipaðir í ymisk evni og viðhvørt við vitjan og framløgum uttanífrá. Tað hevur verið ein avbjóðing at lýsa, hvussu torgreidd ferðavinnan er, og at avmarka og skera uppgávuna soleiðis til, at tað ber til at vísa á sambond og viðurskifti, sum ávirka hvørt annað, fyri síðani at koma fram til so ítøkilig tilmæli sum til ber.

## 1.2 Avmarking

Eitt og hvørt val hevur við sær eitt ella fleiri frával og soleiðis er sjálvsagt eisini í hesum førum. Ferðavinna er ein vinnugrein, sum bæði er torgreidd og stór í vavi. Stórt sæð allir samfelagsliðir, aðalráð, ymsir myndugleikar, vinna og hin einstaki borgarin, eru á onkran hátt knýtt at ella ávirkað av ferðavinnuni. Tann sannroynd, at ferðavinnan í Føroyum bæði er óstøðug og á einum lutfalsliga lágum menningarstigi, ger, at ein savnað viðgerð av øllum tættum innan vinnuna fevnir (sera) vítt.

Frá byrjan var tískil neyðugt at avmarka og skilmarka uppgávuna hjá arbeiðsbólkinum meiri neyvt, so til ber at koma á mál. Skjótt varð eisini ásannað, at tað verður ein drúgv tilgongd at menna og skipa ferðavinnuna. Neyðugt er við regluligari viðgerð, eftirmeting og dagføring í tráð við menningina í vinnuni. Heildarætlanin fyri ferðavinnuna í Føroyum skal tískil síggjast sum eitt fyrsta stig at skapa neyðugu karmarnar fyri eini betur virkandi ferðavinnu.

Arbeiðsbólkurin hevur í sínum arbeiði valt at leggja áherðslu á tey viðurskifti innan ferðavinnuna, sum verða mett grundleggjandi fyri framhaldandi menning. Tað snýr seg fyrst og fremst um bygnaðin í vinnuni, natturuvernd og -fyrisiting, tí á hesum øki vanta flestu heimildir og umsitingarlig orka. Harumframt snýr tað seg um yvirskipaðar karmar, sum vinnan hevur at virka undir, ábyrgdarbýtið millum land og kommunur og stuðulsskipanirnar á økinum. Frágreiðingin savnar seg um tey viðurskifti, sum landið varðar beinleiðis av og hevur ávirkan á, ímeðan onnur, eins týðandi viðurskifti, sum ávikavist kommunur og vinnan eiga ábyrgdina av, ikki verða viðgjørd eins neyvt.

Heildarætlanin skal, sum nevnt, síggjast sum fyrsti grundarsteinurin undir eini vælvirkandi og burðardyggari ferðavinnu í Føroyum. Eftirsum bólkurin ikki hevur havt møguleika at eftirkanna og granska ymsu loysnirnar út í æsir, mugu fleiri av teimum tilmælunum, sum arbeiðsbólkurin er komin fram til, kannast neyvari og møguliga tillagast, áðrenn tey verða sett í verk.

Hesi seinastu árini eru føroyingar vorðnir alt meira áhugaðir í at ferðast í egnum landi. Tær avbjóðingar og avleiðingar, ið standast av øktari ferðavinnu, stava sostatt eins nógv frá føroyskum frítíðarvirksemi sum frá útlendskum ferðafólki. Í hesum áliti fevnir "ferðafólk" sostatt bæði um føroysk og útlendsk ferðafólk.

## 1.3 Soleiðis er heildarætlanin skipað

Heildarætlanin er bygd upp á tann hátt, at kapittul 2 viðger bygnaðin í ferðavinnuni, uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur og stuðulsskipanir. Eisini verður her víst á, hvussu ein framtíðar menningardeild kann skipast, hvørjar uppgávurnar kunnu vera, umframt tørvin á at skipa ein tvørgangandi stýrisbólk, ið hevur ábyrgd av at fáa tilmælini í heildarætlanini framd í verki.

Í kapitli 3 lýsa vit tørvin á lógarverki og reglum innan náttúruvernd og hvørjum ein framtíðar náttúruverndarumsiting eigur at hava ábyrgd av.

Kapittul 4 vísir á týdningin av, at góðir førleikar eru til taks í vinnuni, at neyðugar útbúgvingar verða settar á stovn, umframt at mentanartilboð, so sum søvn o.a., eru á einum høgum stigi.

Í kapitli 5 hyggja vit eftir, hvussu vit skapa virðisøking og inntøkur til tað almenna og privata av ferðavinnuni og at enda lýsir kapittul 6, hvørji átøk kundu verðið sett í verk í Mykinesi til tess at menna eina meiri burðardygga ferðavinnu, og hvussu Mykines kundi verðið brúkt sum ein royndarætlan, har ferðavinnan varð skipað eftir burðardyggum leisti.

## 1.4 Niðurstøða og tilmæli

Tað grundleggjandi fyri, at føroysk ferðavinna kann mennast, er, at yvirskipaðu karmarnir eru væl skipaðir. Tað merkir í stuttum, at vit eiga at arbeiða eftir burðardyggum meginreglum, at hava greitt ábyrgdarbýti millum ymsu almennu og privatu leikararnar og at tað er neyðugt, at skipa eina menningardeild í Visit Faroe Islands (hereftir VFI), ið kann samskipa og menna ferðavinnuna kring landið. Tað hevur harumframt stóran týdning at hava neyðugt lógarverk og orku til náttúruvernd og at bjóða fram dygdargóðar útbúgvingar og skeið soleiðis, at førleikarnir í vinnuni styrkjast og fleiri vitanartung størv verða skapt í vinnuni. Tað er umráðandi, at ein tvørgangandi stýrisbólkur verður settur at samskipa og útinna átøkini í heildarætlanini.

Í fylgjandi brotum greiða vit stutt frá høvuðsniðurstøðunum í álitinum. Í fylgiskjali 5 er eitt samlað yvirlit yvir øll tilmæli í heildarætlanini.

### *1.4.1 Burðardygg ferðavinna*

Avbjóðing: Ein skjótur vøkstur innan allar vinnugreinar hevur aloftast avbjóðingar við sær, eftirsum kringumstøðurnar hava torført at tillaga seg nýggja veruleikan og eru vøksturin og menningin í ferðavinnuni ikki burðardygg, er vinnan ikki haldbar, hvørki í dag ella sum frá líður.

Tilmæli: Tryggjast skal, at øll ráðgeving, almennur verkætlanarstuðul og at skipanir og karmar annars stuðla upp undir burðardygga vinnu, herundir serliga at ferðavinnan mennist kring alt landið og alt árið, at pengar fella lokalt og at ferðavinnan ikki ger skaða á bygdarlív og náttúru. Burðardygd er partur av feraðvinnuútbúgvingini og gransking. Skipast skal fyri kunningarátøkum um burðardygga ferðavinnu, m.a. fyri vinnuni og kommunum.

### *1.4.2 Bygnaðurin í vinnuni*

Avbjóðing: Ógreiður bygnaður, óskipaðar stuðulsskipanir og vantandi fokus á menning, seinkar ferðavinnumenningini kring landið. Ferðavinnan er annaðhvørt beinleiðis ella óbeinleiðis ábyrgd hjá nógvum aðalráðum, kommunum og almennum stovnum og krevur, at orka verður sett av til samstarv og samskipan.

Tilmæli: Eitt hitt fremsta tilmæli hjá arbeiðsbólkinum er, at vit skipa ferðavinnuna betur. Vit mugu hava ein bygnað, sum er í samsvari við tær avbjóðingar, vit standa við í dag og sum kann vera grundarlag og drívmegi fyri ferðavinnumenning. Tað merkir fyrst og fremst, at ein menningardeild verður skipað hjá VFI, sum hevur ábyrgd av at samskipa og seta í verk menningarátøk ferðavinnuni at frama. Mælt verður til at seta 5 mió. av á fíggjarlógini til menning av ferðavinnuni.

Mælt verður somuleiðis til, at økisstuðulin og kr/kr stuðulin (áleið 2 mió. kr. íalt) verður umskipaður og lagdur afturat játtanini til menning, soleiðis at deildin hevur eina samlaða játtan á 7 mió. kr. Stuðul og ráðgeving skal savnast og samskipast og brúkast til munagóða ferðavinnumenning kring landið. Harumframt verður mælt til, at ein tvørgangandi samskipanarbólkur skal setast í eitt 5-ára skeið við landsstýrisfólkum frá viðkomandi aðalráðum at fremja tilmælini í heildarætlanini í verki.

### *1.4.3 Náttúra og gongd í haga*

Avbjóðing: At verja náttúruna frá árini av eini vaksandi mongd av ferðafólki, sum ynskja at vera í og fáa upplivingar í náttúruni. Tað er stórur tørvur á greiðum lógarheimildum og fyrisitingarligari orku at verja náttúruna og skipa ferðavinnuna í mun til burðardygga nýtslu av náttúruni.

Tilmæli: Neyðugt er at seta í verk eina náttúruverndarlóg saman við eini munadyggari náttúrufyrisiting, sum hevur uppgávuna at handhevja lóggávuna. Tað er neyðugt við reglum og mannagongdum fyri gongd í haga, árinsmetingum í sambandi við ferðavinnuvirksemi í náttúruni, nýtslu av akførum í náttúruni, reglur fyri ferðamannaskipum o.a. Somuleiðis er neyðugt at seta skipanir í verk, sum krevja góðkenning (autorisatión) til ávíst og serliga váðafult ferðavinnuvirksemi o.m.a.

Nøktandi játtan verður sett av til eina náttúrufyrisiting, so í minsta lagi tvey fólk kunnu setast í starv at umsita náttúruverndarlógina, sum skal koma í gildi í 2018. Kommunurnar mugu raðfesta náttúruvernd í síni umsiting.

### *1.4.4 Førleikar og mentanartilboð*

Avbjóðing: Fornminnir, søvn og onnur mentanartilboð skulu raðfestast. Fornminnissavnið og bygdasøvn eru ov ósjónlig, nógv fornminni eru ikki kannað ella hildin viðlíka og okkum tørvar betri upplýsing til ferðafólk (m.a. skelti, faldarar o.a.). Innan útbúgvingarverkið eiga vit eisini at raðfesta vitan og menning um ferðavinnuna, soleiðis at vit hendavegin kunnu kveikja fólki at starvast innan økið.

Tilmæli: Neyðugt við dygdargóðum útbúgvingum og skeiðum til ferðaleiðarar, náttúruvegleiðarar og til aðrar bólkar í tænastuvinnuni. Tørvur er á, at lands- og bygdasøvn samskipa sítt virksemi og virka fyri hægri dygd á søvnunum kring landið. Somuleiðis er neyðugt at seta størri orku av til kunning, skeltir o.a.

### *1.4.5 Inntøkumøguleikar frá ferðavinnuni*

Avbjóðing: Tað eru fleiri átøk, ið kunnu verða framd til tess at skapa betri lønsemi í ferðavinnuni, kanska serliga innan matstovuvinnuna. Ein online ferðaseðlaskipan hjá SSL hevði økt um inntøkugrundarlagið hjá ferðasmiðjum, skipað ferðsluna betri og bøtt um møguleikarnar fyri vinnuligari menning í útjaðaranum. Somuleiðis eru fleiri hættir hjá landinum at skapa fleiri beinleiðis inntøkur frá ferðavinnuni, sum kundi verið brúkt til at fíggja m.a. náttúruverndarumsiting og menningarátøk/íløgur innan ferðavinnuna.

Tilmæli: Mælt verður til at seta í verk lagaligari mvg-reglur fyri matstovur umframt at innkeyps- monopolið hjá Rúsuni verður tikið av. Fyri at geva ferðafólki betri tænastu og bíleggingar og ferðslan skal kunna ganga smidligari, er neyðugt, at SSL setir eina online bókingarskipan í verk fyri farleiðirnar hjá SSL kring landið.

### *1.4.6 Álítandi hagtøl og vitan um búskaparliga týdningin av ferðavinnuni*

Avbjóðing: Manglandi hagtøl og vitan avmarka okkara vitan um ferðavinnuna og harvið er tað ein stór avbjóðing at leggja til rættis og rættstundis at seta inn við hóskandi átøkum. Til dømis vita vit framvegis ikki, hvussu nógv ferðafólk koma til landið og hvaðani tey koma. Okkum tørvar eisini betri vitan um búskaparliga týdningin av vinnuni fyri landið.

Tilmæli: Arbeiðið at savna inn hagtøl skal mennast og útbyggjast, soleiðis at vit m.a. fáa betri vitan um búskaparliga týdningin av ferðavinnuni og ikki minst, at vit vita neyvt, hvussu nógv ferðafólk koma til landið. Tað er neyðugt at gera regluligar kanningar, ið greina búskaparliga týdningin av ferðavinnuni í samlaða búskapinum.

## 1.5 Ferðavinnumenning í Føroyum

Ferðavinnan er millum skjótast vaksandi vinnugreinar í heiminum og hevur seinastu árini havt ein støðugan vøkstur á sløk 5 prosent um árið og hesin vøkstur verður mettur at halda áfram í mong ár afturat. Føroyar hava áður als ikki átt part í hesum vøkstri. Síðani avgerð varð tikin í 2013 um meiri miðvíst at satsa upp á marknaðarføring uttanlands, hevur tað eydnast VFI, við støði í eini nýggjari strategi, nýggjum bygnaði og tvífalt so stórari játtan, at skapa vøkstur í ferðavinnuni (sí hagtøl undir pkt. 1.6).

Metingin er og hevur verið, at tað er ein fortreyt fyri ferðavinnumenning, at talið av ferðafólki fyrst veksur. Áhugin at gera íløgur innan ferðavinnuna, seta á stovn nýggj tilboð og at skipa vinnuna betur kemur ikki, fyrr enn ferðafólkatalið veksur. Visjónin hjá VFI, sum varð grundarlag undir broyttu kósini, varð kjølfest bæði í tí politisku skipanini og í vinnuni:

*"Visiónin er, at ferðavinnan skal gerast ein týðandi vinna fyri landsbúskapin og skal mennast á ein burðardyggan hátt, við fyriliti fyri føroyska fólkinum, umhvørvinum og búskapinum."*

Sostatt er málið tvíbýtt: 1) Ferðavinnan skal vera ein týðandi vinnugrein í Føroyum og 2) Vinnan skal vera burðardygg. Hetta eru mál, sum flest øll kunnu taka undir við, men hvat merkir tað í roynd og veru, at vinnan skal vera burðardygg? Og hvat merkir burðardygd fyri vøksturin innan ferðavinnuna?

At menna ferðavinnuna á burðardyggum grundarlagi tekur tíð, m.a tí at fólkið á staðnum skal vera partur av tilgongdini. Hava vit ikki meginreglurnar um burðardygd fyri eyga, er tað skjótt at menningin gongur

ov skjótt og tá kann hon hava neiligar avleiðingar. Sostatt liggur ein innbygd andsøgn millum orðingarnar í visiónini um bæði vøkstur og burðardygd, sum er sera týðandi at vera tilvitaður um í tí menningartilgongd, føroysk ferðavinna í løtuni er í.

Arbeiðsbólkurin tekur undir við visjónini, sum higartil hevur verið grundarlag undir virkseminum hjá VFI. Málini fyri vøkstri innan vinnuna eru greið og ber til at máta hesa framgongd, men tað er altavgerandi fyri ferðavinnuna, at hon, í so stóran mun sum til ber, er burðardygg. Er hon ikki tað, er hon ikki haldbar, hvørki í dag ella sum frá líður. Niðanfyri verður komið nærri inn á meginreglurnar um burðardygd, sum eiga at vera teymarnir, ið stýra allari ferðavinnumenning í Føroyum.

Tá ið tað almenna skal orða eina ætlan fyri, hvussu ferðavinnan skal mennast, snýr tað seg fyrst um at skilmarka, hvussu Føroyar framhaldandi skulu stýra vøkstrinum og menningini av ferðavinnuni, soleiðis at ferðavinnan sjálv ikki tekur yvir. Greiðir og týðiligir karmar og reglur eru tískil ein fortreyt fyri at skapa eina burðardygga ferðavinnu, ið kemur øllum landinum til góðar. Fyrst og fremst fyri føroyingar sjálvar, sum búgva her alt árið, men eisini fyri komandi ættarliðini, soleiðis at eitt "undiscovered og unspoiled" samfelag kann gleða ferðafólk eins væl og føroyingar, sum sóknast eftir teimum serligu autentisku upplivingunum, vit kunnu bjóða.

Henda grundhugsjón eigur at vera reyði tráðurin í arbeiðinum at orða eina heildarætlan fyri innanlands menning. Tá henda grundleggjandi fortreyt er til staðar, kunnu vit orða onnur mál, sum t.d. at ferðavinnan skal gerast ein týðandi súla undir føroyska búskapinum og at hon skal vera við til at skapa størri vinnuligt og mentanarligt fjølbroytni, fleiri størv og hægri inntøkur.

Bera vit okkum rætt at, kann ein vælskipað ferðavinna hava við sær fleiri positiv árin. Við økta eftirspurninginum eftir tilboðum, t.d. mentanarligum og handilsligum, fjálgar ferðavinnan eisini um trivnaðin í Føroyum. Vit fara vónandi at gerast meir tilvitað um okkara egnu náttúru, mentan og virðir og vit fáa meiri fjøltáttaðar starvsmøguleikar, eisini til væl útbúnar føroyingar. Og soleiðis kann ferðavinnan virka fyri, at fólk fara at støðast betur í Føroyum.

Hyggja vit fyrst at ástøðiliga partinum um ferðavinnumenning, vísir ástøðin hjá Butler væl ta vanligu gongdina innan ferðavinnumenning, sum er staðfest kring heimin. Í stuttum snýr ástøðin (sí mynd 1.1) seg um, at øll økir, sum fáast við ferðavinnu, fara ígjøgnum nøkur ávís stig.

**Mynd 1.1 Ástøðiliga ferðavinnuringrásin hjá Butler**[1]




Í stuttum kann sigast, at øll ferðavinnumenning byrjar við, at eitt land ella øki so at siga verður "uppdagað" sum ferðavinnuland (pkt.1). Her er ferðavinnan sera avmarkað; fá ferðafólk koma til økið og neyðugt infrakervi og hentleikar eru enn ikki til staðar, og ferðavinnan fyllir sum heild lítið í samfelagnum. Ferðavinnan í Føroyum hevur higartil verið á hesum fyrsta stigi og kann á ein hátt framvegis sigast at vera her. Tað er kanska sigandi í hesum sambandi, at tað verður brúkt beinleiðis í marknaðarføringini, at vit eru "undiscovered".

Sum frálíður veksur ferðavinnan, og aktørar byrja at síggja møguleikar í vinnuni, og arbeitt verður við infrakervi, atkomu, marknaðarføring o.s.fr. Gistingarhús, matstovur, ferðatilboð og annað verða ment so líðandi (pkt. 2). Í mun til ástøðina hjá Butler kunnu Føroyar sum heild sigast at vera onkustaðni millum pkt. 1 og 2 sum ferðavinnuland, tó at ávís øki í Føroyum eru komin longur á strikumyndini og hava avbjóðingar. Hagtølini siga frá, at vit hava ein lutfalsliga stóran vøkstur, ferðavinnan er av álvara komin á breddan hjá almenninginum eins og vit síggja, at fleiri íløgur verða gjørdar og eru ávegis innan vinnuna.

Eydnast tað at skipa ferðavinnuna á nøktandi hátt, t.e. at skapa neyðuga infrakervið, neyðugu tilboðini og byggja upp eina burðardygga ferðavinnu, sum fólk taka undir við, ber til at siga, at ferðavinnan er væl eydnað (pkt. 3). Á hesum stigi stendur ferðavinnan í blóma og í framhaldandi vøkstri. Við tíðini vísa royndir frá øðrum londum, at her gera ymsar avbjóðingar seg galdandi orsakað av vøkstrinum í ferðafólkatalinum. (pkt. 4). Tá kann ferðavinnan vera vorðin ov "dominerandi" og slit er farið at síggjast á náttúruna.

1 *http://www.ibtcl.co.uk/web_documents/toursim_area_life_cycle_original.pdf*

Økið er ikki longur dragandi sum ferðamál. Herfrá kann gongdin fara tvinnar vegir: annaðhvørt síggja vit eina afturgongd, ella megna vit at endurnýggja okkum og halda fast í einum støði, sum svarar til okkara burðarorku[2] sum ferðafólkaland.

So hvørt ferðavinnan veksur og ferðafólkastreymurin økist, gerst tað alsamt meiri sjónligt, hvussu viðbrekin vit í veruleikanum eru. Tað er tí rætta løtan nú at fara undir arbeiðið at menna ferðavinnuna í Føroyum og taka støðu til, hvussu hon verður skipað, bæði soleiðis, at hon kastar sum mest av sær búskaparliga, men eisini við atliti at og virðing fyri náttúru, mentan og samleika, soleiðis at vit veruliga kunnu tosa um eina "success". Tað er neyðugt at gera vart við beinanvegin, at henda tilgongd krevur miðvíst arbeiði og nøktandi játtan.

Sum nevnt er neyðugt, at vit regluliga eftirmeta og endurskoða tær ætlanir, ið verða settar í verk og hendan heildarætlanin skal síggjast sum fyrsti varðin á eini leið, sum vónandi kann leiða okkum ímóti eini burðardyggari og væl skipaðari ferðavinnu í Føroyum, sum vit eru errin av.

At skipa ferðavinnuna, meðan vit enn eru á byrjanarstøði, er sjálvsagt ein fyrimunur, eftirsum fortreytirnar eru góðar fyri at skipa okkum og seta inn rættstundis við neyðugum átøkum, áðrenn tað er ov seint. Hetta krevur tó miðvíst arbeiði, pening og samstarv og samskipan millum nógvar ymiskar partar, skal tað eydnast. Tey ferðamál, sum ikki brúka orku í byrjanini, fáa eitt stuttskygt fíggjarligt avkast, og kunnu fáa stóran tørv á skipaðari ráðgeving og ógvusligari inntrivum seinni. Hetta førir við sær, at uppgávan tá bæði er dýrari og tyngri at lofta, og í mun til náttúrutilfeingi kann tað vera ov seint. Ikki allir nátturuskaðar kunnu bøtast. Vilja vit hava eina burðardygga ferðavinnu, er tað nú vit skulu seta krøv og tryggja røttu umstøðurnar fyri vinnuna og okkum øll.

## 1.6 Burðardygg ferðavinna

Fyri at fáa eina so vælvirkandi og kappingarføra ferðavinnu sum gjørligt, er, sum nevnt, neyðugt at vit í so stóran mun sum til ber grunda okkara arbeiði á meginreglurnar um burðardygd. Heildar-ætlanin skal síggjast sum ein røð av ítøkiligum tilmælum og átøkum, sum skulu vera við til at skapa burðardygga menning í føroysku ferðavinuni.

Burðardygg ferðavinna verður vanliga býtt upp í 3 høvuðsøkir[3]:

**Umhvørvislig burðardygd:** Ferðavinnan skaðar ikki náttúru og umhvørvi (plantur, djór, vatn, lendi, orkunýtslu, útlát o.s.fr.) – men varðveitir landslagið, lívfrøðiligt margfeldi og mentanarligt ríkidømi. Skapar positivar ágóðar til umhvørvið, við gransking, varðveitslu og verndarátøkum.

**Sosial og mentanarlig burðardygd:** Ferðavinnan ger seg ikki inn á bygdalív og sosialar skipanir, men kann heldur styrkja føroyska samleikan og skapa nýtt mentanarlív v.m. í lokala umhvørvinum.

**Búskaparlig burðardygd:** Kappingarført ferðamál við lokalari virðisøking. Ferðavinnan byrjar ikki bara brádliga og steðgar so aftur, orsakað av vánaligum vinnuligum hugburði. Ferðavinnan heldur á at kasta av sær og geva lokala umhvørvinum búskaparligan ágóða. Burðardygg ferðavinna skal skapa virðir fyri eigaran, starvsfólk og grannar.

---

2 *Burðarorka (bæreevne) er hægsta talið av fólki ella hægsta nýtslustig, sum eitt umhvørvi (ferðamál) kann bera uttan óbøtandi árin.*

3 *http://www.innovasjonnorge.no/no/reiseliv/Baerekraftig-reiseliv/Prinsipper-for-et-barekraftig-reiseliv/*




Hesi trý høvðusøki kunnu ikki skiljast sundur, og verður eitt øki niðurraðfest, ávirkar tað eitt annað, sum kann føra við sær, at ferðavinnan ikki verður burðardygg í longdini. Tískil kann burðardygg ferðavinna lýsast sum:

*"Ferðavinna sum verður ment og viðlíkahildin soleiðis, at hon er lívfør fíggjarliga, uttan at umhvørvið fær skaða, og at komandi ættarlið hava í minsta lagi somu fortreytir umhvørvisliga, sosialt og fíggjarliga, sum vit hava í dag."*

Tey ítøkiligu átøkini innan burðardygga ferðavinnu fevna millum annað um: Gransking, upplýsing, regulering, at taka borgaran við upp á ráð, longda sesong og onnur átøk, sum verða lýst nærri í tilmælunum.[4]

Ein týðandi uppgáva hjá komandi stýrisbólki og menningardeild er at tryggja, at kunningararbeiðið verður sett í verk, har allir aktørar í ferðavinnuni verða kunnaðir um, hvat burðardygg ferðavinna í praksis merkir, t.d. á eini stórari ráðstevnu um burðardygga ferðavinnu.

Menningarætlanir fyri ferðavinnuna, ið verða gjørdar í kommunum og hjá landinum, eiga at byggja á meginreglurnar um burðardygd.

## 1.7 Ferðavinnan í tølum

Tað hevur leingi verið ein trupulleiki, at vit ikki hava havt nøktandi hagtøl fyri ferðavinnuna í Føroyum. Í januar 2013 gjørdi VFI avtalu við Hagstovu Føroya um at framleiða óheft hagtøl um ferðavinnuna. Síðani eru hagtølini útbygd til eisini at fevna um fleiri lyklatøl, sum greiðari enn áður vísa týdningin av ferðavinnuni fyri tjóðarbúskapin.

Niðanfyri verða nøkur av teimum mest viðkomandi hagtølunum løgd fram, soleiðis at vit fáa eina mynd av teirri gongd, sum ferðavinnan er og hevur verið í seinastu árini. Hetta gevur eina greiða ábending um, hvat vit kunnu vænta av ferðavinnuni komandi árini.

Yvirskipað ber til at siga, at hvørt ár, síðani byrjað varð at savna inn hagtøl, hevur verið eitt nýtt metár. Hetta ger seg galdandi innan gisting, umsetning, ársverk, BTÚ og útflutningsvirði. Einasta undantakið í 2016 var cruise-vinnan, sum hetta árið var fyri stórum bakkasti, orsakað av sonevndu grindalógini og teirri umrøðu, hon skapti í altjóða miðlum. Tó bendir alt á, at talið av ferðafólkaskipum í 2017 aftur nærkast tí støði, tað var á í 2015.

*4 Í "Uppkast til føroyska ætlan um burðardygga menning 2002-2020", sum Heilsufrøðiliga starvsstovan gav út í 2002, er kapittul um ferðavinnu, og har eru yvirskipað mál sett fyri eina burðardygga ferðavinnu.*

Einans gistingarhagtølini eru tøk fyri 2016, so tey flestu hagtølini byggja á tøl frá 2015.

Víst verður til nýggjastu hagtalskanningina hjá Hagstovuni í fylgiskjali 2.

### *Gisting*

Í 2015 vóru 158 tús. gistingar í Føroyum, samanborið við 139 tús. í 2014; ein vøkstur á 13%. Í 2016 var ein lítil hækking til 160 tús. gistingar. Flestu gistingarnar eru á gistingarhúsunum (86 %) og 64 % av gistingunum eru í Suðurstreymoy.

**Talva 1: Gistingar í Føroyum í alt**

| 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|
| 132.236 | 139.250 | 158.011 | 159.759 |

Gistingartølini eru tey hagtøl, sum oftast verða brúkt sum ábending um, hvussu stór ferðavinnan er í einum landi. Tað eru tó ávísar avbjóðingar við at brúka hetta tal, serliga síðani netborin útleigan, sum t.d. Airbnb, av álvara er byrjað at vinda upp á seg. Eftirsum amerikanska fyritøkan ikki útvegar hagtøl, ber ikki til í løtuni at fáa eitt samlað yvirlit yvir, hvussu umfevnandi hesin gistingarháttur er í Føroyum. (sí meiri um hetta í kap 5.8). Mangt bendir á, at økingin í gistingum via Airbnb er ein av høvuðsorsøkunum til, at vøksturin í gistingartølunum ikki er vaksin stórvegis frá 2015-2016. Ein varlig meting er, at talið av gistingum innan Airbnb liggur oman fyri 10 túsund gistingar um árið.

Harafturat telja ferðamannaskipini ikki við í gistitølunum, tí skulu tølini takast við hesum fyrivarni.

Hyggja vit so at gistitalinum ella "belegninginum", er støðan ein onnur. Sum myndin niðan fyri vísir, er gistitalið lítið hækkað hesi seinastu árini og framvegis ber myndin brá av, at tað er í summarhálvuni, at hotellini eru upptikin, meðan fleiri gistingarhús framvegis eru nærum tóm um veturin. Verður gistitalið tó samanborið við "kapasitetin", so er myndin ein onnur. Í 2013 vóru 319.809 sengur á gistingarhúsum í Føroyum. Í 2016 var hetta talið komið upp á 361.009 sengur, tað vil siga ein vøkstur á 13 % í kapasitetinum, meðan "belegningsprosentið" bara er hækkað við 4 % sama tíðarskeið.

**Mynd 1: Gistital (belegningur) á gistingarhúsum í %**




Tað eru serliga ferðafólk úr nærmarknaðunum, sum koma til Føroya. Danmark er framvegis størsti marknaðurin við 46 % av teimum útlendsku gistingunum. Næstu londini eru Noreg, Týskland, Ísland og Bretland.

## 1.8 Búskaparligi týdningurin av ferðavinnuni

Umsetningurin frá innkomandi ferðavinnuni hevur staðið í vøkstri síðan 2011, og hesin vøkstur heldur áfram. Sum tølini í talvuni niðan fyri vísa, er umsetningurin frá útlendskum ferðafólki vaksin støðugt síðani 2011 við uml. 9 % um árið og sær hesin vøkstur út til at halda áfram. Innkomandi ferðavinnan svarar í dag til knapt 10 % av samlaða útflutningsvirðinum.

**Talva 2: Umsetningur frá útlendskum ferðafólki 2011 - 15**

| Ár | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| Umsetningur frá útl. ferðafólki | **416** | **492** | **541** | **576** | **665** |
| Ums. frá útl. ferðafólki í % av samlaða útfl. | 7,7 | **8,9** | **8,9** | **9,0** | **9,7** |

Søluinntøkan fyri 2015 er bólkað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| "Millumlandaflutningsfeløg, cruisevinnan og ferðaskrivstovur": | **399** | **mió.** | **krónur.** |
| "Gistingar og annað hotellvirksemi": | **90** | **mió.** | **krónur.** |
| "Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur": | **73** | **mió.** | **krónur.** |
| "Flutningur innanlands og leiga av bili": | **45** | **mió.** | **krónur.** |
| "Upplivingar og aðrir aktivitetir": | **40** | **mió.** | **krónur.** |
| "Klæðir og fótbúnaður": | **11** | **mió.** | **krónur.** |
| "Onnur søla": | **8** | **mió.** | **krónur.** |

Viðmerkjast kann, at framgongd er á øllum virkisgreinum og hevur verið tað síðan 2011.

Sum sundirgreiningin oman fyri vísir, stava uml. 60 % av umsetninginum frá flutningsfeløgum, ferðaskipum og ferðaskrivstovum. Inntøkur frá meirvirðisgjaldið (sí talva 3) er hækkað úr 19 mió. kr. í 2011 til umleið 30 mió kr. í 2015 og virðisøkingin er vaksin úr 165 mió. kr. í 2011 til 235 mió. kr í 2015, ein vøkstur á 29,8 %.

**Talva 3: Virðisøking og meirvirðisgjald frá ferðavinnuni í mió. kr.**

| Ár | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| Virðisøking | 165 | 192 | 215 | 225 | 235 |
| Meirvirðisgjald | 19 | 22 | 25 | 27 | 30 |

Árini 2014-2015 eru framskrivað.

Um vit so sammeta virðisøkingina við vøksturin í talinum av ársverkum, ber til at siga nakað um produktivitetsvøksturin ella framleidnið í vinnuni.

**Talva 4: Framleidni í ferðavinnuni frá 2011-15**

| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| Virðisøking pr. Ársverk | 428 t. kr. | **484 t.** kr. | **521 t.** kr. | **545 t.** kr. | **499 t.** kr. |

Hesi tølini siga okkum, at vit hava havt ein hampuliga stóran produktivitetsvøkstur í vinnuni árini 2011 til 2014, sum síðani er fallin nakað í 2015, væntandi orsakað av sólarmyrkingini. Hóast tølini eru óviss, gevur hetta okkum eina ábending um, at vit hava við eina vinnu at gera, sum í fleiri ár á rað hevur megnað at økt um framleidnið. Tað merkir, at ferðavinnan er vorðin meiri rationell og professionell, eftirsum at hvørt ársverk klárar at skapa eitt alsamt størri virði ár undan ári.

Sum talva 5 vísir, er talið av ársverkum, ið starvast í ferðavinnuni, eisini vaksandi. Beint oman fyri 470 ársverk stava frá innkomandi ferðavinnu í 2015, sum eru 85 ársverk fleiri enn í 2011. Verða størv, sum óbeinleiðis eru avleidd av ferðavinnuni, tald við, er talið áleið 900 ársverk. Her er talan um millumlandaflutningsfeløg, cruisevinnu, ferðaskrivstovur, gisting, annað hotellvirksemi, matstovur, skeinkistøð, persónsflutning innanlands, leigu av bili umframt upplivingar og annað virksemi.

**Talva 5: Roknað ársverk í innkomandi ferðavinnuni fyri tíðarskeiðið 2011-2015**

| Ár | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| Ársverk | 386 | 396 | 412 | 413 | 471 |

Gongdin vísir sostatt ein greiðan vøkstur og alt bendir á, at hesin vøkstur heldur áfram. Langtíðarmálið hjá VFI er, at umsetningurin frá føroysku ferðavinnuni skal vera 1 milliard krónur í 2020 og sambært hagtølunum eru vit komin væl áleiðis at røkka tí málinum.

Hóast hesa framgongd, ber illa til at siga nakað eintýðugt um, hvussu stóran búskaparligan týdning vinnan í roynd og veru hevur fyri land og kommunur. Hvussu nógvar skattainntøkur skapar vinnan til dømis? Hvat er inntøkubýtið millum land og kommunur? Hetta eru spurningar sum mugu kannast nærri, áðrenn teir kunnu svarast og tí er neyðugt at gera regluligar kanningar av búskaparliga týdninginum av ferðavinnuni (sí tilmæli í kap. 5).

## 1.9 Hagtøl framyvir

Hóast vit í dag hava munandi meiri eftirfarandi ferðavinnuhagtøl, avmarka manglandi tøl framvegis okkara vitan um ferðavinnuna soleiðis, at vit betur kunnu leggja til rættis framyvir. Til dømis vita vit framvegis ikki, hvussu nógv ferðafólk koma til landið og hvaðani tey koma. Og okkum manglar eisini vitan um, hvussu stór útbreiðslan av Airbnb er her á landi (sí kap. 5.8).

Tað er avgerandi fyri framhaldandi menning innan ferðavinnuna, at vit hava neyva vitan um tey ferðandi, sum koma. Í fyrstu syftu er neyðugt at vita, hvussu mong ferðafólk koma til Føroya. Hetta er avgerandi fyri at kunna fylgja við vøkstrinum innan ferðavinnuna, sum í dag bara verður gjørdur upp í mun til umsetning og gisting og serliga tølini um umsetning eru rættiliga óviss.

Eftirsum tað bara eru tvinni "portur" inn til Føroyar, er tað ein lutfalsliga løtt uppgáva at skráseta tey ferðafólk, sum koma til landið. Smyril Line hevur í dag neyv hagtøl, sum vísa tal av útlendskum ferðandi og hvaðani tey koma og so er bara eftir at fáa skipan í verk sum inniber, at tað eisini verður gjørligt at fáa hesi hagtøl frá flogferðsluni.

Mælt verður til, at Vága Floghavn fær ábyrgdina av at seta í verk skipan á flogvøllinum, sum tryggjar, at øll ferðafólk verða skrásett, tá tey ferðast um flogvøllin. Hetta kann t.d. gerast sum ein innbygdur partur av check-in skipanini, har hin einstaki upplýsir tjóðskap í sambandi við fráferð.

Ábyrgd: Samferðslumálaráðið saman við Vága Floghavn.

*Tíðarætlan:* Arbeiðið at fyrireika nýggju skipanina eigur at verða sett í verk beinanvegin, soleiðis at nýggja skipanin er virkisfør í 2018.

*Kostnaður:* Mælt verður til, at Vága Floghavn, ið er landsfyritøka, fíggjar kostnaðin av hagtalsinnsavningini.

# Kapittul 2. Bygnaður og samskipan

## 2.1 Uppgávu- og ábyrgdarbýtið innan ferðavinnuna

Tað er ein grundleggjandi fortreyt fyri menning innan ferðavinnuna í Føroyum, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið og harvið eisini bygnaðurin er greiður. Er hendan fortreyt ikki til staðar, ber illa til at samskipa ferðavinnuna, at skapa neyðugu samstørvini og at seta í verk tiltøk, sum hava neyðuga úrslitið. Higartil hevur tað verið ein trupulleiki, at tað netupp ikki hevur verið greitt, hvør hevur ábyrgd av hvørjum, eins og tað gerst alsamt meiri greitt, at tað er neyðugt veruliga at raðfesta menning innan ferðavinnuna eftir fleiri ár, har høvuðsdenturin hevur verið lagdur á marknaðarføring uttanlands.

Eitt hitt fremsta tilmæli hjá arbeiðsbólkinum er tí, at vit skipa ferðavinnuna betri. Vit mugu hava ein bygnað, sum er í samsvari við tær avbjóðingar, vit standa við í dag og sum kann vera grundarlag og drívmegi fyri burðardyggari ferðavinnumenning.

Í dag sær verandi bygnaður soleiðis út:




Í stuttum ber til at lýsa verandi skipan í ferðavinnuni soleiðis:

- VFI er alment partafelag ið liggur undir UVMR. Landsstýrismaðurin velur antin beinleiðis ella óbeinleiðis allar nevndarlimir.

- Høvuðsuppgávan hjá VFI er at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál. Játtanin er uml. 13 mió., sum fer til kjarnuvirksemi (løn og marknaðarføring). Harumframt umsitur VFI uml. 2,5 mió. kr. til serligar stuðulsskipanir.

- VFI umsitur økisstuðul til 6 økisfeløg kring landið. Stuðulin er íalt uml. 1,5 mió. og hvørt økisfelag fær 240.000 kr.

- 6 økisfeløg kring landið lata 240.000 kr. til 6 kunningarstovur. Í Suðuroy fer økisstuðulin ikki til kunningarstovurnar, men lýst verður eftir umsóknum til ferðavinnuátøk.

- 8 alment fíggjaðar kunningarstovur (umframt aðrar kunningarstovur í Vestmanna, Nólsoy og Hvalba) eru kring landið.

Í fylgiskjali 3 er ein neyv frágreiðing um verandi bygnað, eins og ein lýsing av tørvinum fyri nýskipan.

### *2.1.1. Uppgávan hjá landinum*

Arbeiðsbólkurin metir, at uppgávan hjá landinum er at skapa neyðugu karmarnar fyri eini vælvirkandi vinnu, samstundis sum neyðug atlit verða tikin til, at vøksturin innan vinnuna er burðardyggur, t.e. í samsvari við skynsama náttúruverju, við virðing fyri mentan og siðaarvi og skynsomum búskapi. Uppgávan hjá landinum, t.e. aðalráðunum og undirliggjandi myndugleikum, er við øðrum orðum yvirskipað. Politikkur og meginreglur skulu orðast og lóggáva skal setast í verk (t.d. fyri gongd í haga, náttúruvernd, ferðslu á sjónum, ferðafólkaskipum, kamping o.s.fr.), og neyðug umsitingarlig orka skal setast av, so tað verður tryggjað, at karmarnir kring vinnuna eru so skynsamir sum til ber. Landið kann áseta, hvørjar stuðulsskipanir skulu vera galdandi og hvussu hesar skulu skipast og fíggjast, og landið kann áleggja gjøld, avmarkingar og bøtur og krevja góðkenningar, til tess at stýra ferðavinnuvirkseminum.

Tað er hinvegin ikki uppgávan hjá landinum at skipa ferðavinnuna lokalt, sum vit higartil hava sæð við skipanini kring økisferðavinnufeløg og kunningarstovum. Men landið hevur tó ábyrgd av at samstarva við økir og kunningarstovur og at tryggja, at ferðavinnuátøk/tilboð í so stóran mun sum til ber verða samskipað, soleiðis at ymsu átøkini og menningarætlanirnar í mest møguligan mun stuðla hvørjari aðrari. Somuleiðis kann man siga, at landið yvirskipað hevur ein áhuga í, at ferðavinnan verður so væl skipað kring landið sum til ber, soleiðis at vinnan kann virka á burðardyggum grundarlagi og vera eitt íkast fyri alt samfelagið, eisini í framtíðini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur yvirskipaða ábyrgd av ferðavinnuni og lógarverkinum, sum er knýtt at vinnuni, herundir eisini møguligum átøkum innan trygd á sjónum, inn- og útflutningi av matvørum v.m. Landið er einasti eigari av P/F Visit Faroe Islands, ið kann síggjast sum forlongdi armur landsins, tá tað snýr seg um at útinna ferðavinnupolitikkin. Av tí at ferðavinnan er ein sera samansett og fjøltáttað vinnugrein, liggja eisini stórir partar av ábyrgdini at tryggja karmarnar kring eina vælvirkandi ferðavinnu í øðrum aðalráðum. Týðandi ábyrgdarøki sum t.d. býarskipan/byggisamtyktir, náttúru- og umhvørvisvernd umframt ein møgulig lendisplanlegging liggja undir málsræði Heilsu- og Innlendismálaráðsins, meðan skipan av gongd í haga og nýtsla av lendi eins og tilbúgving og bjarging liggur hjá Fiskimálaráðnum[5]. Mentanartilboð og søvn og at tryggja, at vinnan hevur rættar førleikar og útbúgvingar, liggja hjá Mentamálaráðnum. Fíggjarmálaráðið hevur ábyrgd av avgjøldum o.ø., ið eru týðandi fortreytir fyri at skapa inntøkur frá ferðavinnuni og Samferðslumálaráðið hevur ábyrgd av at skipa eitt infrakervi, ið tekur hædd fyri vaksandi tali av ferðafólki.

Tá ábyrgdin er so spjødd, eru samskipan og toghaldan altavgerandi. Hesa uppgávu eigur Uttanríkis- og vinnumálaráðið og ráðið hevur evstu ábyrgd av at tryggja, at framgongd er í arbeiðinum at skipa ferðavinnuna, umframt tryggja, at ein vælvirkandi samskipan fer fram við hini aðalráðini.

5 *Bjarging á landi liggur tó hjá løgregluni/Justitsministeriet*

Tað er eitt høvuðstilmæli, at ein stýrisbólkur verður settur í eitt fimm-ára tíðarskeið, undir leiðslu av Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, at samskipa víðari arbeiðið við ferðavinnumenning. Bólkurin skal vera mannaður við landsstýrisfólkum frá teimum fimm aðalráðunum, ið hava ábyrgd av ymsum økjum innan ferðavinnuna.[1] Bólkurin hevur uppgávuna – saman við VFI - at syrgja fyri, at tilmælini í hesum áliti verða útint, umframt at regluliga eftirmeta, hvussu tey virka og rætta inn so hvørt tørvur er á tillagingum.

Fyri at geva hesum arbeiði neyðuga raðfesting, verður mælt til, at landsstýrisfólkini umboða aðalráðini í samskipanarbólkinum og at bólkurin verður settur í seinnu helvt av 2017 og er virkin fram til 2022.

*Ábyrgd:* Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tíðarætlan: Bólkurin verður skipaður í 2017 og fer til verka primo 2018

### *2.1.2.Uppgávan hjá kommunum*

Kommunurnar eru lokali myndugleikin, sum ger av, hvat skal raðfestast í kommununi. Tað eru kommunustýrini, ið raðfesta millum barnagarðar, røktarheim, nýggjar vegir, havnaútbygging, skúlabygging ella um íløgur eiga at gerast í menning av ferðavinnuni í økinum. Vælvirkandi ferðavinna sprettir altíð úr lokalumhvørvinum. Ein fortreyt fyri eini vælvirkandi ferðavinnu er sostatt, at lokalu myndugleikarnir skapa neyðugu karmarnar og fortreytirnar fyri ferðavinnumenninginini, soleiðis at tað verður lagaligari hjá borgarum á staðnum og lokalari vinnu at taka stig til nýggj átøk og tilboð innan ferðavinnuna. Landsmyndugleikar kunnu ongantíð gera av, hvussu vinnuliga virksemið í t.d. Suðuroy skal skipast. Landið setir karmarnar og lóggávuna og kann hava ráðgeving og stuðulsskipanirnar, sum gera tað lagaligt at skipa nýggj tilboð. Men tað eru kommunurnar, saman við kunningarstovum, lokala vinnulívinum og eldsálum í økinum, sum mugu fáa til vega neyðuga infrakervið og gera tað praktiska arbeiðið, sum skal til, fyri at ferðavinnan skal virka, sjálvsagt við vegleiðing og ráðgeving frá m.a. deildini fyri innanlands menning á VFI (sí niðanfyri).

Eins og við øllum øðrum raðfestingum, eru tað soleiðis eisini kommunurnar, sum mugu gera av, um tær vilja raðfesta eina kunningarstovu í kommununi, um tær vilja taka seg saman í kommunal samstørv innan ferðavinnuna og hvussu ferðavinnan í heila tikið skal skipast og fíggjast lokalt.

Tað er týðandi at staðfesta, at kommunurnar eru stigtakarar og hava ábyrgd av egnum øki, tá ið tað kemur til ferðavinnumenning. Stuðulsskipanir og stovnar, sum landið varðar av, kunnu stuðla kommununum í at menna ferðavinnuna, meðan kommunan er drívmegin.

## 2.2. Endurskoða stuðulsskipanir og bygnað í ferðavinnuni

Arbeiðsbólkurin metir, at avmarkaða játtanin, sum í dag verður latin sum stuðul til ferðavinnuna (t.e. játtanin til økisferðavinnu og kr. fyri kr. stuðulin), ikki verður nýtt nóg skilagott. Galdandi skipan inniber, at játtanin á uml. 1,5 mió. kr. til økisferðavinnustuðul, verður sundurliðað í 6 eins stórar partar, soleiðis at hvørt øki, óheft av stødd, virksemi ella førleika, fær 240 tús. kr. at ráða yvir. Peningurin, sum verður fluttur

teimum 6 økisferðavinnufeløgunum, verður síðani í flestu førum fluttur kunningarstovunum í avvarðandi øki, sum brúka peningin sum part av vanliga rakstrinum (t.e. til løn v.m.).

Hóast stuðulsupphæddirnar eru lutfalsliga lágar, kunnu tær hava avgerandi týdning fyri, hvussu bygnaðurin innan ferðavinnuna sær út. Tað er t.d. orsakað av stuðli frá landinum, at økisferðavinnu-feløgini av fyrstan tíð vórðu sett á stovn. So leingi sum stuðulin verður veittur hesum feløgum, er sannlíkt, at tey verða varðveitt, hóast bygnaðurin ikki hóskar til ferðavinnuna í dag.

Trupulleikin við hesi stuðulsskipan er, at avmarkaði stuðulin ikki fær nakra veruliga effekt, soleiðis sum hann verður nýttur í dag og tað er sum heild ilt at fáa eyga á mennandi elementið í galdandi skipan. Somuleiðis er tað ein trupulleiki, at stuðulsskipanin ikki umfatar øll økir í landinum.

Tað eru sostatt fleiri grundgevingar fyri, at tað er neyðugt at endurskoða økisferðavinnustuðulin; ein endurskoðan av stuðulsskipanini er ein fortreyt fyri einum greiðari ábyrgdarbýti og harvið eini betri skipaðari ferðavinnu. Víst verður til frágreiðing í fylgiskjali 3, har galdandi skipan verður lýst meiri nágreiniliga og grundgivið verður nærri fyri, hví tørvur er á at endurskoða galdandi skipan.

Tað eru eisini avbjóðingar við, hvussu kunningarstovurnar kring landið eru skipaðar. Vit hava í dag eina skipan, har ongin í veruleikanum kennir ognarskap ella ábyrgd av at eiga og skipa virksemið á kunningarstovunum á skilabestan hátt. Hetta hevur ført til eina sundurliðaða skipan, har samskipan og samskifti ikki altíð riggar so væl, og har allir partar í hvør sínum lagi eru ónøgdir við galdandi skipan, uttan at nakar kennir evstu ábyrgd av at skipa virksemið skilabetri.

Tað er óheppið fyri virksemið hjá kunningarstovunum og fyri ferðavinnuna sum heild, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið er so ógreitt. Hetta hevur m.a. við sær, at tað í nógvum førum er eitt áhaldandi stríð hjá kunningarstovunum at fáa nøktandi fígging til virksemi frá kommunum, landinum, økisferðavinnufelagnum og við privatari sølu. Fleiri kunningarstovur eru av tí sama noyddar at finna fígging við at virka sum eitt slag av ferðaskrivstovum, sum selir túrar, summarhús, tiltøk v.m. Hetta hevur við sær, at vinnan í ávísum førum kemur at fata kunningarstovuna sum kappingarneyta heldur enn samstarvsfelaga.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at kunningarstovurnar røkja eina sera týðandi uppgávu í ferðavinnuni. Kunningarstovurnar veita ferðafólki viðkomandi kunning og vegleiðing í ymsu økjunum eins og tær eru týðandi samstarvsfelagi, um t.d. nýggj ferðavinnutilboð skulu setast á stovn. Kunningarstovurnar hava vitan um tørvin hjá ferðafólki og um lokalu viðurskiftini og eru soleiðis eisini ein náttúrligur samstarvsfelagi, tá tiltøk skulu setast í verk frá landsins síðu ella tá tað snýr seg um at samskipa ferðavinnuvirksemi kring landið. Tí er ongin ivi um, at kunningarstovurnar hava týdning og at tær eiga at verða varðveittar. Trupulleikin er bara, at tær fáa ikki virkað nóg væl í verandi skipan, har tað er so ógreitt, hvør hevur evstu ábyrgdina.

Tí metir arbeiðsbólkurin, at kommunurnar sjálvar skulu avgera, hvørt tær vilja varðveita galdandi økisferðavinnusamstørv eftir sama bygnaði ella um samstørvini skulu endurskoðast, soleiðis at tey í størri mun enn í dag verða drívmegi og samskipandi liður innan ferðavinnuna í økinum. Tað er ymiskt frá øki til øki, hvør tørvurin er og hvussu stóra orku økini hava at arbeiða við. Til dømis kann hugsast, at smærri kommunur í størri mun savna virksemi, sum stuðlar hvørjum øðrum, soleiðis at t.d. kunningarstova, íverksetararáðgeving, ráðgeving til matvøruframleiðarar og annað líknandi virksemi er á einum stað.

### *2.2.1. Kunningardiskurin í Vága Floghavn*

Serlig viðurskifti gera seg galdandi hjá Kunningarstovuni og sonevnda Kunningardiskinum á flogvøllinum. Raksturin á Vága Kunningarstovu (Visit Vágar – VV) er nevniliga býttur í tvinnar partar – Kunningarstovan og Kunningardiskurin.

Kunningarstovan verður, eins og allar hinar kunningarstovurnar, lutvíst fíggjað við stuðli frá landinum (240 tús. kr. um árið), saman við stuðli frá kommunum og vinnuni í økinum.

Kunningardiskurin á flogvøllinum, sum tekur sær av kunning til tey ferðandi á flogvøllinum, tax-free umsiting, bilaútleigan, ferðaseðlasølu til tyrlu o.s.fr., fær eisini stuðul frá landinum (84 tús. kr. um árið sum eyka játtan á økisferðavinnukontuni). Afturat hesum fær kunningardiskurin provisjón og inntøkur frá m.a. bilútleigan, Atlantic og SSL. Vága Floghavn hevur stuðlað við at loyva Kunningarstovuni at halda til á flogvøllinum uttan kostnað.

Eins og við rakstrinum á fleiri kunningarstovum, er tað ein avbjóðing at finna nøktandi játtan til raksturin av kunningardiskinum. Ivaleyst er ógreiða ábyrgdarbýtið ein partur av frágreiðingini. Landið stuðlar í dag kunningardiskinum beinleiðis við játtan á fíggjarlógini umframt at landið kann sigast at stuðla óbeinleiðis, bæði via Vága Floghavn, Atlantic Airways og SSL. Tí metir arbeiðsbólkurin tað vera natúrligt, at Vága Floghavn rindar fyri raksturin av kunningardiskinum, eftirsum virksemið á kunningardiskinum er beinleiðis tengt at virkseminum á flogvøllinum og kann sigast at vera nátúrligur partur av flogvallarvirkseminum, heldur enn ein vanlig ferðafólkaskrivstova.

Ein slík umskipan hevði eisini stuðlað upp undir yvirskipaða endamálið at fáa greiðari karmar kring ferðavinnuna og eitt greiðari ábyrgdarbýti millum partarnar, sum virka innan ferðavinnuna. Harvið eru fortreytirnar fyri menning á meiri handilsligum grundarlagi fyri kunningardiskin og tænastuna á flogvøllinum eisini betri.

Arbeiðsbólkurin metir ikki, at galdandi skipan við stuðli til økisferðavinnufeløg og kunningarstovur er skynsom.

Mælt verður til, at galdandi stuðulsskipanir til økisferðavinnufeløg og kr./kr. stuðulsskipanin til marknaðarføring uttanlands verða settar úr gildi.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at kommunurnar stremba eftir at byggja upp vælvirkandi ferðavinnusamstørv ferðavinnuni at frama. Kommunurnar eiga sjálvar at avgera, hvussu tær vilja skipa ferðavinnuna í økinum og hvørja raðfesting ferðavinnan skal hava.

Mælt verður til, at økisstuðulin verður umskipaður við virknaði frá 1. januar 2018, soleiðis at økisferðavinnufeløg, kunningarstovur og kommunur hava stundir at tillaga raksturin til nýggju støðuna umframt at taka støðu til, hvussu ferðavinnan skal skipast í økinum eftir 1. januar 2018.

Í tíðarskeiðinum áðrenn 1. januar 2018 verður reglugerð fyri nýggja stuðulsskipan tilevnað, sum flytir játtanina til VFI (sí niðanfyri). Reglugerðin skal gera greitt, hvussu stuðulin skal umsitast, hvat ábyrgdarbýtið verður og hvussu tryggjað verður, at peningurin verður nýttur eftir ætlan og hevur ætlaða virknaðin.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at Vága Floghavn rindar fyri raksturin av kunningardiskinum á flogvøllinum.

*Ábyrgd:* Uttanríkis- og vinnumálaráðið saman við Samferðslumálaráðnum (í mun til kunningardiskin á Vága Floghavn)

*Tíðarætlan:* 1. januar 2018

## 2.3. Umskipa VFI og skipa menningardeild

Tað er altavgerandi fyri ferðavinnuna, at neyðug orka og tilfeingi verður sett av at fremja menningina í verki. Tí er tað átrokandi, at ein menningardeild verður skipað á VFI, sum, saman við áðurnevnda stýrisbólki, fær ábyrgd av at seta stóran part av tilmælunum í hesi ætlan í verk. Ásannandi, at heildarætlanin ikki røkkur niður í smálutir í mongum av teimum økjum, vit nerta við, og ásannandi, at ferðavinnumenning er ein fjøltáttað uppgáva, ið strekkir seg langt fram í tíðina, og sum við jøvnum millumbilum skal dagførast og tillagast, verður neyðugt, at slík menningardeild í minsta lagi hevur tvey starvsfólk, sum burturav arbeiða við menning.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt spurningin gjølla, hvar og hvussu tað er skilabest at skipa slíka deild og tað er greitt, at tað eru fyrimunir og vansar knýttir at einari og hvørjari loysn. Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum er, at skilabesta loysnin fyri Føroyar er at savna og samskipa ferðavinnu-virksemið, soleiðis at marknaðarføring og menning ganga hond í hond, at vitan og førleikar verða savnað á einum staði og at tað verður tryggjað, at ferðavinnan verður skipað skynsamt og í tráð við yvirskipaða politikkin á økinum. Tí er arbeiðsbólkurin samdur um, at innlendis menningardeild verður sett á stovn undir Visit Faroe Islands.

Í flestu londum verður ferðavinnan skipað í tvinnum stovnum; ein Visit-stovn, ið marknaðarførir landið úteftir (sonevndu DMO's[6]), og ein innanlands menningarstovn. Tað kundi eisini verið ein loysn fyri Føroyar. Arbeiðsbólkurin metir tó, at at tað í einum lítlum landi sum Føroyum illa ber til at rættvísgera at skipa ein nýggjan stovn til at taka sær av innanlands virksemi; ein nýggjan stovn, har nýggju fólkini høvdu sitið meiri einsamøll við uppgávuni, uttan stórvegis fakligt umhvørvi og netverk og har tað hevði verið neyðugt við enn einum stjóra, bókhaldi o.s.fr. Stutt sagt ein tyngri, dýrari og minni effektiv fyrisiting, sum skuldi byrjað úr mest sum ongum. Tvørturímóti metir arbeiðsbólkurin, at skilabesta loysnin er at byggja víðari upp á tað sum er og sum riggar og at tað í Føroyum eigur at vera lutfalsliga lætt og upplagt at samskipa menning og marknaðarføring.

Orsøkirnar eru fleiri: VFI er ein vælvirkandi stovnur (alment partafelag), sum hevur virðing og stuðul bæði frá politisku skipanini og frá almenninginum. Á VFI finst eitt fakligt umhvørvi innan ferðavinnu og tað er eitt sterkt "brand", sum hevur neyðugu styrkina, ið krevst fyri at treingja ígjøgnum við sínum boðskapum - bæði uttanlands og heima. Marknaðarføring og menning hanga óloysiliga saman og tí metir arbeiðsbólkurin, at tað hevur við sær stórar fyrimunir, at sama leiðsla hevur ábyrgd av bæði at menna og marknaðarføra vøruna, tað vil siga ferðavinnuna. Framleiðsla og søla eiga at ganga hond í hond, soleiðis at tað ikki verður ein andsøgn millum tað, ið verður marknaðarført og móttøkuskipanina innanlands. Hetta er eisini í tráð við missiónina hjá VFI, sum er at savna, samskipa og selja Føroyar sum ferðafólkaland.[7]

Eftirsum høvuðsfokus hjá VFI higartil hevur verið marknaðarføring uttanlands, endurspeglar organisatiónin í dag teir førleikar, sum krevjast til hesa uppgávu. Við eini nýggjari menningardeild verður endamál felagsins tvíbýtt og tí verður neyðugt at seta nýggj fólk við øðrvísi førleikum.

Men tað er umráðandi at gera greitt, at tann orka og tann játtan, sum í løtuni fer til at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál, verður varðveitt. Sjálvt um ein vøkstur er farin at síggjast í ferðavinnuni, so hava vit sum land enn ikki rokkið sokallaðu "kritisku fjøldini" av ferðafólkum. Enn eru sera fáar fyritøkur, ið kunnu liva av hesi vinnu og tí má marknaðarføringsarbeiðið hjá VFI halda fram á sama hátt, soleiðis at framgongdin, ið vit nú síggja, ikki fer fyri bakka. Tí metir arbeiðsbólkurin, at tað er avgerandi, at marknaðarføring og menning hava hvør sína atskildu játtan á fíggjarlógini. Neyðugt er eisini, at nýggja menningardeildin verður skipað undir egnum navni og samleika og ein deildarleiðari verður settur at taka sær av dagliga rakstrinum, men undir yvirskipaðari leiðslu av nenvd og stjórn hjá VFI.

Oman fyri nevndi stýrisbólkur við landsstýrisfólkum verður ein týðandi stuðul og hjálp hjá nýggju menningardeildini at fremja neyðugu menningarátøkini eins og kommunur, kunningarstovur og vinnan eru týðandi samstarvspartar.

Annað høvuðstilmæli er, at fyrireikingarnar at seta á stovn menningardeild á VFI verða settar í gongd beinanvegin, soleiðis at virksemið kann byrja í januar 2018. Mett verður, at tað í byrjanini er tørvur á tveimum starvsfólkum.
Menningardeildin skal skipast við serstakari játtan og undir egnum navni og samleika.

*Ábyrgd:* Uttanríkis- og vinnumálaráðið.
*Tíðarætlan:* Fyrireikingarnar at skipa nýggju deildina byrja beinanvegin, soleiðis at deildin kann fara til verka í januar 2018.
*Kostnaður:* meirjáttan á 5 mió. kr. (sí meiri um fígging niðanfyri).

6 *DMO: Destination Marketing Organisation*
7 *Strategiskjal hjá VFI*

### *2.2.1. Lógarbroyting er neyðug*

Ein umskipan av bygnaðinum innan ferðavinnuna inniber broytingar í galdandi lógargrundarlagi handan ferðavinnuna.Verða tilmælini um at seta eina menningardeild á stovn í VFI fylgd, inniber hetta sum nevnt, at endamálið og virksemið hjá VFI verður øðrvísi. Hetta hevur í fyrstu syftu við sær, at tað er neyðugt at tillaga endamálsorðingina í § 2 í lógini um p/f Visit Faroe Islands, soleiðis at lógin greiðari endurspeglar nýggju uppgávurnar, sum felagið skal røkja.

Í øðrum lagi er neyðugt at tillaga lógina í mun til ta umskipan av stuðulsskipanini, sum verður umrødd niðanfyri. § 7 í lógini um P/F Visit Faroe Islands ásetir í stk. 1, at: "landsstýrismaðurin kann í samstarvi við kommunur og lokalu vinnuna stuðla økisferðavinnufeløgum fíggjarliga." Somuleiðis er ásett í § 7, stk. 2, at landsstýrismaðurin eftir umsókn kann lata ferðavinnuni stuðul at marknaðarføra Føroyar. Her er talan um sonevnda krónu-fyri-krónu stuðulin, har stuðul kann vera latin marknaðarføringsátøkum við teirri treyt, at umsøkjarin sjálvur rindar helvtina. Lógin heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um, hvussu hesar báðar stuðulsskipanir skulu umsitast, tó at nýggj kunngerð við støði í hesi lógarheimild ikki er gjørd, orsakað av ætlanum um at endurskoða stuðulsskipanirnar. Sum greitt verður nærri frá niðanfyri, verður mælt til at endurskoða stuðulin og inniber hetta, at ásetingin í § 7 í lógini somuleiðis skal endurskoðast.

Sum nevnt omanfyri, verður mælt til, at nýggja menningardeildin verður funktionelt sundurbýtt, við egnari játtan á fíggjarlógini og egnum navni og samleika. Tí eigur lógin eisini at broytast samsvarandi hesum.

Í sambandi við lógarbroytingina, verður somuleiðis neyðugt at viðgera, um tørvur er á at broyta nevndarsamansetingina í P/F VFI. Limirnir í nevndini umboða í løtuni Ferðavinnufelagið, ferðaflutningsfeløg, kommunurnar, landsstýrið og mentan/ítrótt. Sum útgangsstøði umboðar nevndin sostatt ferðavinnuna í rættiliga breiðum týdningi, og tað eigur tí at viðgerast neyvari, hvørt tørvur er á øðrvísi umboðan í nevndini hjá P/F VFI í framtíðini.

Mælt verður til, at arbeiðið at broyta lógina verður sett í verk beinanvegin, soleiðis at neyðuga lógargrundarlagið undir nýggja bygnaðinum innan ferðavinnuna verður fingið til vega í 2017.

*Ábyrgd:* Uttanríkis- og vinnumálaráðið

*Tíðarætlan:* 1. jan. 2018

### 2.2.2 Nýggj stuðulsskipan og miðvís ferðavinnumenning kring landið

Tá ið Ferðaráðið varð endurstovnað í 2011, var farið undir eina umskipan av stovninum. Ein partur av hesi umskipan var, at stovnurin, sum fekk heitið Visit Faroe Islands, burturav skuldi savna seg um at marknaðarføra Føroyar uttanlands. Á fíggjarlógini fyri 2013 (og framyvir) var økið uppraðfest við 8 mió. kr. og er samlaða játtanin frá landinum til marknaðarføring uttanlands í dag knappar 13,4 mió. kr.[8][1]

Økta játtanin var ein liður í einari miðvísari strategi fyri at menna ferðavinnuna í Føroyum og var tekin um ein politiskan vilja til veruliga at satsa, fyri at flyta ferðavinnuna fram á leið. Fíggingin varð funnin við játtan úr landskassanum og var sostatt ikki tengd at inntøkum frá ferðavinnuni.

8 [1] *Verða stuðulskonturnar undir P/F VFI, ið ávikavist eru stuðul til økisferðavinnufeløgini (kunningarstovurnar) og kr. fyri kr. stuðulin - sum kann sigast at vera innlendis menning - og limagjald fyri ferðavinnusamstarvið í útnorðri (NATA) lagdar saman, er samlaða játtanin til ferðavinnuna 15,9 mió. kr. í dag.*

Játtanin, sum kann fatast sum ein íløga í eina nýggja vinnu í Føroyum, byrjar nú at kasta av sær fyri landið og hevur skapt stóran tørv á at menna og skipa ferðavinnuna betur innanlands. Um ferðavinnan skal halda áfram at vaksa sum burðardygg vinnugrein, er tað týðandi eisini at seta munandi fíggjarliga orku og fakkunnleika av til innanlands menning. Hetta eru tvinnir tættir av somu søk og vilja vit hava eina væl skipaða og burðardygga ferðavinnu í Føroyum, er tað alneyðugt, at menning og marknaðarføring fáa eins høga raðfesting.

Tí er tað avgerandi at seta nóg mikið av peningi av til at arbeiða við at menna ferðavinnuna innanlands. Játtanin hjá VFI til at marknaðarføra Føroyar uttanlands eigur ikki at minka, tí úrslitið av søluarbeiðinum seinastu árini er nú við at síggjast og fyri at halda vøkstrinum, er tað avgerandi at halda fram á sama støði. Men fortreyt fyri at skapa virðisøking í landinum er, at vinnan og økini kring landið verða ment og tí er tað eins avgerandi at seta nøktandi játtan av til at menna ferðavinnuna kring landið. Tí mælir arbeiðsbólkurin til, at 7 mió. kr. verða settar av til nýggju menningardeildina hjá VFI. Av hesum skulu 5 milliónir játtast afturat á fíggjarlógini og mælt verður til, at tær írestandi tvær mió. kr. koma frá umskipan av økisstuðlinum og av kr./kr. stuðlinum. Økisstuðulin er 1,525 mió. kr. (nærri verður greitt frá hesum í kap. 3.4) og kr./kr. játtanin er 475.000 kr.

Sum greitt er frá í fylgiskjali 3, hevur endamálið við kr./kr. stuðulsskipanini sannlíkt verið at hjálpa vinnuni við marknaðarføringsátøkum, sum í ein ávísan mun liggja uttan fyri vanligu marknaðarføringina hjá vinnuni. Fyrstu nógvu árini varð upphæddin á fíggjarlógini 1 mió. krónur, sum tó seinnu árini er lækkað niður í slakar 500.000 kr. Í 2017 er játtanin 475.000 kr. Eftirsum endamálið hjá VFI er marknaðarføring uttanlands, metir arbeiðsbólkurin ikki, at tað er ikki neyðugt við enn eini stuðulsskipan við júst sama endamáli. Tørvurin á peningi til menningarátøk innanlands er størri.

Samlaða játtanin á 7 mió. kr. skal í fyrstu atløgu brúkast til at seta tvey fólk í starv, ið skulu skipa og fyrireika menningararbeiðið. Restin av játtanini, uml. 6 mió. kr., skal brúkast til økismenning og tað virksemi annars, sum menningardeildin skal standa fyri. Hetta verður nærri útgreinað í fylgjandi brotum.

***Sostatt fara vit frá einari skipan, har økisfeløgini hava fingið íalt 1,5 mió. kr. árliga til eina hækkaða játtan á uml. 6 mió. kr., sum skal nýtast til menningarátøk kring landið.***

Mælt verður til at seta 5 mió. av á fíggjarlógini til menning av ferðavinnuni.

Mælt verður somuleiðis til, at økisstuðulin og kr./kr. stuðulin (áleið 2 mió. kr. íalt) verða umskipað og løgd afturat játtanini til menning, soleiðis at deildin hevur eina samlaða játtan á 7 mió. kr.

Fíggingarleisturin hongur saman við eini umskipan av galdandi stuðulsskipanum innan ferðavinnuna, sum varð umrøtt omanfyri.

**Uppgávur hjá menningardeildini**

Tað ber illa til longu nú at útgreina ítøkiligu uppgávurnar hjá menningardeildini. Talan er um eina fjøltáttaða menningaruppgávu, sum neyðugt verður at loysa smidliga og í tráð við tann tørv, sum líðandi verður staðfestur, so hvørt sum ferðavinnan mennist.

Yvirskipað snýr menningaruppgávan seg um at samstarva við viðkomandi leikarar innan ferðavinnuna og at samskipa ferðavinnuvirksemið, so vit fáa eina samanhangandi og væl skipaða ferðavinnu. Til at loysa

hesa uppgávu er neyðugt at hava eina ætlan fyri, hvussu vit vilja menna ferðavinnuna. Fyrsta uppgávan hjá eini menningardeild er tískil við útgangsstøði í hesi heildarætlan at orða eina ítøkiliga menningarætlan fyri ferðavinnuna í Føroyum.

*Menna økini kring landið*

Summi øki í Føroyum hava gjørt nógv við at menna ferðavinnuna, meðan onnur øki av ymsum orsøkum ikki hava raðfest hesa vinnu og hava tí lítið ferðavinnuvirksemi.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er neyðugt, at Føroyar verða býttar upp í samstarvsøki, sum verða mett at hóska saman í ferðavinnuhøpi. Økisbýtið eigur sjálvsagt at verða gjørt í tøttum samstarvi við kommunur og avvarðandi hjá ferðavinnuni. Síðan er neyðugt, at ein menningarætlan verður gjørd fyri hvørt øki. Menningardeildin kann gera ein leist fyri, hvussu slík menningarætlan kann síggja út og ráðgeva og vegleiða hesum arbeiði.

Síðani er neyðugt at raðfesta, hvussu stuðulin frá landinum verður nýttur skilabest, øki fyri øki. Hugsanin er, at tørvurin og áhugin í ymsu økjunum er ymiskur og er tað tískil eisini ymiskt, hvørji átøk eru neyðug at fremja. Tað ber ikki til at fara fram eftir einum generellum leisti, galdandi fyri alt landið. Átøkini og verkætlanirnar mugu skraddaraseymast til hvørt øki sær.

Arbeiðsbólkurin ímyndar sær, at ein menningarætlan verður løgd soleiðis til rættis, at tað verður sett inn miðvíst við lokalum, verkætlanarsettum starvsfólki, peningi og menningarátøkum fyri eitt ella tvey øki í senn og í eitt ávíst áramál, kanska 2-3 ár. Á henda hátt fer meginparturin av peninginum, sum framyvir verður játtaður til menning, til ítøkilig átøk og verkætlanir úti í økinum við ferðavinnumenning fyri eyga. Endamálið er bæði at spjaða ferðafólk til fleiri áhugaverd støð kring landið, at menna ferðavinnuna í øllum landinum og at tryggja, at menningin er kjølfest lokalt. Í stuttum snýr tað seg um at seta í verk eina heildarloysn fyri hvørt øki sær, sum sjálvsagt er í tráð við tey ynski, sum kommunur og borgarar á staðnum ynskja. Til tess at tryggja sær tað, er neyðugt at borgarar og myndugleikar á staðnum verða við í tilgongdini frá byrjan.

Við at skipa eitt øki í Føroyum í senn verður hol sett á eina menningartilgongd sum við tíðini fevnir um alt landið. Marknaðarføringin av Føroyum sum ferðafólkalandi eigur síðani at taka atlit at menningini og í mest møguligan mun beina ferðafólk til tey støð, sum eru ment og fyrireikað at taka ímóti. Tað hevur sera stóran týdning, bæði fyri vitjandi og vertin, at ferðafólk koma til bygdir og støð, har tey eru ynskt. Ein týðandi partur av eini burðardyggari ferðavinnu er, at økið og bygdarfólkið, sum verða vitjað, fáa búskaparligan ágóða av vinnuni. Gera tey ikki tað, er sannlíkt, at gestablídnið við tíðini fánar. Tað er tí ein hornasteinur í einari og hvørjari menningarætlan, at hon skapar vøkstur og menning á staðnum.

Við støði í landsfevnandi menningarætlanini eigur at verða gjørd ein 4-5 ára raðfestingarætlan, sum tryggjar, at komið verður kring alt landið og at menningarátøk eru sett í verk allastaðni í landinum. Arbeiðsbólkurin ímyndar sær, at tað við tilmæltu játtanini til menning ber til at hava verkætlanarsett fólk í starvi kring landið, sum savna seg um at menna eitt ávíst øki í samstarvi við fólk á staðnum, lokalar myndugleikar og við støði í menningarverkætlanini, sum VFI samskipar. Um landið verður býtt í t.d. 6 øki, verður mett, at tað ber til at hava menningarverkætlanir í gongd í tvinnum økjum samstundis, soleiðis at sjøtul er settur á mennandi átøk í øllum landinum innan 3-4 ár. Hetta er tó sjálvsagt nakað, sum skal greinast nærri, tá menningardeildin er stovnsett og starvsfólkini eru farin til verka.

*Ein tvíbýtt stuðulsskipan*




Arbeiðsbólkurin mælir til, at stuðulin (uml. 5,5 mió. kr.) verður býttur upp í tvinnar puljur.

Sum myndin oman fyri vísir, skal onnur puljan brúkast til verkætlanir, sum menningardeildin beinleiðis varðar av og stýrir í samstarvi við kommunur og vinnuna í ymsu økjunum. Peningurin eigur at fara til verkætlanarsett starvsfólk úti í økinum, sum hevur uppgávuna at stuðla og vegleiða aktørunum í økinum í mun til ferðavinnumenningina. Partur av arbeiðinum er at orða politikk og ætlanir fyri økini; at skapa góðar karmar um ferðavinnuvirksemi, herundir neyðuga infrakervið (t.e. gøtur, kunning o.a.) og at byggja upp lokal ferðavinnusamstørv, sum kunnu vera grundarlag undir eini burðardyggari og væl virkandi ferðavinnu í økjunum.

Hin puljan er ein meiri beinleiðis stuðulspulja til ferðavinnuverkætlanir í kommununum. Endamálið við hesi stuðulspulju er at seta í verk og stuðla nýggjum ferðavinnutilboðum, t.e. til vinnuligar verkætlanir og produktmenning úti í økjunum. Stuðulin eigur at verða latin eftir kr./kr. prinsippinum, soleiðis at ein fortreyt fyri at fáa stuðulin er, at kommunan og møguliga eisini lokala vinnan í minsta lagi kemur við helminginum av fíggingini til verkætlanirnar. Kommunurnar eiga at varða av hesum verkætlanum við stuðli og vegleiðing frá menningardeildini og verkætlanarsetta starvsfólkinum í økinum, soleiðis at tað verður tryggjað, at hesar verkætlanir eru samskipaðar við virkseminum, sum annars er í gongd í økinum. Ein reglugerð fyri stuðulin skal orðast, soleiðis at tað eru greiðar mannagongdir fyri, hvussu stuðul verður latin. Tað er uppgávan hjá menningardeildini at menna nýggju stuðuls- og verkætlanarskipanina, sum skal stuðla og stýra menningartilgongdini.

Afturat hesum eiga aðrar skipanir, so sum Vinnuframi, Útnorðurgrunnurin, Nora, Frítíðargrunnurin umframt íverksetararáðgeving, útjaðaraátøk ella aðrar almennar og privatar stuðulsskipanir at kunna stuðla og fíggja vinnuligum verkætlanum í eini tilgongd at byggja upp ferðavinnuna í einum ávísum øki í senn. Stutt sagt eigur at vera møguligt at seta inn við menningarátøkum við fleiri skipanum samstundis, og at samskipa átøkini, soleiðis at tey stuðla hvørjum øðrum. Tað er uppgávan hjá menningardeildini at standa fyri hesi samskipan og at tryggja, at sett verður inn við røttum amboðum innan ymsu økini.

**Samskifti við ráð og stovnar**

Ferðavinna er sum áður nevnt fjøltáttað vinnugrein, ið nemur við stórt sæð allar samfelagstættir. Ein stórur partur av samskipanaruppgávuni hjá VFI verður tí at bera soleiðis í bandi, at ferðavinnan verður so smidliga og effektivt skipað sum til ber, samstundis sum hon, øll sum hon er, byggir á prinsippini um burðardygga ferðavinnu. Hetta inniber í nógvum førum tætt samskifti og samstarv við aðrar myndugleikar og stovnar o.o. um t.d. at nøkta eftirspurningin eftir vørum og tænastum, sum støðugt broytist við ferðavinnuni. Til dømis verður neyðugt at:

- samskifta við Strandfaraskip Landsins um broyttan flutningstørv og kostnaðarbygnað fyri ferðaseðlar.

- Í samstarvi við Mentamálaráðið er neyðugt at seta sjøtul á arbeiðið at útbyggja og menna ferðavinnuútbúgvingar o.s.fr.

- Í samstarvi við náttúru- og umhvørvismyndugleikar at tryggja, at ferðavinnan ikki elvir til skaða á náttúru ella umhvørvi.

- Í samráð við m.a. Hagstovuna og Vága Floghavn er neyðugt at útbyggja hagtals-grundarlagið.

- Í samráð og samstarvi við m.a. tilbúgvingarmyndugleikar at tryggja røttu kunningina til ferðandi í mun til m.a. gongd í haga og at tryggja, at tilbúgvingin er virkisfør í mun til eina vaksandi ferðavinnu.

- Tað er neyðugt at seta eitt arbeiði í gongd til tess at kanna, hvørt tørvur er á einari góðkenningar- ella autorisasjónsskipan av ferðavinnutilboðum. Sí kap. 5.1.4.

**Aðrar uppgávur hjá menningardeildini**

Umframt fjøltáttaðu uppgávuna at menna ferðavinnuna í Føroyum, hevur menningardeildin millum annað eisini ábyrgd av at virka fyri samstarvi í vinnuni í breiðum høpi, herundir:

- At skipa eitt samstarvsnetverk sum tryggjar samskipan, vitanardeiling og framburð innan ferðavinnuna umframt tryggjar, at greitt samband er millum marknaðarføring uttanlands og menningina innanlands.

- Ráðgeva, leiðbeina og hjálpa íverksetum og kommunum v.m. í mun til burðardygga ferðavinnu.[9]

- At samskipa og framleiða kunningartilfar til ferðafólk, (faldarar, kunning, appir, heimasíður o.s.fr.).

- At vera til taks við ráðgeving og vegleiðing, møguliga skipa fyri skeiðsvirksemi v.m. til tess at stimbra íverksetan innan ferðavinnu í Føroyum.

- At orða mannagongdir og vegleiðingar um framferðarhátt og krøv, tá ein t.d. ynskir at bjóða fram fiskitilboð, ból og bita, heimablídni o.s.fr.

*9 Tað er umráðandi, at skeið, ráðgeving v.m., sum menningardeildin stendur fyri, verður samskipað við tað sum Íverksetarahúsið, Vinnuframi, Hugskotið og møguliga aðrir lokalir ráðgevar bjóða, soleiðis at íverksetarar ikki skulu fyrihalda seg til fleiri skipanir og ráðgevingar samstundis.*

Mælt verður til, at árið 2017 verður brúkt til at fyrireika nýggju skipanirnar, fáa fíggingina upp **á pláss og at seta starvsfólk í menningardeildina hjá VFI,** m.a. fólk, sum koma at hava ábyrgd av at umsita stuðulsskipanina. Uttanríkis- og vinnumálaráðið leiðir hetta fyrireikingararbeiði í samstarvi við **VFI. Tá** endalig uppskot til reglugerðir og menningarætlan eru klár, verða tey send til ummælis hjá avvarðandi pørtum, soleiðis at tað verður tryggjað, at ætlanin er í samsvari við tørvin kring landið og at nýggja skipanin kemur at flyta ferðavinnuna í Føroyum fram á leið.

*Ábyrgd:* Uttanríkis- og vinnumálaráðið og VFI.

*Tíðarætlan:* Primo 2018.

Í hesum kapitli er greitt frá, hvørjar broytingar vit meta vera neyðugar at gera í bygnaðinum innan ferðavinnuna. Samanumtikið mælir arbeiðsbólkurin til, at framtíðar bygnaður og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur verða skipað soleiðis:




Í stuttum ber til at lýsa nýggja bygnaðin soleiðis:

- VFI er alment partafelag, ið liggur undir UVMR. Landsstýrismaðurin velur antin beinleiðis ella óbeinleiðis allar nevndarlimir.

- Stýrisbólkur verður settur frá 2018-23 at fremja tilmælini í hesum áliti í samstarvi við menningardeildina hjá VFI. UVMR leiðir bólkin, ið er settur við landsstýrisfólkunum fyri 6 aðalráð, ið eiga ábyrgd av ymsum pørtum av tilmælunum.

- VFI verður umskipað til - umframt at taka sær av sølu/marknaðarføring - eisini at átaka sær av samskipan/menning. Nýggja menningardeildin hevur serstaka játtan og samleika. Játtanin er býtt upp í tvey, uml. 13 mió. til marknaðarføring og uml. 7 mió. til menning.

- Menningardeildin skal menna økini kring landið. Sett verður inn miðvíst við lokalum, verkætlanarsettum starvsfólki, peningi og menningarátøkum fyri eitt ella tvey øki í senn og í eitt ávíst áramál.

- Meginparturin av peninginum, sum framyvir verður játtaður til menning, fer framyvir til ítøkilig átøk og verkætlanir úti í økjunum við ferðavinnumenning fyri eyga.

- Økisstuðulin verður avtikin og kommunur taka ábyrgd av at menna ferðavinnnu í sínum øki, herundir um tær framhaldandi hava økisfeløg og hvussu samstarvað verður um kunningarstovur.

# Kapittul 3. Náttúra

## 3.1 Náttúran og ferðavinna

Náttúran er grundarsteinurin undir mest sum allari ferðavinnu her á landi. Høvuðsreglan, sum øll ferðavinna eigur at fylgja, er, at náttúran skal varðveitast. Hetta merkir ikki, at pláss ikki er fyri ferðavinnuni. Ferðafólk, føroyingar eins væl og útlendingar, skulu kunna uppliva vøkru føroysku náttúruna og njóta hana til fulnar. Fyritreytin er tó altíð, at alt ferðavinnuvirksemi í náttúruni skal vera burðardygt, og at náttúran er tilfeingi, sum skal gagnnýtast á burðardyggan hátt.

Í mun til náttúruna merkir ein burðardygg ferðavinna, at virksemið í ferðavinnuni ikki hevur árin á djóraella plantulív og at virði á náttúruni ikki minkar. Ferðafólk, sum fara út í náttúruna, sjálv ella saman við ferðaleiðara, á landi ella á sjónum, skulu ikki broyta náttúruna ella leggja slóð eftir sær. Tað skal ikki kunna síggjast, at ferðafólk hava vitjað. Eins og øll onnur, skulu ferðavinnusmiðir og ferðafólk ikki dálka luft, áir, vøtn ella lendið samstundis sum tryggjað verður, at gingið verður hóvliga í náttúruni uttan at órógva við t.d. gangi.

Illa ber til at koma uttanum slit á náttúru og tørvur vil altíð vera á viðlíkahaldi og umvælingum. Tað er sera neyðugt at hava eina ætlan fyri, hvussu ferðavinnuinntøkur, beinleiðis ella óbeinleiðis, kunnu fíggja umvælingar av sliti, gera gøtur og eisini at seta upp skelti. Hetta ger eisini ferðavinnuna til eitt týdningarmikið amboð, við tað, at hon kann skapa inntøkur til at verja náttúru, sum annars ikki verður vard. Ein kend meginregla innan umhvørvisvernd er "Polluter Pays"-meginreglan, sum í stuttum merkir, at tann sum dálkar, eisini rindar. Hóast einstaka ferðafólkið vanliga ikki kann sigast at "dálka", so hevur ein riðil av fólki, føroyingar ella útlendingar, árin á umhvørvið og náttúruna. Tað er tí natúrligt, at tað eisini er ferðavinnan, sum er við til at rinda fyri árin og slit á náttúruna, antin beinleiðis ella óbeinleiðis.

Ferðavinnan, eins og aðrar tilfeingisvinnur, hava tað eyðkenni, at skaðar, sum tær elva á náttúru og umhvørvi, hava neiligar avleiðingar fyri víðari menning av vinnuni sjálvari. Um eitt øki missir virði sum ferðavinnumál, er vandi fyri, at ein týdningarmikil inntøkukelda við tíðini dettur niðurfyri. Ferðavinnan eigur tí sjálv at hava náttúruvernd sum hægsta mál. Alt annað er løtuvinningur.

Í Føroyum eru vit eftirbátur, tá ið tað kemur til vitan um náttúruna og náttúruvernd. Ætlan hevur leingi verið um at gera nýggja náttúruverndarlóg og at umskipa náttúruverndarøkið frá desentralum friðingarnevndum til eina miðsavnaða náttúruverndarfyrisiting. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur sett ein arbeiðsbólk at gera uppskot til náttúruverndarlóg, sum eftir ætlan skal leggjast fyri Løgtingið í 2017. Tað hevur stóran týdning, at hetta arbeiðið verður raðfest høgt, soleiðis at ein nýggj náttúruverndarlóg kemur í gildi sum skjótast.

Ein komandi náttúruverndarlóg eigur at geva heimild til at gera reglur um:

- at tað ikki skal verða loyvt, ella einans í avmarkaðan mun, at ganga og á annan hátt ferðast, har vandi er fyri at órógva náttúruna

- sigling fram við landi, serliga undir fuglabjørgum og har lundalond eru. Neyðugt er at útpeika økir, har eingin - ella sigling við avmarkaðari ferð - kann fara fram

- koyring í haganum

- at fyribyrgja spjaðing av fremmandum djórum og plantum
- um at fyribyrgja spjaðing av rottum til rottufríar oyggjar
- ikki at taka djór og plantur úr náttúruni

Eisini er neyðugt við tíðarhóskandi ásetingum um revsing, serliga bótarevsing, ið skulu brúkast, tá illa verður farið um náttúruna. Men tá alt kemur til alt, avhongur vavið á náttúrufyrisitingini av játtanini á fíggarlógini.

Vaksandi talið av ferðafólki leggur føroysku náttúruna undir eitt eyka trýst, sum ger tørvin á eini náttúruverndarlóg, og ikki minst á einari munagóðari náttúrufyrisiting, enn størri. Náttúran er viðkvom, serliga í lítlum oyggjasamfeløgum. Jú minni landið er, tess skjótari síggjast árinini av einari vaksandi ferðavinnu.

Stórur tørvur er á at raðfesta náttúruvernd. Tað er náttúran, sum er grundarlag undir stóru vinnugreinunum í Føroyum og soleiðis er eisini við ferðavinnuni. Verja vit ikki hetta tilfeingi, máða vit støði undan vinnulívinum og menning innan hesi øki. Hóast ferðavinnan í sær sjálvum ikki er orsøk til, at vit nú verða noydd at raðfesta náttúruvernd og -fyrisiting, so er tað ein sannroynd, at ferðavinnan í størri mun enn annað virksemi, setir sjóneykuna á náttúruna og fær okkum at ásanna hendan tørv, sum eisini var til staðar, áðrenn ferðavinnan tók seg upp. Hetta er eitt av jaligu avleiðingunum av ferðavinnuni; at hon ger greitt, hvussu stórur tørvurin er á at raðfesta lógarkarmar og umsiting, so vit fáa reglur um at varðveita náttúruøki, djóralív, búøki og í mest møguligan mun minka skaðar og skaðiliga ávirkan á náttúruna.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at arbeiðið at orða nýggja náttúruverndarlóg fær høga raðfesting. Lóggávan skal eisini taka hædd fyri økta ferðavinnuvirkseminum og teimum avbjóðingum, vinnan kann hava við sær í mun til náttúruna.

Eins neyðugt er tað, at ein munagóð fyrisiting samstundis verður raðfest, soleiðis at nýggja lógin kann handhevjast í verki.

*Ábyrgd:* Heilsu- og innlendismálaráðið.

*Tíðarætlan:* 2017-2018.

*Kostnaður:* Uml. 2-3 mió. kr. (leyslig meting)

## 3.2 Uppgávur innan náttúruvernd og ferðavinnu

Nú Heilsu- og innlendismálaráðið arbeiðir við at gera nýggja náttúruverndarlóg, ber illa til neyvt at útgreina, hvørjar uppgávur náttúrufyrisitingin fer at hava, m.a. orsakað av, at einki endaligt fyriliggur um, hvussu uppgávu- og ábyrgdarbýtið fer at vera millum land og kommunu. Greitt er tó, at ferðavinnan er neyvt tengd at náttúruni og at neyðugt er við samstarvi millum ferðavinnumyndugleikan og náttúrumyndugleikan, t.v.s. millum UVMR/VFI og HIMR og Umhvørvisstovuna, har náttúrufyrisitingin hjá landinum sannlíkt verður løgd. Neyðugt er, at UVMR og HIMR gera av, hvussu ábyrgdarbýtið millum hesi ráð best kann skipast, so hetta er greitt, tá náttúrverndalógin kemur í gildi.

Yvirskipað eigur ferðavinnan at verða áløgd generel krøv um at taka náttúru- og umhvørvisatlit. Eisini er hugsandi, at tað er UVMR, sum setir neyvari krøv á ávísum økjum mótvegis ferðavinnuni, eitt nú, at

ferðasmiðir, sum virka í náttúruni, eru góðkendir/løggildir. UVMR kann tá verða løggilgildingarmyndugleiki, meðan náttúrufyrisitingin (Umhvørvisstovan) og fakstovnarnir (Havstovan og Náttúrugripasavnið/Søvn Landsins) verða partur av viðgerðini. Hesi kunnu t.d. vera hoyringarpartur, bæði av umsókn um góðkenning og í viðgerðini at meta um, hvørt virksemi, sum umsøkjarin ynskir at hava, er burðardygt á náttúruøkinum. Annað dømi er, at ferðavinnusmiðir, sum virka í náttúruni, verða álagdir at gera árinsmetingar, t.e. at meta um, hvørt teirra virksemi hevur árin á náttúru og umhvørvi. Kravið kundi verið staðfest í ferðavinnulóggávu, men lagt til náttúrufyrisitingina at umsita, eins og vit kenna tað frá elveitingarlógini[10].

Her er listi við dømum um uppgávur, sum eiga at vera loystar av antin ferðavinnu- ella náttúruverndarmyndugleikanum, ella møguliga í samstarvi:

1. gera metingar um burðarorku, arbeiða við verndartiltøkum, friðingum og árinskanningum av ferðavinnuni
2. gera upplýsandi og vegleiðandi tilfar um náttúru, kunningartilfar, faldarar og skelti o.s.fr.
3. gera náttúrufakligar metingar um stuðul til verkætlanir innan ferðavinnu
4. menna ferðaleiðaraútbúgving innan náttúruferðavinnu
5. meta um umsóknir frá feløgum um góðkenning innan náttúruferðavinnu

Nærri verður komið inn á hesar uppgávur í fylgjandi brotum.

Tað hevur týdning, at tað virksemi, sum ein vaksandi ferðavinna kann hava við sær, verður stýrt innan karmarnar av lóggávu um náttúruvernd og umhvørvi, sum gevur nøktandi heimildir til at regulera, t.d. sigling fram við landi, eins og gongd og koyring við motorakførum í haganum.

Vaksandi tal av ferðafólki merkir eisini, at nøktandi umsitingarlig orka, bæði hjá landi og kommunum, skal til fyri at tryggja, at náttúran ikki verður fyri skaðiligum árinum, t.d. við at gera og umvæla gøtur, seta upp skelti og møguliga veita loyvi til ávíst virksemi hjá ferðavinnuni. Hetta eru uppgávur, sum náttúru- og ferðavinnumyndugleikin og møguliga onnur, eiga at samstarva um.

Í fylgjandi brotum fara vit stutt ígjøgnum nakrar av uppgávunum, sum ein náttúrufyristing skal taka sær av, antin sjálv ella sum hoyringspartur í náttúrurelateraðum málum, sum UVMR varðar av.

### *3.2.1 Kanna og kortleggja náttúruna*

Tryggasti máti at fylgja við støðuni hjá náttúruni er, at gera afturvendandi kanningar, sum á skipaðan hátt staðfesta støðuna hjá náttúruni. Í Føroyum eru vit illa fyri, tá ræður um skipaða vitan um djóra- og plantulív, og tí skulu rættiliga grundleggjandi kanningar setast í verk. Fyrst og fremst skulu grundleggjandi kortleggingar gerast, sum vísa, hvar ymisk djór og plantur eru. Og eisini er neyðugt at gera stovnsmetingar, m.a. eigur ein skipað teljing av fugli at verða sett í verk. Føroyar hava skyldu at fylgja við og fráboða støðuna hjá fugli á Ramsar-oyggjum, tí er neyðugt, at fuglateljingar í Mykinesi, Nólsoy og Skúvoy koma í eina trygga legu við fastari fígging.

*10 § 16 í elveitingarlógini er løgd til Umhvørvisstovuna at fyrisita, t.d. kann UVMR ikki veita elveitingarloyvi til felag, áðrenn Umhvørvisstovan hevur góðkent árinsmeting, sum felagið hevur gjørt.*

### 3.2.2 *Viðkvom og áhugaverd náttúra eigur at eyðmerkjast og verjast*

Føroyar hava nógv áhugaverd støð, sum eru møgulig ferðamál. Summastaðni er stórt lívfrøðiligt margfeldi, t.d. nógv ymisk sløg av fugli. Aðrastaðni vaksa sjáldsamar plantur. Summi støð eru viðkvom og tola ikki nógva vitjan. Kanningar skulu setast í verk á viðkvomum støðum, har ferðavinnan hevur virksemi. Tað hevur somuleiðis týdning, at ferðavinnan og ferðasmiðir gera árinskanningar, sum kunnu staðfesta, um virksemi teirra hevur árin á náttúru og umhvørvi. Metingar eiga at gerast um áhugaverd øki. Hvør er burðarorkan? Hvørji øki eru viðkvom? Hvar finnast serligar plantur ella serlig djór? Hvørji skulu verjast og hvørji skulu friðast? Metingarnar eru liður í at finna fram til, hvat eitt øki tolir, eisini í mun til burðardygt ferðavinnuvirksemi. Tá vit um t.d. 15 ár ynskja at meta um, hvørt ferðavinnan hevur haft árin á náttúruna, mugu kanningar setast í verk nú. Jú fyrr, tess betri.

Ein skipan við náttúruvegleiðarum, sum kunnu ráðgeva í sambandi við nýtslu av náttúruni, eigur at verða kannað. Slík skipan er kend í øðrum londum, m.a. úr Noregi.

Allir ferðasmiðir, sum selja ferðavinnutilboð í náttúruni, skulu arbeiða út frá meginreglunum um burðardygga ferðavinnu og skulu eisini hava møguleika fyri at verða løggildir til endamálið (sí kap. 4.1.4). Serliga týdningarmikið er, at ferðavinnuvirksemið ikki elvir til, at virðið á náttúruni fellur, t.d. at fuglur og náttúra ikki órógvast, at eingi týðandi inntriv verða gjørd og eingin slóð ella annað liggur eftir.

Ein náttúruumsiting skal m.a:
Fara undir yvirskipaða kanning og kortlegging av føroysku náttúruna

Fara undir skipaðar stovnsmetingar, serliga fuglateljingar

Seta krøv um árinsmetingar og meta um burðarorku

Skipa fyri, at neyðugar friðingar ella aðrar avmarkingar í atgongd verða gjørdar á viðkvomum økjum ella har plantur, fuglur ella búøki standa fyri hóttafalli.

### 3.2.3 *Koyring í haga og sigling fram við landi*

At koyra við motorakførum í haganum fer sera illa við lendinum. Lendið hevur langa tíð um at koma fyri seg, og grefligu arrini í lendinum síggjast í áravís. Eisini órógvar slík koyring náttúruna og styggir fuglin. Óskipað koyring við ATV og MC og øðrum motoraktørum eigur ikki at fara fram í haganum. Koyring við motorsúkklum og øðrum motorakførum uttan fyri veganetið eigur at krevja undantaksloyvi.

At sigla við báti/skipum/vatnscootarum kann vera friðarligt virksemi, sum ikki órógvar fugl og náttúru. Men vit eiga at vera tilvitað um, at óljóð og annað mannaskapt órógv kann hava skaðilig árin á nógv sløg av sjófugli, serliga í reiðringartíðini. Ikki minst, um nógvir bátar sigla. Vanligt árin er, at fuglur gevst at reiðrast. Viðkvom øki eiga at verða stongd ella í minsta lagi vard, kanska einar 100-500 m úr landi, mørk skulu setast á hægst loyvdu ferð og loyvisskipan eigur at vera møgulig, har einstøku leiðirnar verða góðkendar. Reglur eiga at verða gjørdar um, at serligt varsemi skal vísast, tá siglt verður á vøtnum. Siglingarferð hjá bátum á vøtnum skal avmarkast. Fyri at fyribyrgja smittu, mugu bátar ikki flytast millum vøtn.

Í Ramsar-høpi er tilmæli um at avmarka sigling kring Ramsar-oyggjarnar, og arbeiðið at orða kunngerð um sigling kring Ramsar-oyggjar er í gongd.

Í sambandi við tilevning av ferðaleiðaraútbúgvingum er tað týdningarmikið, at serlig náttúruskeið verða boðin ferðaleiðarum, ið virka í náttúruni. Somuleiðis er alneyðugt at fara undir eina góðkenningarskipan til tær fyritøkur, ið fáast við serliga váðakent ferðavinnuvirksemi, herundir atlit til trygd fyri ferðafólk og hvør er rætti myndugleiki at taka sær av hesum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at reglur verða settar í gildi fyri koyring í haganum og fyri sigling á sjónum og vøtnum. Sum útgangsstøði eigur krav at vera um loyvi til at brúka motorakfør í náttúruni.

- Tørvur er á reglum um at sigla fram við landi, serliga undir fuglabjørgum og har lundalond eru
- Feløg, sum bjóða túrar í náttúruni, t.d. at sigla við ferðafólki, eiga at verða góðkend til endamálið
- Allir ferðaleiðarar, sum bjóða seg fram at leiða túrar í náttúruni, á sjógvi eins væl og á landi, eiga at hava lokið viðkomandi skeið, t.d. náttúruferðaleiðari.

*Ábyrgd:* HIMR/UVMR

*Tíðarætlan: 2017-2018 (partur av náttúruverndarlóg)*

### *3.2.4 Ferðamannaskip*

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur fleiri ferðir fingið fyrispurningar og áheitanir frá pørtum innan ferða- og shippingvinnuna viðvíkjandi virkseminum hjá stórum ferðamannaskipum, sum koma til Føroya.

Tað kemur fyri, at hesi ferðamannaskip kasta akker uttan fyri oyggjarnar, eitt nú út fyri Mykines, seta skjóttgangandi bátar á sjógv og sigla kring oyggjarnar. Eisini kemur tað fyri, at ferðafólkini verða sett í land og gera útferðir á landi, uttan at føroyskir myndugleikar ella ferðasmiðir á nakran hátt eru kunnað ella eru við. Ymiskt bendir á, at hetta er virksemi, ið vindur upp á seg. T.d. fáa ávísar fyritøkur í ferða- og shippingvinnuni fyrispurningar frá ferðamannaskipum, sum hava í hyggju at koma til Føroya og sjálv skipa fyri útferðum við skjóttgangandi bátum og kajakkum frá skipunum. Ferðamannaskipini spyrja seg fyri um reglur og vilja vita, um serlig loyvi eru kravd í sambandi við tílíkt virksemi í Føroyum.

Talan er í stóran mun um eitt øki, sum ikki er skipað í lóg í dag. Arbeiðsbólkurin metir, at tað er tørvur á at skipa hesi viðurskifti betur, soleiðis at neyðug atlit verða tikin til umhvørvi, trygd og vinnu. Neyðugt er at viðgera, hvussu vit kunnu taka hædd fyri teimum avbjóðingum, sum ein vaksandi cruise-ferðavinna kann hava við sær. Tað er í fyrstu syftu neyðugt at tryggja, at neyðugar reglur verða settar fyri náttúru og trygdaratlitum, í øðrum lagi er neyðugt at tryggja, at hetta virksemi ikki virkar kappingaravlagandi fyri ferðavinnuna í Føroyum og í triðja lagi er neyðugt at tryggja, at neyðug trygdar- og umhvørvistilbúgving er tøk, skuldu óhapp hent.

Tað eru fleiri møguleikar, tá tað snýr seg um at skipa hesi viðurskifti betur. Mest einfalda, men eisini mest víðgongda loysnin er at geva ferðamannaskipum forboð ímóti at kasta akker millum oyggjarnar. Ein linari loysn vildi verið at loyva hesum á ávísum støðum eins og tað somuleiðis kann vera møguligt at seta smábátar á sjógv á ávísum støðum og við serligum loyvi/góðkenning til tess.

Arbeiðsbólkurin metir, at einfaldasta og tryggasta loysnin er at seta skipunum forboð fyri at kasta akker ímillum oyggjarnar (tó við ávísum undantøkum). Tryggasta, tí føroyskt sjóøki krevur servitan um streym og veður og einfaldasta/bíligasta, eftirsum handhevjanin av slíkum forboði er munandi meiri einføld enn ein loyvisskipan. Vinnuliga er hetta eisini skynsamasta loysnin, eftirsum óskipað útlendskt ferðavinnuvirksemi á sjónum verður avmarkað; skipini leggja í størri mun at í føroyskari havn og hava tá møguleika at brúka føroyskar ferðasmiðir og ferðaleiðarar.

Løgtingslógin um trygd á sjónum hevur onga beinleiðis áseting um loðsskyldu ella aðra regulering fyri oman fyri nevndu ferðamannasigling, men § 31 í lógini heimilar avvarðandi landsstýrismanni m.a. at "... áseta reglur og geva almenn og ítøkilig boð ella forboð til tess at tryggja fría skipaferðslu, fyribyrgja óskili og vanda á sjónum, undir hesum um siglingarreglur, brúk av loðsi í innanoyggjasigling..". Nevnda § 31 kann sostatt brúkast sum heimildargrundarlag fyri einari kunngerð, sum regulerar siglingina hjá fremmandum ferðamannaskipum innanoyggja í Føroyum, herundir fráboðanarskyldu, loðskrav, siglingarleiðir, bannað siglingarøki, fjarstøðumørk, ferðavmarkingar, forboðsøki v.m.[11]

Mælt verður til, at forboð verður sett ferðamannaskipum at kasta akker millum oyggjarnar.

Hetta kann gerast við støði í kunngerðarheimildini í § 31 í lógini um trygd á sjónum.

Ábyrgd: UVMR

*Tíðarætlan:* 2018

## 3.3. Gongd í haga

### *3.3.1 Rætturin at ferðast í náttúruni*

Í gomlum døgum var tað ein sjálvfylgja, at fólk kundu ferðast í náttúruni og frítt nýta tilfeingi so sum fisk, við, sand, grót, plantur v.m. Við ognarrættinum og eini meira skipaðari nýtslu av lendinum, er støðan tó broytt avgerandi. Tað er í dag vanligt at síggja eitt stríð millum áhugamál, har jarðareigarar øðrumegin ynskja at troyta teirra ogn meira skipað og í friði frá almenninginum, meðan almenningurin hinumegin ynskir eina alsamt meira víðfevnda og óskerda atgongd til náttúruna. Í nýggjari tíð er hetta vorðið ein tvídráttur, sum í nógvum londum er herdur, nú "rekreativa" nýtslan er vorðin ein meira týðandi partur av lendisnýtsluni. Ósemjan veksur eisini av, at alsamt fleiri treytir og lóggáva seta krøv, serliga innan umhvørvis- og nátturuvernd, m.a. viðv. ynskinum um at verja plantur og djór.

Hóast hesar ósemjur líkjast kring heimin, er tað tó sera ymiskt, hvussu lóggávan í ymsum londum handfer hesa avbjóðing og innbygda áhugamálsstríð. Fjølbroytni stavar lutvíst frá deomografiskum, landafrøðiligum og søguligum/mentanarligum munum millum londini.

Í responsum frá 2001, sum danska Skov- og Naturstyrelsen hevur latið gjørt, verða níggju ymisk lond kannað, í mun til rættin hjá almenninginum at ferðast í náttúruni.[12] Yvirskipað ber til at siga, at tað er avgerandi munur á tættfólkaðum londum, har høvðusparturin av landinum er dyrkað lendi (sum t.d. Danmark og

11 *Sí fylgiskjal 4*

12 *Londini eru: Ongland/Wales, Skotland/Norðurírland, Holland, Baden-Wuttenberg, Meckelburg-Vorpommern, Schlesvig-Holstein, Danmark, Svøriki og Noreg. Sí responsum frá Skov- og Naturstyrelsen: "retten til at færdes i naturen" (2001): http://www2.sns.dk/udgivelser/2001/Adgangsudvalget/Responsum%20SkovogNaturstyrelsen.pdf*

Holland) og meiri fábýltum londum, sum t.d. Noreg og Svøríki, har meginparturin av náttúruni framvegis er vill. Kanningin vísir eitt týðiligt samband millum søguligar og mentanarligar munir, tá reglurnar um atgongdina hjá almenninginum til náttúruna í ymsu londunum verða samanbornar. Yvirskipað ber til at staðfesta ein mun millum tey lond, sum eru merkt av germansku siðvenjuni, har rætturin til at troyta tilfeingið kemur fram um ognarrættin (norðurlond) og síðani tey lond, ið eru eyðkend av rómversku rættarsiðvenjuni, har ognarrætturin kemur fram um brúksrættin (Bretland, Suðurevropa).

Felags fyri øll lond er, at avgerandi vekt verður løgd á atlitið til privata ognarrættin. Tað er tó sera ymiskt, hvussu ymsu londini handhevja hendan ognarrættin.

Summastaðni hevur ognarrætturin høga raðfesting og er rætturin hjá almenninginum at ferðast í náttúruni avmarkaður til tey øki, sum eru skilmarkað sum almenn øki ella við tilvísing til avtalur, sum eru gjørdar millum tað almenna og jarðareigarar (sum t.d. í Hollandi). Aðrastaðni, t.d. í Týsklandi er sonevndi "betretnungsrecht" ein rættur, ið hevur høga raðfesting og er enntá umrøddur í týsku grundlógini, eins og hann er tað í Svøríki. Í Skotlandi er lóggáva nýliga sett í verk, ið byggir á nakrar av somu meginreglunum, sum danska náttúruverndarlóggávan byggir á. Her er við øðrum orðum talan um lóggávu, sum skilmarkar mørkini hjá ognarrættinum. Í Noregi, Svøríki og Íslandi er "allemandsretten" raðfestur á sama stigi sum privati ognarrætturin og hevur almenningurin her lutfalsliga víttfevnandi rættindi at ferðast og uppihalda sær á privatari jørð.

Hóast almannarætturin er galdandi í hinum norðurlondunum, er hesin rættur ikki altíð staðfestur í lóg. Í norðurlondum er tað bara í Íslandi, Noregi og Grønlandi, at almannarætturin er beinleiðis lógarfestur. Í Grønlandi er rætturin at ferðast í náttúruni staðfestur í náttúruverndarlóg teirra frá 2003.[13] Í Danmark verður heitið "almannarættur" ikki brúkt, men reglur eru tó fyri fríari atgongd til náttúruna, eisini til tann partin, sum er privat ogn. Óbeinleiðis ber tí til at siga, at almannarætturin, í øllum førum lutvíst, eisini er lógarfestur í Danmark. Í Finnlandi og í Svøríki er støðan øðrvísi, eftirsum almannarætturin ikki beinleiðis er skipaður í lóg, men hinvegin kann sigast at vera grundaður á siðvenju[14]. Í Svøríki er "allemandsretten" nevndur í grundlógini, men ongin sjálvstøðug lóg lýsir nærri, hvørji rættindi og skyldur fylgja við hesum rætti. Tað grundleggjandi í almannarættinum, nevniliga at øll hava rætt til at ferðast í náttúruni, gongur langt aftur í tíðina og tí verður oftast víst til "sedvanan". Men tað er ikki greitt, hvussu hesin rættur ítøkiliga skal skilmarkast og hvar markið gongur. Tí er ofta lívligt kjak um fyribrigdið í Svøríki.

---

*13 § 39 í lógini er soljóðandi: Alle har adgang til at færdes og opholde sig i naturen. Stk. 2. Stk 1 gælder ikke for områder, hvor der i fredningsbestemmelser eller på anden måde er fastsat begrænsninger for almenhedens adgang til færdsel og ophold. Skt. 3. Alle, der færdes eller opholder sig i naturen, skal optræde hensynsfuldt og med omtanke for naturens værdier. Stk 4. Der må ikke ske forurening i naturen i form af bemaling af klipper eller lignende. Stk. 5. Landsstyret kan fastsætte regler om adgang til færdsel og ophold i naturen, herunder regler om anvendelse af motoriserede befordringsmidler. Stk. 6. Landsstyret kan fastsætte regler om, at arrangører af ture har pligt til at anvende guider med kendskab til den grønladnske natur og lovgivning om beskyttelse af naturen, i forbindelse med gennemfærelse af turistarrangementer.*

*14 Sí frágreiðing frá Norðurlandaráðnum frá 2014: "samspil mellem jordejere og friluftsliv": http://www.norden-ilibrary.org/agriculture-and-food/samspil-mellem-jordejere-og-friluftsliv_tn2007-592*

Uttan mun til, um støði verður tikið í privata ognarrættinum ella meginreglum um almannarætt, er privati ognarrætturin vardur. Í teimum førum almenningurin hevur rætt at ferðast á privatari jørð, er tað aleina talan um "óskaðiliga" nýtslu, t.e. nýtsla sum ikki hevur við sær týðandi vansar fyri privata eigaran. Sbrt. áðurnevndu frágreiðing tykist vera rímiligt samsvar millum lóggávuna í ymsu londunum um, hvussu "óskaðilig nýtsla" verður skilmarkað. Vanliga fevnir almannarætturin einans um rættin at ferðast (til gongu ella við súkklu) í náttúruni og rættin at uppihalda sær í økinum í avmarkaða tíð og við passandi frástøðu frá bygdum øki. Somuleiðis er mark fyri, hvussu almenningurin kann útnytta tilfeingið í hesum økjum. "Óskaðilig" ferðsla fevnir sjálvsagt ikki um rættin til atburð, ið kann hava við sær búskaparligan miss fyri eigaran.[15]

### *3.3.2 Er almannarætturin galdandi í Føroyum?*

Tá vit so tosa um rættin hjá almenninginum at ferðast í føroysku náttúruni, gerst tað sera viðkomandi at staðfesta, hvørjar treytir í roynd og veru gera seg galdandi í Føroyum. Hvat er samspælið millum rættin at ferðast í náttúruni og privata ognarrættin? Talan er um grundleggjandi spurning av prinsipiellum týdningi, sum eisini hevur avgerandi týdning fyri teir karmar, ferðavinnan hevur at virka undir í Føroyum og hvussu hon framhaldandi kann mennast. Tí er tað viðkomandi at viðgera hendan spurning í hesum sambandi.

Orsøkin er heilt einfalt, tá vit tosa um ferðavinnuna, at náttúran í hesum sambandi er at sammeta við fiskatilfeingið í sjónum. Tilfeingið sum er grundarlagið undir eini vinnu. Og hvør hevur rættin at seta treytir og reglur í mun til hetta tilfeingi? Hvør hevur rætt at krevja pening inn og á hvønn hátt? Hvør hevur í grundini ræðisrættin á hesum tilfeingi? Spurningurin er, um tað eru privatu jarðareigararnir, ið við støði í ognarrættinum hava hendan rætt ella um almenningurin hevur rættindi, ið ganga framum ognarrættindini. Vanliga er tað ein samanrenning av hesum báðum rættindum, ið ger seg galdandi, sum nevnt omanfyri.

Í Føroyum er almannarætturin ikki staðfestur við lóg. Hinvegin eru lógarásetingar, ið skilmarka, hvussu lendisumsitingin skal skipast við atliti at jarðarbrúki, fugleveiðu, strandarætti o.ø. Gamla lógarverkið snýr seg fyrst og fremst um, hvussu viðurskiftini skulu skipast millum teirra, sum við ogn ella festi hava rætt til at lata húsdjór síni (serliga seyð og neyt) ganga á beiti í lendinum. Lóggávan, ið stavar frá eini heilt aðrari tíð (1930'unum), tekur als ikki hædd fyri ferðavinnuvirksemi ella vaksandi frítíðarvirksemi og tað er ein avbjóðing at nýta galdandi lóggávu sum grundarlag undir niðurstøðum um, hvørjar treytir gera seg galdandi í mun til ferðavinnu og annað "rekreativt" virksemi hjá almenninginum í náttúruni.

Eftir at arbeiðsbólkurin hevur kannað viðurskiftini nærri, og spurt seg fyri hjá fleiri løgfrøðingum og hjá fleiri almennum stovnum, er tað vorðið greitt, at tað ikki er semja um, hvussu føroyska lóggávan eigur at verða tulkað. Fólk eru rætt og slætt ymisk á máli um, hvørt almannarættindi kunnu sigast at vera galdandi í Føroyum ella ikki.

Í bókini "Ein føroysk bygd" frá 1968 eftir Poul Petersen, løgfrøðingi og sála, hevur rithøvundurin granskað í gomlum norðurlendskum rætti. Undir partinum "Bygdarættindir" viðger hann tað hann nevnir "almenningsrættindir".

P. Petersen skrivar m.a. soleiðis:

"Almenningur  og feli eru hvørt sítt. Í jarðfela liggur jørðin saman í eigindómi – í teigalendi, í bø, í haga, og í lunnindum. Lunnindir eru at skilja sum felarættindir, sum ligga til eigindómin ella markatalið sum jarðarhvalur, landpartur m.a. av fugli, nótakasti, tari o.t. Almenningsrættindir eru rættindir av ymiskum slag og ymiskum innihaldi sum liggja til bygdina. Tey eru snævur, men innanfyri síni mørk ganga tey framum

*15 Á sama hátt er staðfest í altjóða fólkarætti, at øll skip hava rætt til "óskaðiliga" sigling á heimsins høvum. Eitt slag av almannarætti er altso eisini galdandi á sjónum, tó at tað eisini eru avmarkingar í hesum rætti, m.a. tá skip koma inn á sjóumveldið hjá einum landi. Í FO er hetta markið 12 fjórðingar úr landi. Við støði í fólkarættinum kann eitt sjónarmið tí eisini vera, at tað eisini er ella eigur at vera ein almannarættur at ganga í fjøru, bø og haga við fyriliti fyri rætti bóndans at røkka sínum landbúnaðarendamálum á nevndu økjum.*

eigararætindini bæði í lutum og lunnindum sum í heimrust og torvheiðum, í nótakasti o.t. og í bjørgum til hellufugl og omanfleyg."

Hesi rættindir til nýtslu havi eg rópt bygdartindir, tí í mongum førum liggja tey til húsini, eitt nú torv og hellufuglur" [16].

Hesin gamli rættur sæst enn í dag aftur í skrivaðum (lóggávu) og óskrivaðum rætti (m.a. praksis) í øllum norðurlondum, eisini í Føroyum, og P. Petersen staðfestir eisini í frágreiðing síni, at "almenningsrættindi ganga aftur í fyrndarrættin her sum aðrastaðnis." Og at hesi rættindi ganga fram um eigararættindini.[17]

Tí ber til at grundgeva fyri, m.a. grundað á oman fyri standandi, at tað í føroyskum rætti eins og í hinum norðurlondunum er galdandi ein meginregla (eitt prinsipp) um:

- at ognarrætturin hjá jarðareigarum kann avmarkast av almannarættindum,
- at hesi rættindini eru av ymiskum slag og ymiskum innihaldi,
- at rættindini kunna liggja til ávísar bólkar av fólki, t.d. tey, sum eru búsett í bygdini ella alt fólkið í landinum ella ein og hvønn, sum er í landinum.

Føroyska lóggávan á økinum er gomul og eru tað nógvar ásetingar í bæði hagalógini og í girðingarlógini, ið byggja á siðbundið jarðarhald, t.d. torvskering o.a. sum ongan praktiskan týdning hevur longur. Spurnartekin kann til dømis eisini setast við, hvønn týdning ásetingin hevur í § 41 í girðingarlógini um, at tann sum fer í hagan uttan heimild (loyvi), kann revsast við bót[18], tá vit í dag kunnu staðfesta, at tað er vanlig praksis at fara sær ein túr í hagan, uttan at spyrja um loyvi. Tað vanliga er ivaleyst at spyrja um loyvi ella boða bóndanum frá, snýr tað seg um skipaðar túrar, har ein størri bólkur fer avstað, t.d. við ferðaleiðara. Tá reisir spurningurin seg, hvørt hevd kann sigast at vera vunnin í mun til rættin hjá almenninginum at ferðast í náttúruni?

Hetta eru spurningar, sum vit ikki kunnu svara í hesum sambandi, eftirsum tað krevur meiri umfevnandi kanningararbeiði og røttu servitan um hesi viðurskifti. Arbeiðsbólkurin metir tó, at tað er týdningarmikið at byrja kjakið um hesi viðurskifti, sum vit meta koma at fáa alsamt størri týdning sum frá líður.

Arbeiðsbólkurin metir, at stórur tørvur er á greiðum reglum fyri, hvørji rættindi og skyldur bøndur hava, tá tað snýr seg um gongd í haga, hvørjar mannagongdir eiga at verða fylgdar, tá tað snýr seg um fyriskipan av gongutúrum í ferðavinnuhøpi, umframt at tað er neyðugt at gera vegleiðingar um, hvussu ferðasmiðir, ferðafólk, bøndur og fólk annars eiga at bera seg at, tá gingið verður í haganum. Hava vit ikki einsháttaðar reglur og treytir á hesum økinum, er vandin at jarðareigarar hvør í sínum lagi seta egnar avmarkingar fyri ferðsluna á "teirra" jørð og at viðurskiftini á tann hátt verða alsamt meiri óskipað og tilvildarlig.

Umframt atliti at náttúruni, er eisini neyðugt at taka atlit at trygd og ynskja bøndur sjálvsagt eisini meiri skipað viðurskifti, so hvørt ferðslan í høgum og fjøllum veksur. Tí er tað týdningarmikið, at gongd í haganum verður betur skipað, t.d. hvar og nær fólk kunnu ganga og hvar og nær ferðaleiðari skal vera við.

---

*16 Petersen, Poul: "Ein Føroysk bygd", egið forlag, Tórshavn 1968, s. 74 ff.*

*17 Petersen, Poul: Ein føroysk bygd, s. 80*

*18 T.e. Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 fra 17. mars 1951.*

*§ 41 er soljóðandi: "Den, som, uden at dertil er Hjemmel, gaar uden for ret Bygdevej i Hauge, hvor han ikke er Lodsejer, eller i Fælleshauge, for hvilken Vedtægt om Lodsejernes Færdsel er oprettet paa Haugestævne under Sysselmandens Ledelse (jfr. Haugelovens § 3), straffes med Bøder; gaar han ulovlig med Hund, betragtes dette som en skærpende Omstændighed."*

Tað er neyðugt at byrja kjakið um hesi viðurskifti í góðari tíð, áðrenn møguligar óhepnar siðvenjur taka skap og gera tað verri at fáa í lag skipað viðurskifti í mun til ferðsluna í føroysku náttúruni. Gera vit ikki tað, er vandi fyri, at vit í Føroyum fara at fáa sama stríð, sum vit síggja aðrastaðni millum mótstríðandi áhugamál, tá tað snýr seg um atgongdina til náttúruna og nýtsluna av lendinum.

Tað verður sjálvsagt trupult og drúgt greitt at staðfesta, hvar mørkini fyri ognarrættinum skulu ganga í mun til almannarættin. Tað, sum er umráðandi at staðfesta í hesum sambandi er, at tað í føroyskum rætti eins og í hinum norðurlondunum, sum nevnt, er galdandi ein meginregla um, at ognarrætturin hjá jarðareigarum *kann* avmarkast av almannarættindum.

Í Noregi er rætturin hjá almenninginum at ferðast og vera í náttúruni skipaður í lov om friluftslivet (friluftsloven). Um endamálið við lógini er í § 1 ásett.:

*"Formålet med denne loven er å verne friluftslivets naturgrunnlag og sikre almenhetens rett til ferdsel, opphold m.v. i naturen, slik at muligheten til å utøve friluftsliv som en helsefremmende, trivselskapende og miljøvennlig fritidsaktivitet bevares og fremmes."*

Arbeiðsbólkurin metir, at norska (ella grønlendska) lóggávan á økinum kann brúkast sum leistur fyri, hvussu vit skipa frítíðarvirksemi í føroysku náttúruni.

Lov om friluftslivet (friluftsloven) hoyrir í Noregi undir Klima- og Miljødepartementet; í Danmark í lov om naturbeskyttelse, sum hoyrir undir Miljø- og Fødevaraministeriet. Í Føroyum hevði verið nátúrligt, at slík nýggj lóggáva verður skipað undir málsræði Heilsu- og innlendismálaráðsins, sum varðar av náttúru og umhvørvi sum málsøki.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at lóggáva verður sett í verk, sum nærri løgskipar hesi viðurskiftini, tá tað snýr seg um rættin at ferðast í náttúruni. Lóggávan skal vera í samsvari við omanfyrinevndu meginreglu um almannarætt, samstundis sum hædd verður tikin fyri rætti jarðareigarans at reka landbúnað.

Sum grundarlag undir slíkari lóggávu, eigur kanningararbeiði fyrst at verða gjørt, sum útgreinar oman fyri nevndu viðurskifti nærri. Mælt verður til, at ein arbeiðsbólkur undir leiðslu av HIMR verður settur at orða tilmæli til landsstýrið um, hvussu ein nýggj lóg um frítíðarvirksemi kann verða skipað. Í sambandi við hetta kanningararbeiði eiga bøndur, kommunur, ferðavinnan og landsmyndugleikar at vera tikin við upp á ráð.

*Ábyrgd:* HIMR

*Tíðarætlan:* primo 2018

### *3.3.3 Gjald fyri at ganga í haganum*

Í skrivi til UVMR gera Búnaðarstovan, Bóndafelagið og Óðalsfelagið mun á ferðslu í náttúruni, sum stendst av vinnuligum virksemi (t.e. fyriskipað ferðavinnuvirksemi) og rættinum hjá hinum einstaka føroyinginum at ganga túrar í haganum. Bóndafelagið, Óðalsfelagið og Búnaðarstovan siga í hesum sambandi, at "tey, ið eiga lendi ella varða av hesum og av jarðarrættinum – tað vil siga Jarðirnar, skulu hava sín lutfalsliga ágóða av teimum inntøkum frá ferðavinnuni, ið stava frá atgongd og uppihaldi, eins og aðrari nýtslu, á hesum jarðum. Búnaðarstovan, Óðalsfelagið og Bóndafelag Føroya halda tað verða náttúrligt at taka dagar ímillum

eitt nú privatar túrar hjá heimafólki (t.d. ein einstaklingur, ein føroysk familja ella ein føroyskur skúla- ella skótaflokkur), og so fyriskipaða ferðavinnu, har sum peningaligur vinningur fyri eyga er uppi í (t.d. við útlendskum ferðafólki ella við føroyskum ferðalagi)."

Arbeiðsbólkurin tekur undir við, at tað er neyðugt at gera mun á vinnuligum virksemi í náttúruni og øðrum frítíðarvirksemi. Somuleiðis tekur bólkurin undir við, at tað er natúrligt, at jarðareigararnir fáa ein part av teimum inntøkum, sum stava frá hesum vinnuliga virksemi.

Í sambandi við oman fyri nevnda kanningararbeiði, sum vit mæla til verður sett í verk, er tó eisini neyðugt at spyrja, um treytir ikki eiga at fylgja við hesum nýggja inntøkugrundarlagi? Um bøndurnir nú fáa eina munagóða inntøku frá ferðavinnuvirksemi á teirra jørð, eiga teir so eisini ábyrgdina av at tryggja, at atkomuviðurskifti, gøtur o.a. eru í lagi? Ein møguleiki kann t.d. eisini vera, at kommunan fær part av inntøkuni frá ferðavinnuvirkseminum og aftur fyri átekur sær skylduna at skelta og at halda gøtur o.a. viðlíka.

Sum støðan er í dag, hevur festarin, bæði sambært lóg og festibrævinum, brúksrætt á lendinum, og tí eigur ferðavinnufyriskiparin í útgangsstøðinum at gera avtalu við festaran, hvørt ferðavinnan móti gjaldi kann virka í økinum. Hetta er á avtalurættarligum grundarlagi. Um so er, at festarin noktar, so er útgangsstøðið sambært galdandi lóggávu, at fyriskipað ferðavinnuvirksemi ikki kann fara fram í økinum. Sum nevnt omanfyri, eru tó fleiri ivamál knýtt á hesum spurningi, sum neyðugt er at fáa greiðu á.

Ein skipan sum tó kann verða nýtt, og sum er ein meiri skipað tilgongd, er, at ferðavinnan vendir sær til kommununa í avvarðandi øki, fyri at fáa avtalu um lendið til almannagagnligt endamál, sbrt. ll. um landsjørð § 7a. Sambært hesi heimild kann Búnaðarstovan taka lendið frá festara til almannagagnligt endamál, og gera leigusáttmála við kommununa í økinum. Hóast talan er um almannagagnligt endamál, verður sagt í viðmerkingum, at talan kann vera um vinnuligt virksemi ella avleitt vinnuligt virksemi. Tað kundi so verið ferðavinna.

Fyrimunurin við hesum leisti er, at kommunur eru byggi- og planmyndugleiki, og kunnu tí finna skilagóðar loysnir í sambandi við verkætlanir hjá ferðavinnuni í einum ávísum øki. Í serstøkum førum ber eisini til at nýta heimildirnar í friðingarlóggávuni, er talan t.d. um eitt øki við viðkvæmari og friðingarverdari náttúru ella djóralívi. Hesin møguleiki verður eisini umrøddur í kap. 6 um Mykines.

Tá tikið verður saman um, metir Búnaðarstovan, at besti leisturin, tá ið umræður ræðisrætt og gjøld fyri lendið, er, at hesin rættur verður staðfestur í lóg, soleiðis at heimildin at krevja inn gjøld og seta avmarkingar greitt, verður staðfest í lóg. Og ikki sum í dag, at tað er neyðugt at tulka orðingar í galdandi lóggávu, sum onki beinleiðis siga um hetta ella at leita í viðmerkingum til lóggávuna, har tað heldur ikki verður tikið atlit at teimum spurningum og avbjóðingum, sum ferðavinnan reisir.

Vísandi til áðurnevndu norsku lógina um friluftsliv, er tað í § 14 ásett:

*"§ 14.(Avgift for adgang til friluftsområde)*

*Ferdselsrett etter denne lov er ikke til hinder for at eier eller bruker etter løyve av kommunen kan kreve en rimelig avgift for adgangen til badestrand, teltplass eller annet opparbeidet friluftsområde, men avgiften må ikke stå i misforhold til de tiltak eier eller bruker har gjort på området til fordel for friluftsfolket. Det kan settes vilkår for slikt løyve."*

Norska lóggávan kann møguliga, eisini tá tað kemur til spurningin um gjald, brúkast sum leistur fyri eini møguligari føroyskari lóggávu á økinum.

Mælt verður til, at oman fyri nevnda kanningararbeiði, sum skal vera grundarlag undir eini nýggjari lóggávu um frítíðarvirksemi í náttúruni, eisini viðger spurningin um gjøld og orðar tilmæli um, hvussu hetta kann skipast í lóg.

### *3.3.4 Bygda- og varðagøtur*

Tað eru aðrar reglur galdandi fyri varða- ella bygdagøtur, enn fyri restina av jørðini. Á hesum leiðum er tað greitt, at tað er frítt hjá einum og hvørjum at ganga, uttan at biðja um loyvi ella at rinda.

At ganga túrar eftir bygdagøtum er sjálvsagt ein frálíkur máti hjá ferðafólki at uppliva føroyskt landslag og náttúru. Trupulleikin er, at gøturnar ikki altíð eru so væl viðlíkahildnar. Varðar kunnu vera niðurdotnir og nógvar gøtur eru torførar at finna, kanska tí gøtan verður lítið gingin. Aðrar eru í ringum standi og knortlutar at ganga, tí at strekkir á leiðini eru illa farin. Illa ber til at bjóða ferðafólki at ganga slíkar gøtur. Vantandi skelting er eisini ein trupulleiki.

Ein háttur at spjaða trýstið á mest brúktu bygda- og varðagøturnar (td millum Havnina og Kirkjubø og út í Mykineshólm), og fyri at byrja arbeiðið at skipa viðurskiftini, er at gera "ferðagøtur" kring landið. Kommunur, í samstarvi við hagastýri, menningardeildina hjá VFI og øðrum viðkomandi pørtum, eiga at fara undir at sjónliggera verandi bygda- og varðagøtur og at gera ferðagøtur.

Í einum slíkum samstarvi kundi kommunan tikið sær av:

- at upptekna GPS gøtur inn á kort/appar e.l. eftir alment góðkendum leisti, gjarna í samráð við ferðavinnukønan, náttúrukønan og festara ella lendiseigara
- at uppmerkja gøtuna, um neyðugt. Altíð merkja sum minst, og bara tað, sum er neyðugt, tí best er at varðveita náttúruna so órørda av mannahond, sum til ber
- at seta skelti upp í bygdini og har gøtan byrjar

Kunningarstovan, sum hoyrir til kommununa, kunnar ferðafólk í økinum um gøturnar.

Kommunur og menningardeildin á VFI eiga at hava eitt samlað talgilt yvirlit yvir allar gøtur og túrar, t.d. á einari heimasíðu, sum so verður dagførd og útbygd, so hvørt avtala verður gjørd um fleiri túrar í høgum kring landið. Henda heimasíða eigur at innihalda alla viðkomandi kunning um gongd í haga, herundir upplýsingar um, hvørji atlit ferðafólk skulu taka til náttúru, veður og til persónliga trygd. Eisini kann heimasíðan upplýsa, hvar ein skal venda sær fyri at fáa loyvi at ganga, har slíkt er krav, hvørjir ferðasmiðir bjóða seg fram til ymsar túrar o.m.a. [19]

*19 Ein heimasíða "hiking.fo" er júst framleidd og kann brúkast sum útgangsstøði til hetta endamál.*

Kommunur, menningardeildin hjá VFI og aðrir viðkomandi partar eiga at taka stig til at seta í stand verandi bygda- og varðagøtur umframt at gera nýggjar “ferðagøtur” kring landið.

Kommunur og menningardeildin hjá VFI skulu hava eitt samlað talgilt yvirlit (td serstaka heimasíðu) yvir allar gøtur og túrar umframt við almennari kunning um atlit til trygd og náttúru í sambandi við gongd í haga.

Kommunur eiga at átaka sær at upptekna og uppmerkja gøturnar.

VFI, kommunur, kunningarstovur og ferðasmiðir hava ábyrgd av at tryggja, at ferðafólk í so stóran mun sum til ber fáa neyðuga kunning um tað at ferðast í føroysku náttúruni. Undir hesum er týðandi, at kunnað verður um váðar og trygdaratlit við at ferðast í føroysku náttúruni, soleiðis at byrgt verður upp fyri, at óhapp og vandastøður íkoma.

*Ábyrgd:* Kommunurnar (í samstarvi við fleiri partar)

*Tíðarætlan:* 2018 – 2020

# Kap 4. Mentanartilboð og førleikar

## 4.1 Førleikamenning

At støði á upplivingunum hjá ferðafólki er høgt og dygdargott, hevur stóran týdning fyri, hvussu væleydnað heildarfatanin er av Føroyum sum ferðamáli. Tað er alt frá tænastuni umborð á flogfari, bussum, hýruvognum, ferðaskrivstovum, matstovum o.s.fr., til mentanararvin, matin, siglitúrin, ferðaleiðaran, gistingarhúsið, vegir og infrakervi o.s.fr.

Fleiri ymsar útbúgvingar og skeið hava týdning fyri, at støðið og góðskan á upplivingini hjá ferðafólkinum er so høg sum gjørligt. Tað eru fyrst og fremst útbúgvingar sum ferðaleiðari, náttúruvegleiðari og innan tænastuyrkið við ferðavinnu og tænastu í fokus, ið eru neyðugar at hava í Føroyum.

### *4.1.1 Ferðaleiðaraútbúgving*

Tað er stórur tørvur á fleiri ferðaleiðarum við góðum førleikum. Í vinnuni er semja um, at tað er alneyðugt at fáa lagt skeið fyri ferðaleiðarar í fasta legu og at skipa hetta sum eina veruliga útbúgving. Tað finst ein góðkend ferðaleiðaraútbúgving, løgtingslóg nr 22 frá 2004 um yrkisskeið og kunngerð 18. jan 2007 um yrkisskeið nr. 1/06, heitið er ferðaleiðari. Hetta skeið er góðkent av yrkisútbúgvingarráðnum og Skeiðsdepilin hjá Glasi hevur staðið fyri tí (uml 140 tímar bæði praktiskt og teoretiskt yvir ein vetur). Tá ið heitið er skeið, skal vinnan ella tann einstaki sjálv/ur fíggja tað, men sum skilst, vantar lítið í hesi skeiðsrøð til, at hon kann kallast ein útbúgving. Og tá talan er um útbúgving, skal tað almenna lata pengar fylgja við.

Í 2012 var eitt slíkt skeið hildið eftir hesari lóg, har ferðaleiðarar blivu góðkendir (autoriseraðir) til at arbeiða sum ferðaleiðari í Føroyum. Hesi skeið vóru sera kostnaðarmikil fyri tann einstaka, serliga tá hugsað verður um, at eingin trygd er fyri, at ferðaleiðarin fær arbeiði aftaná. Starvið sum ferðaleiðari er eyðsæð sera týðandi; hesir eru okkara fremstu sendifólk og í mongum førum eru ferðaleiðararnir nærum einasta samband, sum ferðafólk (serliga frá ferðafólkaskipum) hava við føroyingar. Tí er tað neyðugt at skipa ferðaleiðaraútbúgvingina sum eina fasta útbúgving, td. 3. hvørt ár ella eftir tørvi, í samstarvi millum Yrkisráðið, handilsskúlar og vinnuna. Tað kundi t.d. verið gjørt soleiðis, at einstøk skeið verða boðin út á hvørjum ári, sum geva ávíst stigatal, og tá ávíst stigatal er rokkið, fæst prógv uppá, at ein er góðkendur ferðaleiðari. Tað er týðandi, at útbúgvingin lýkur altjóða krøv. Tað er eisini neyðugt, at tað, ið restar í til at talan er um heila útbúgving, verður lagt afturat, so tað ikki er so dýrt fyri tann einstaka, ið vil fara undir útbúgvingina.

Tað er avgerandi, at ein ferðaleiðaraútbúgving kann takast í Føroyum. Ferðaleiðarin skal kunna greiða frá føroyskum viðurskiftum - alt frá søgu, samfelagi, politikki, orku, náttúru, jarðfrøði o.ø. Umframt hesar førleikar, er neyðugt við grundleggjandi førleikum, eitt nú at læra mikrofonteknikk og at taka árligt fyrstuhjálparaskeið. Somuleiðis er týdningarmikið, at ferðaleiðarar, ið ganga túrar í náttúruni, hava serliga góða vitan um náttúruna, sum jú er høvuðsorsøkin til, at fólk leita sær hendanvegin. At vera ferðaleiðari er og verður ikki nakað vart heiti, men tey, ið hava góðkenda útbúgving, áttu at havt ein kappingarfyrimun, tí tey kunnu brúka tað í síni marknaðarføring, sum eitt eyka góðskustempul.

Í løtuni situr ein arbeiðsbólkur, ið skal gera uppskot til eina ferðavinnuútbúgving, ið skal verða staðsett í Miðnámi í Vestmanna.

Mentamálaráðið/Yrkisdepilin skal saman við viðkomandi skúlum skipa so fyri, at tað regluliga og eftir tørvi verða boðin ferðaleiðaraskeið fram, ið geva stig, soleiðis at ein eftir ávíst tal av skeiðum fær heiti og autorisatión sum ferðaleiðari. Formliga skal talan vera um eina útbúgving, (ið er bygd upp við modulum). Útbúgvingin skal lúka altjóða krøv.

MMR/Yrkisdepilin skal skipa hetta saman við Ferðaleiðarafelagnum og viðkomandi miðnáms/yrkisskúlum.

*Ábyrgd:* MMR/Yrkisdepilin

Tíðarætlan: 2017-2018

### *4.1.2 Aðrar útbúgvingar innan tænastuyrki*

Tað er eisini neyðugt at bjóða útbúgvingar og skeið til starvsfólk á hotellum, matstovum, ferðaskrivstovum og øðrum líknandi støðum, ið hava við ferðafólk at gera.

Føroysk matmentan og gastronomi hava ment seg nógv seinastu árini. Michelin-stjørnan hjá Koks í 2017 er kanska mest ítøkiliga prógv um teir menningarmøguleikar, sum liggja í føroyskari matmentan. Matur og mentan eru týðandi tættir innan ferðavinnuna og eru hetta menningar-møguleikar ið vit eiga at troyta, soleiðis at matstovuvinnan, í størri mun enn í dag, gerst ein atdráttarmegi hjá útlendskum ferðandi.

Tað er vinnan sjálv, ið mennir hugskotini og setir í verk nýggj tilboð innan matvinnuna. Almennu Føroyar skulu stuðla hesi menning, við at veita dygdargóð útbúgvingartilboð innan matstovuvinnuna. Samstundis skal arbeiðast víðari við at menna eitt granskingarumhvørvi kring føroyska matmentan, soleiðis at vit fáa betri vitan og førleikar innan føroyska gastronomi, samstundis sum nýggj fólk verða kveikt til at fáast við virksemi innan hesa vinnu. Millum annað eiga stuðulsskipanir, í størri mun enn í dag, at gera tað gjørligt at fáa pening til eksperimenterandi matverkætlanir við føroyskum rávørum.

Eingin tænaraskúli er í Føroyum, og sum skilst, er ikki nakar tørvur í løtuni á hesum tilboði. Vinnan heldur, at kokkaskúlin á Tekniska skúla í Klaksvík er eitt gott útgangsstøði og virkar væl sum grundútbúgving innan yrkið. Ymiskt bendir á, at samstarvið millum skúlan og vinnuna kann styrkjast, soleiðis at næmingar og vinnulív fáa størri ágóða av hvørjum øðrum. Flest øll eru tó samd um, at tað er gott og neyðugt, at kokkalærlingar eisini framhaldandi taka ein part av útbúgving síni uttanlands, fyri at fáa íblástur og royndir frá einum altjóða umhvørvi.

Yrkisútbúgvingarráðið hevur góðkent eina 4 ára skrivstovuútbúgving við sergrein í ferðavinnu (tvey ár hjá teimum, ið hava miðnámsútbúgving). Hetta er gjørt í samstarvi við danskan skúla, har bókligi parturin verður tikin, meðan praktikktíðin verður tikin í Føroyum. Glasir hevur eisini eina skrivstovuútbúgving innan ferðavinnu í samstarvi við danskan skúla, ein sokallað rejsebureau uddannelse. Omanfyri nevndu útbúgvingar eru tær somu. Í hesum útbúgvingum er nógv fokus á at selja outgoing (tað vil siga at selja ferðir út í heim) og sera lítið fokus á innkomandi ferðavinnu (at selja útlendingum ferðir til Føroya). Okkum tørvar eina ferðavinnuútbúgving, ið kann byggjast upp á eina lærlingaútbúgving. Harvið hevði borið til hjá vinnuni at ment starvsfólk og hildið fast í teimum. Ferðavinnan er ein vinna, har tú arbeiðir teg upp eftir og leggur afturat tínari útbúgving.

Mentamálaráðið og handilsskúlarnir eiga at fyrireika og bjóða ferðavinnulærugreinar út á t.d. búskaparleiðini. Hetta hevði uttan iva havt áhuga millum tey ungu, og kundi kveikt áhugan fyri íverksetan innan ferðavinnuna.

Tað er eisini tørvur á grundleggjandi skeiðum, ið eru praktisk og tænasturættað. Hetta skulu verða styttri skeið, ið geva eitt diplom í tænastu innan ferðavinnu. Hesi skeið skulu verða til øll, ið meta seg fáa gagn av hesum í vinnuni. Eitt nú: bussførarar, tænarar, hýruvognsførarar, móttøkufólk o.a.

Í løtuni situr ein arbeiðsbólkur og greinar, hvussu ein ferðavinnuútbúgving á Miðnámi í Vestmanna skal síggja út.

Ein "Service Økonom" útbúgving eigur at vera skipað í samstarvi við yrkisskúla, tvs ein eitt- ella tvey-ára ferðavinnuútbúgving, ið kann byggjast oman á t.d. skrivstovuútbugving ella miðnám.

Neyðugt er somuleiðis at skipa fyri einum tænastuskeiði, møguliga eina ferð um árið, ið endar við, at fólk fáa eitt diplom í tænastu innan ferðavinnu. Eisini í samstarvi við viðkomandi yrkisskúla.

At enda eiga lærugreinar innan ferðavinnu at verða bodnar út á miðnámsstøði.

*Ábyrgd:* MMR/Yrkisdepilin

*Tíðarætlan:* 2018-2020

#### *4.1.3 Gransking og hægri útbúgvingar*

Fyri at menna ferðavinnuna, mugu vit savna og framleiða vitan um hesa vinnu. Vit eiga at síggja vinnuna sum eitt fakøki, ið fevnir um nógvar ymsar tættir - innan mentan, mat, náttúru, jarðfrøði, burðardygd o.s.fr. Hetta fakøkið eigur at lyftast upp á eitt hægri støði, har vit stremba eftir at lýsa tey mongu hugtøkini og serøkini, ið hava greið markamót til ferðavinnuna. Til dømis vist-ferðavinna (eco-tourism), geo-parkir, tjóðgarðar, Ramsar, UNESCO økir o.s.fr. Og okkum tørvar eisini vitan um, hvørja støðu føroyingar hava til ferðavinnu og hvørji eru ferðafólkini, ið koma hendaveg, hvørji ynski hava tey og hvussu síggja tey okkum. Hesa vitan kunnu vit brúka til so mangt, m.a. til at menna ferðavinnuna í tráð við, hvat ferðafólk og vit sjálv ynskja. Tí er neyðugt, at Setrið og granskingarstovnar seta sær fyri at granska og framleiða vitan um hesa vinnu. Harumframt eigur Setrið at arbeiða fram ímóti at bjóða fram útbúgvingar og skeið innan økir, ið gagna ferðavinnuni.

Ávís upphædd eigur at verða sett av til gransking í ferðavinnu. Granskingarráðið og Setrið eiga at raðfesta arbeiðið, við at framleiða vitan um ferðavinnu í breiðum týdningi.

Setrið eigur at seta skeið og útbúgvingar saman, ið kunnu lyfta ferðavinnuna upp á hægri støði.

*Ábyrgd:* MMR/Fróðskaparsetrið/Granskingarráðið

*Tíðarætlan:* 2018-2020

### *5.1.4 Myndugleikagóðkenning / Løggilding*

Summir ferðasmiðir, ið bjóða ymsar serligar upplivingar, t.d. klintring, síging, sigling við skjóttgangandi bátum o.s.fr. hava víst á tørvin og ynskja, at onkur myndugleiki góðkennir teirra virksemi. Bæði út frá einum sjónarmiði um trygd og heilsuvandar, men eisini út frá einum ynski um at fáa eitt góðskustempul, sum kann brúkast í marknaðarføringini av teimum ymsu tilboðunum.

Tað verður neyðugt at fara undir eitt greiningararbeiði viðvíkjandi góðkenning av hesum slagi av ferðatilboði. Í hesum liggur, at tað er neyðugt at greina, hvørji tilboð skulu hava krav um okkurt slag av myndugleikagóðkenning til at virka og hvørji kunnu velja at fáa eina myndugleikagóðkenning. Støða skal eisini takast til, um tað er ferðasmiðurin, tilboðið sjálvt ella bæði, ið skulu hava eina løggilding til virksemið. Greiningin skal eisini taka støðu til, hvør myndugleiki skal standa fyri einari møguligari autorisatiónsskipan.

Hetta er stórt, men týðandi arbeiði at fáa gjørt. Íslendska autorisatiónsskipanin Vakinn kann nýtast sum íblástur til hetta arbeiði.

Mælt verður til, at menningardeildin hjá VFI, saman við viðkomandi pørtum, fer undir greiningararbeiðið til tess at koma við nærri tilmæli um, hvussu vit eiga at fara fram, tá tað snýr seg um at seta autorisasjónsskipan í verk umframt hvør myndugleiki skal taka sær av hesum.

*Ábyrgd:* UVMR/VFI

*Tíðarætlan:* 2018-2020

## 4.2 Mentanartilboð

Mong ferðafólk koma her fyrst og fremst fyri at síggja og uppliva náttúruna. Men tey flestu ferðandi hava eisini stóran áhuga í okkara mentanararvi, søgu og søvnum og ynskja góða kunning um søgulig støð, útgrevstir o.a.

Í stuttum ber til at siga, at tað er átrokandi fyri virksemið hjá Søvnum Landsins, at stovnurin fær greiðar reglur og heimildir umframt fíggjarliga orku til at styrkja bygdasøvnini, framsýningar og miðling og sum heild tann partin, sum vendir sær til tann vitjandi. Her krevst neyðugt lógargrundarlag og nøktandi játtan.

Her nevna vit dømi um nøkur áleikandi økir, ið eru neyðug at bøta um, fyri at geva føroyingum eins væl og ferðafólki eina betri uppliving:

### *4.2.1 Fornminnissavnið*

Framsýningin hjá Fornminnissavninum er góð og áhugaverd, men hon liggur ov fjarskotin í mun til miðbýin í Havn og tað er spell, tí tað ger, at mong - føroyingar eins væl og ferðafólk - als ikki koma niðan at vitja framsýningina. Kunningarstovan í Havn fær o.u. 45.000 fólk á gátt árliga, men bara ein brotpartur av hesum koma niðan á savnið í Hoyvík. Ein framsýning skal ikki bara vera ein deyð framsýning, hon skal vera livandi, samvirkin, skiftandi og við fyrilestrum og ymsum tiltøkum um dagin og um kvøldið. Tað besta hevði verið,

um hóskandi hølir vórðu funnin niðri í Havnini, t.d. til partar av framsýningini hjá Fornminnissavninum. Partar av framsýningini kundu verið fluttir oman í miðbýin, t.d. um summarið, so ferðafólk (og føroyingar) lættari finna og vitja hana og harvið høvdu eisini fleiri inntøkur komið inn til savnið.

### *4.2.2. Bygdasøvn*

Tað eru uml. 20 lista- og bygdasøvn kring landið og hesi dúva upp á leikfólk, ofta eldsálir við áhuga fyri økinum. Avbjóðingin við bygdasøvnunum er, at tey flestu hava sjáldan opið og bert eitt ella tvey av bygdasøvnunum kunnu sigast at vera professionell við fakfólki í starvi. Tað hevur stóran týdning at halda fast við ta lokalu ognarkensluna og áhugan, men samstundis er tað neyðugt at styrkja og professionalisera bygdasøvnini, soleiðis at hesi hava opið fastar tíðir og verða áhugaverdari at vitja hjá gestum. Sum nú er, eru Søvn Landsins undirveitari til øll bygdasøvnini, men rættast hevði verið at bygdasøvnini kring landið vórðu samskipað, eins og gjørt verður í t.d. Hetlandi. Á tann hátt hevði Suðuroy t.d. havt ein savnsvørð, ið hevði ábyrgdina av øllum bygdasøvnunum í oynni. Í Íslandi savna nógvar kommunur søvnini saman, t.d. bóka-, náttúru- og skjalasavn á einum stað og harvið gerst møguleiki fyri einari sterkari fakligari fyristing og betri framsýning.

Nóg fólk lesa og hava lisið søgu á Setrinum og hesi hava eina góða útbúgving, sum hevði kunnað verið brúkt í nógv størri mun enn nú. Um bygdasøvnini í størri mun vórðu professionaliserað, hevði tað skapt eftirspurning eftir fleiri høgum útbúgvum kring landið, og á henda hátt styrkt og hjálpt bygdasøvnunum (og útjaðaramenningini). Tað er neyðugt at hugsa í størri eindum, tí sum er, eru viðhvørt fleiri søvn í hvørjari kommunu og tey samstarva ikki tvørturum kommunumark. Við savnsmiðdeplum kring landið, ið høvdu fastsett fakfólk sum savnsleiðarar, høvdu hesir miðdeplar kunnað tikið sær av at gera faldarar og sent tilfar til kunningarstovur o.o. Sum er, vantar Søvnum Landsins orku til at hava eina PR/marknaðardeild.

### *4.2.3 Onnur átøk*

Ein onnur týdningarmikil uppgáva fyri at gera Føroyar áhugaverdar sum ferðamál, er at arbeiða við at fáa Føroyar á listan yvir heimsarv hjá UNESCO. Hetta er ikki bara fyrimunur frá einum ferðavinnu-sjónarmiði, men har liggja nógvir aðrir møguleikar í, m.a. tí at aðalhugsanin handan UNESCO arbeiðið er at fáa tey, ið búgva á staðnum, at taka virknan lut og tað viðførir menning kring landið í síni heild.

Tað er somuleiðis ein landsuppgáva at seta størri játtan av til útgrevstir og fornfrøðiliga gransking. Føroyar hava eina røð av fornminnum, sum ongantíð eru útgrivin og granskað. Hetta eigur at verða raðfest nógv hægri, bæði fyri at styrkja okkara egna mentanartilvit og søguligu fatan og harumframt fyri at geva tí søguáhugaða ferðafólkinum størri vitan og eina betri uppliving.

Aðrar áleikandi uppgávur hjá Mentamálaráðnum og Søvnum Landsins eru m.a. at gera umstøðurnar hjá vitjandi í Kirkjubø betri, at fara undir at tryggja bakkaverjuna við kirkjugarðin í Kirkjubø, at skipa Koltur sum ferðafólkamál, at fáa Hvalastøðina við Áir klára at vísa fram sum livandi savn o.m.a.

Kommunurnar eiga at taka ábyrgd av bygdasøvnunum og samstarva við aðrar bygdir og við Søvn Landsins um størri eindir, har til ber at seta søgufólk í starv, soleiðis at bygdasøvnini kunnu verða opin ávísar, fastar tíðir og framsýningarnar gerast meira áhugaverdar og kunnandi.

Tað er átrokandi at skapa umstøður (lógir og játtan) hjá Søvnum Landsins til at styrkja framsýningarpartin sum heild, herundir bygdasøvn, skelting, faldarar, kunningartilfar og tiltøk o.m.a.

Neyðugt er at fáa partar av framsýningini hjá Fornminnissavninum oman í miðbýin í Havn.

Arbeiðið at fáa Føroyar á listan yvir heimsarv hjá UNESCO eigur at hava høga raðfesting.

Mong onnur átaksøkir undir Søvnum Landsins eiga at verða raðfest, ið høvdu bøtt munandi um upplivingina hjá ferðafólki.

*Ábyrgd:* MMR/kommunur

*Tíðarætlan:* 2018-2020

## Kap. 5 Inntøkumøguleikar frá ferðavinnuni

Tað er eitt aðalmál við ferðavinnuni, at hon skal vera eitt munagott íkast til samfelagsbúskapin og ein nýggj búskaparlig súla at standa á.

Úr einum búskaparligum sjónarhorni eigur málið fyri ferðavinnuna at vera at vaksa um inntøkurnar og at tryggja, at búskaparvøksturin verður lutfalsliga hægri enn vøksturin í talinum av ferðafólkum.

Vit skulu við øðrum orðum fáa ferðafólk at leggja meira pening eftir sær. Hetta krevur fyrst og fremst, at vit hava fleiri tilboð at bjóða fram og at ferðavinnan sum heild verður betur skipað og samskipað. Somuleiðis eigur tað at vera umhugsað, um setast skal inn við politiskum (og privatum) átøkum fyri at røkka hesum máli. Niðanfyri verður hesin spurningur umrøddur nærri.

Sum tað framgongur av hagtølunum í kap. 1.5, er ferðavinnan longu ein týðandi vinnugrein í Føroyum, við einum mettum samlaðum umsetningi á 665 mió kr. um árið. Sambært hagtølunum frá 2015, skapar innkomandi ferðavinnan 470 árseverk. Í 2011 vórðu ársverkini mett at vera 386.

Tað skal tó gerast vart við, at stór óvissa er knýtt at hesum tølum, eftir sum tað er trupult at gera upp neyvt, hvussu nógv virksemi stendst av innkomandi ferðavinnuni fyri seg.

Av tí at ferðavinnan er ein fløkt vinnugrein við nógvum smáum leikarum á marknaðinum, samstundis sum ferðavinnutilboð kunnu vera torfør at skilmarka at hoyra til ferðavinnuna aleina, er torført at gera upp, hvønn búskaparligan týdning ferðavinnan í roynd og veru hevur fyri eitt land.

Í øðrum londum verða tí gjørdar árligar frágreiðingar um búskaparliga týdningin av ferðavinnuni. Tær eru kostnaðarmiklar, men eitt sera neyðugt amboð, fyri at skilja hvønn týdning henda vinna hevur í samlaða búskapinum. Slík vitan er ein fortreyt fyri einum góðum avgerðargrundarlagi, tá politiska skipanin skal taka avgerðir, sum viðvíkja ferðavinnuni.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at slíkar kanningar verða gjørdar í Føroyum regluliga, soleiðis at vit fáa yvirlit yvir veruliga búskaparliga týdningin av ferðavinnuni.

*Ábyrgd:* UVMR/VFI

*Tíðarætlan:* 2019-2022

*Kostnaður:* Uml. 0,5 mió. kr. 5 hvørt ár

Hóast óvissa valdar um búskaparligu viðurskiftini kring ferðavinnuna, so ber til at staðfesta, at ferðavinnan longu er ein búskaparligur ágóði fyri Føroyar og at hesin ágóði veksur ár undan ári. Virðisøkingin innan vinnuna er vaksin úr 165 mió. kr. í 2011 til 235 mió. kr. í 2015, t.e. ein vøkstur á sløk 30 %.

Ferðavinna merkir tó ikki bara inntøkur. Eins og í øðrum vinnum, krevur ein vaksandi vinna, at infrakervið kring vinnuna verður útbygt og at neyðugu íløgurnar verða gjørdar, bæði frá privatari og almennari síðu, soleiðis at vinnan verður so væl skipað sum til ber.

Fyri landið merkir økt ferðavinna, at tað er neyðugt at uppraðfesta og gera íløgur í menningarátøk (sí kap. 2), samstundis sum tað er neyðugt at seta pening av til náttúru- og umhvørvisumsiting og eftirlit (sí kap. 3).

Ferðavinnan er ikki orsøk til, at tað er neyðugt við øktari umsiting á hesum økinum, tað áttu vit at raðfest hægri undir øllum umstøðum. Tó hevur ferðavinnan tann eginleika, at hon setur sjóneykuna á náttúruna og í størri mun enn áður ger okkum varug við, hvussu viðbrekin náttúran í roynd og veru er. Fyrimunurin við ferðavinnuni er tí, at hon skapar uppmerksemi kring umhvørvis-, djóra- og náttúruvernd, samstundis sum ferðavinnan skapar møguleika fyri at fáa inntøkur til vega, til tess at gera nakað við avbjóðingina. Tað er fyrst og fremst náttúruna vit selja og liva av í Føroyum og tí eiga allir partar at hava ein áhuga í, at peningur verður fingin til vega at verja og varðveita hetta tilfeingi. Hetta er ein fortreyt, ið er neyðug at fáa upp á pláss, um vit vilja hava eina burðardygga ferðavinnu í Føroyum. Í kap. 4 vísa vit á, hvat vit meta skal til fyri at hava eina dygdargóða umsiting og verju av náttúru og umhvørvi.

Afturat útreiðslum til menningarátøk, infrakervi og náttúruvernd, vísa royndir frá grannalondum okkara somuleiðis, at stórar útreiðslur eru knýttar at øktari tilbúgving og bjargingarátøkum, tá ferðafólk koma í óføri í náttúruni. Royndirnar frá 2016, har  dømir vóru um, at útlendsk ferðafólk komu illa fyri í fjøllunum, hava givið eina ábending um, at hetta somuleiðis verður galdandi í Føroyum og at tað verður neyðugt at útbyggja og menna føroyska tilbúgving, soleiðis at hon kann fylgja við økta tørvinum, sum ferðavinnan hevur við sær.

Samanumtikið er sostatt neyðugt at gera vart við, at ein vaksandi ferðavinna leggur alsamt størri skyldur og ábyrgd á landið; skyldur og ábyrgd, sum kosta pening. Spurningurin er so, hvør eigur at rinda útreiðslurnar av eini vaksandi ferðavinnu, og hvussu hesar skulu fíggjast. Hetta eru spurningar, sum øll lond við ferðavinnu spyrja seg sjálv, eftirsum tað altíð er ein avbjóðing at seta tiltøk í verk (t.d. avgjøld, skattir o.a.), sum raka rættvíst í eini vinnu, ið er so fjøltáttað. Givið er tó, at flest øll lond (um ikki øll) hava okkurt slag av avgjaldsskipan, skatti, differentieraðar prísskipanir (t.d. fyri ymsar ferðaseðlar) ella annað fyri at fáa til vega beinleiðis inntøkur av ferðavinnuni. Tað er somuleiðis ein sannroynd, at ferðavinnan í flestu londum, eisini í Føroyum, á mangan hátt hevur lagaligari skatta- og avgjaldstreytir enn aðrar vinnugreinar. Her verður kanska serliga hugsað um, at stórir partar av virkseminum innan vinnuna (gisting og flutningur) eru MVG-fríir.

Mest vanligu avgjøldini, ið verða nýtt aðrastaðni, eru gistingaravgjøld (uml. 10-20 kr. lagdar á hvørja gistingarnátt). Eisini eru dømi um, t.d. í Italia, at ferðafólk skulu rinda ein ferðaskatt á flogvøllinum við fráferð ella komu (uml. 100-200 kr.), bara fyri at nevna tvey dømi av mongum. Føroyar hava ikki sett í verk serstaka skatta- ella avgjaldsskipan innan ferðavinnuna, sum vit kenna frá øðrum londum og tað er ikki vist, at tað er ynskiligt, at tað verður gjørt, sum støðan er í løtuni. Tað veldst í stóran mun um, hvør verður spurd/ur og er hugburðurin (og grundgevingarnar) til slíkt oftani hugsjónarliga grundaður.

Arbeiðsbólkurin umboðar ymisk áhugamál og tað ber ikki til at røkka felags niðurstøðum um, hvørt avgjøld ella skattir eiga at verða ásett, hvussu hetta skal krevjast inn ella umsitast og hvar inntøkurnar eiga at fella. Hetta er spurningur, sum politiska skipanin eigur at taka støðu til. Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum verður tískil at vísa politisku skipanini á, hvørjir møguleikarnir kunnu vera.

Millum møguleikarnar, ið landið hevur at fíggja øktu útreiðslurnar av ferðavinnuni, kunnu nevnast:

- Ongin broyting: Tað merkir, at fíggingin verður funnin beinleiðis í landskassanum.
- Ferðavinnugjaldið:
    - Lógarbroyting: Soleiðis at ferðaavgjaldið ikki fer beint í landskassan, men fer á ávísar kontur, markaðar til umsiting av ferðavinnu.
    - Lógarbroyting: Hækka ferðaavgjaldið og marka hetta til umsiting av ferðavinnu.
    - Lógarbroyting: Áseta ymiskt ferðaavgjald fyri føroyingar og útlendsk ferðafólk.

- Lógarbroyting: Broyta ferðaavgjaldið, so tað umfatar øll ferðafólk (eisini tey, ið ferðast við ferðafólkaskipum).

- Seta avgjald á gisting.

- Seta beinleiðis ferðaskatt, sum bert útlendsk ferðafólk rinda t.d. við fráferð úr Føroyum.

- Gera mun á ferðaseðlaprísum við Strandferðsluni millum fastbúgvandi og vitjandi.

- Bummgjald fyri tunga ferðslu, tá komið verður í land í Føroyum.

- Avgald á inntøkur frá leigubilum.

- Gjald fyri at ferðast í náttúruni, t.d. eitt pass av einhvørjum slagi.

Somuleiðis kunnu átøk setast í verk, sum kunnu skapa óbeinleiðis inntøkur hjá landinum við at betra um kappingarførið hjá vinnuni. Sum dømi kunni nevnast:

- Innkeypsmonopolið hjá Rúsuni verður avtikið og

- lægri mvg til matstovuvinnuna,

- avmarkingar á inn- og útflutningi av mati og drekka,

- reglur fyri kamping og kamping-kort.

Í brotunum 5.1 til 5.3 vísa vit á ymsar hættir, sum tað almenna kann nýta til at skapa inntøkur. Í brotunum 5.4 til 5.6 vísa vit, hvørji átøk tað almenna kann fremja, fyri at bøta um møguleikarnar hjá privatu vinnuni at økja um inntøkurnar.

## 5.1 Ferðaavgjaldið

Vit hava eina skipan, sum inniber, at øll ferðandi, sum keypa ferðaseðil sjó- og luftvegis úr Føroyum, rinda eitt ferðaavgjald á 65 kr. av hvørjum ferðaseðli. Heimildin at innkrevja ferðaavgjaldið er at finna í løtingslóg nr. 33 frá 1988 um ferðaavgjald, har tað er ásett, at peningurin skal rindast fyri hvørt ferðafólk, sum fer úr Føroyum. Undantikin eru børn, ferðafólk, sum eru í Føroyum í transit (verður tulkað sum m.a. cruise ferðafólk), og so tey, ið ferðast við fari, sum vanliga ikki verður brúkt til ferðafólkaflutning.

Inntøkan frá ferðaavgjaldinum er vaksin støðugt seinastu árini, so hvørt talið á teimum ferðandi veksur. Í 2014 komu 8,6 mió kr. inn í ferðaavgjaldi, í 2015 var talið uml. 9,5 mió. kr. og roknað verður við, at inntøkurnar koma upp á uml. 10 mió. kr. í 2016. Framskrivingarnar siga, at hendan inntøkan hjá landinum kemur at vaksa við uml. 0,5 mió. kr. um árið komandi árini, soleiðis at inntøkan í 2018 kann væntast at vera 11 mió. kr.

Sum útgangsstøði er hetta ein einføld skipan, sum ger tað lætt og bíligt at krevja inn skatt/avgjald frá teimum ferðandi, eftirsum skipanin fevnir um øll vanlig ferðafólk og umsitingin er sera avmarkað. Trupulleikin er,

at avgjaldið einamest rakar føroyingar heldur enn útlendsk ferðafólk, og kann hetta sostatt fatast sum ein vanligur skattur fyri føroyingar heldur enn eitt avgjald, ið er knýtt at ferðavinnuni. Ein annar skeivleiki er, at tað ikki javnsetir øll ferðafólk, tí tey, ið ferðast við ferðafólkaskipum (transit ferðandi), eru undantikin ferðaavgjaldinum, hóast tey fara túrar á landi og soleiðis at skilja ikki eru í transit.

Arbeiðsbólkurin er ikki á einum máli, tá tað snýr seg um cruise-vinnuna og m.a. spurningin um, hvørt cruise-ferðafólk framhaldandi eiga at vera undantikin ferðaavgjaldinum. Tað er eitt kjak fyri seg, hvat slag av ferðavinnu og hvørji ferðafólk vit vilja satsa upp á í Føroyum; eitt kjak sum eigur at taka støði í eini sjálvstøðugari og óheftari kanning, sum m.a. kann vísa, hvussu stóran búskaparligan týdning ymisku ferðafólkabólkarnir hava fyri Føroyar, hvørja fatan føroyingar og tey ferðandi hava um upplivingina o.s.fr. Tástani eru vit til reiðar at taka eitt meiri sakligt kjak um hesi viðurskifti og koma fram til eina niðurstøðu um, hvussu vit skulu satsa innan ferðavinnuna framyvir.

Tað er tó sera viðkomandi fyri politisku skipanina at viðgera skipanina um ferðaavgjaldið í mun til cruise-vinnuna. Í fyrstu syftu er neyðugt at spyrja, um tað er skilagott at gera mun á vinnugreinum innan ferðavinnuna og óbeinleiðis stuðla pørtum av vinnuni við ikki at áleggja somu avgjøld á allan ferðafólkaflutning?

Næsti spurningur er, um inntøkubýtið millum havnir/kommunur og landskassan í mun til inntøkur frá ferðamannaskipum eigur at vera øðrvísi enn í dag? Inntøkurnar hjá havnunum av at hýsa ferðamannaskipum eru lutfalsliga góðar. Í 2015 vóru samlaðu inntøkurnar hjá teimum trimum størstu havnunum (Tórshavn, Klaksvík og Runavík) í Føroyum uml. 5,7 mió kr. (harav 4,3 mió. kr. í Tórshavnar Havn). Partur av inntøkunum hjá summum havnum er ferðaavgjald fyri tey ferðandi á skipunum (sonevndur pax-tax), sum tó er munandi lægri enn ferðaavgjaldið hjá landinum. Spurnartekin kann verða sett við, um tað er rætt, at havnir og kommunur fáa allar inntøkurnar frá ferðamannaskipunum, ið jú vilja vitja Føroyar og ikki endiliga eina serstaka havn ella kommunu. Ferðafólkini á skipunum kunnu frítt fara í land og brúka alskyns hentleikar, sum fyri ein part skulu rekast og haldast við líka fyri almennar pengar. Spurningurin er, um hetta eigur at verða endurspeglað í inntøkubýtinum?

Galdandi skipan við ferðaavgjaldi inniheldur samanumtikið fleiri vansar og til ber at spyrja, um skipanin er rættvís, sum hon virkar í dag. Ferðaavgjaldið er at fata sum ein generellur skattur hjá flestu ferðandi úr Føroyum og ikki ein ferðafólkaskattur sum so. Tí ber til at seta spurnartekin við, um tað er skilagott at hava slíkan skatt, um vit vilja fremja flytførið hjá føroyingum, menna ferðavinnuna og knýta tættari bond við umheimim? Hinvegin er hetta einasta beinleiðis avgjaldsskipan, sum er í gildi, og sum í ávísan mun liggur á ferðavinnuni og kann tað vera ávíst skilvísi í at varðveita eitt slíkt avgjald, serliga um onki annað verður sett í staðin. Fortreytin eigur tá at vera, at inntøkurnar frá hesum avgjaldi – ella partur av tí - verða markaðar til at fíggja ferðavinnumenning og náttúruvernd, heldur enn at inntøkan heldur áfram sum passiv inntøka á fíggjarlógini. Verður peningurin skilmarkaður til menning og verju av náttúruni, ber til at grundgeva fyri, at avgjaldið eigur at vera varðveitt, tó at ein endurskoðan av skipanini hóast hetta hevði verið skilagóð.

Mælt verður til, at gjørd verður ein eftirmeting av galdandi avgjaldsskipan fyri ferðafólkaflutning til og úr Føroyum, m.a. við støði í spurningunum, sum eru reistir omanfyri.

*Ábyrgd:* FMR (og UVMR)

*Tíðrætlan:* 2018

## 5.3 Dagføringar innan Strandferðsluna

Strandfaraskip Landsins er ein lyklaleikari tá tað snýr seg um góða og smidliga tænastu til ferðavinnuna. Tí hevur tað stóran týdning fyri inntøkumøguleikar hjá vinnuni, at Strandferðslan veitir ferðavinnuni góða tænastu. Strandferðslan hevur flutningsskyldu og harvið skyldu at røkja ymsu farleiðirnar innan oyggja- og bygdaleiðir eftir ávísum tíðarætlanum og til ein ávísan prís. Talan er um farleiðir, sum ikki kunnu sigast at verða riknar á handilsligum støði, hóast tað er ásett í reglugerðini fyri SSL, at hetta er endamálið.

Orsakað av stóra almenna stuðlinum til raksturin av almennu farleiðunum, ber í dag til at hava eina sera bíliga ferðaskipan fyri borgaran. Nú ferðavinnan vindur upp **á seg, eru fleiri orsøkir** til at endurskoða galdandi skipan, sum er skraddaraseymað føroysku borgarunum og sum ikki er gjørd til at vera eitt ískoyti til eina vaksandi ferðavinnu og harvið eitt ískoyti til eitt betri inntøkugrundarlag hjá vinnuni.

Galdandi skipan er ikki haldgóð í ferðavinnuhøpi av fleiri orsøkum:

1. Økt ferðafólkatal leggur størri trýst á almenna flutningskervið, sum bæði verður meira slitið, men sum eisini kann leggja hald á avmarkaða talið av plássum í bussum og skipum til ampa fyri borgarar á staðnum.

2. Størsti trupulleikin fyri ferðavinnuna er, at Strandfaraskip Landsins ikki hava sett í verk netskipan til ferðaseðlar, soleiðis at ferðandi, ferðaskrivstovur o.o. kunnu keypa ferðaseðil í góðari tíð og soleiðis leggja ferðir sínar til rættis. Galdandi skipan er sera svikalig í ferðavinnuhøpi, har ein ongantíð veit við vissu, um til ber at fáa pláss við oyggjaleiðum (her verður serliga hugsað um Sandoyar- og Kallsoyarleiðina).

3. Galdandi ferðaætlanir eru ikki lagdar til rættis við ferðavinnu fyri eyga. Tvørturímóti eru tær tillagaðar staðbundna tørvinum og vit síggja dømi um, at ongar fráferðir eru í vikuskiftinum, tað er tvørligt bussamband til ávís støð í Føroyum, sum royna at satsa upp á ferðavinnuna, á nógvum farleiðum eru ymsar ferðaætlanir um summarið og um veturin, og nógv dømi eru um rutur, har tað er neyðugt við tilkalling, skal bátur ella bussur koma á staðið. Hetta eru alt viðurskifti, sum ikki eru ferðavinnuni at frama. Til tess at hava eina væl virkandi ferðavinnu, er neyðugt við reglusemi alt árið og fleiri túrum til útvald (ferðavinnu)støð.

Sum útgangsstøði ber til at siga, at eingin orsøk er at lata øðrum enn teimum borgarum, sum rinda skatt fyri alment fíggjaðu farleiðirnar, at fáa lut í so bíligum ferðaseðlum, sum vit hava í Føroyum. Tað sama er galdandi fyri tyrluflutningin, sum verður rikin við almennum stuðli og sum er ætlaður at veita borgarum á útoyggj eina nútímans og bíliga flutningstænastu.

At gera mun á ferðandi, grundað á tjóðskap ella endamál við ferðini, er ikki lógligt í ES-londum, tó at vit síggja dømi um hetta, m.a. í Italia, sum hevur fingið dóm fyri hesa praksis í 2003. Av tí at Føroyar ikki eru fevndar av hesi ES-lóggávu, kundu vit í prinsippinum sett skipanir í verk, sum gera mun á ferðandi, grundað á tjóðskap. Hinvegin hevði tað verið ein stór avbjóðing at funnið fram til eina skipan, sum er smidlig at umsita. Harafturat hevði hetta verið ein ódámlig skipan, sum óivað hevði givið ferðandi eina keðiliga fatan av Føroyum sum vertslandi.

Tað, sum ferðavinnan serliga eftirspyr, er, at ein online bókingarskipan verður sett í verk fyri farleiðirnar hjá SSL, soleiðis at tað framyvir verður møguligt hjá ferðasmiðjum, ferðafólki og øðrum at bóka alla sína ferð, t.d. úr París til Suðuroyar og aftur. Ein orsøk til, at t.d. Suðuroy ikki upplivir sama vøkstur innan ferðavinnuna er óvissan við galdandi skipan. Um ferðasmiðir skulu hava møguleika at seta saman pakkaferðir til Føroya, er tað ein fortreyt, at hesir pakkar eisini innihalda trygd fyri, at ferðafólk sleppa frá a til b, tá tey eru

komin til landið og hava rindað fyri innanoyggja ferðasambandið sum part av pakkanum, áðrenn tey koma til landið. Ein online ferðaseðlaskipan hevði sostatt økt um inntøkugrundarlagið hjá ferðasmiðjum, skipað ferðafólkaferðsluna betur og bøtt um møguleikarnar fyri vinnuligari menning í útjaðaranum. Sum skilst, er SSL í ferð við at menna eina online bókingarskipan, ið væntandi leggur upp fyri hesum.

Somuleiðis eigur ein nýggj og meira smidlig avsláttarskipan at verða sett í verk til ferðaseðlakeyp. Ein nýggj skipan kann byggja víðari á galdandi avsláttarskipan hjá SSL, tó at hon eigur at innihalda fleiri møguleikar. Millum annað skal hon í størri mun verða tillagað tørvin hjá ferðavinnuni, bæði soleiðis at skipanin verður einføld og løtt at brúka, samstundis sum ferðaseðlasølan til ferðafólk, og harvið inntøkurnar, vaksa.

Hetta er ein háttur at bøta um handilsliga grundarlagið hjá SSL (vísandi til ásetingina í kunngerðini hjá SSL um handilsligan rakstur), og harvið at lætta um hjá føroyska skattgjaldaranum, sum, við fleiri inntøkum frá m.a. ferðavinnuni, skal rinda minni fyri at reka samferðsluna í Føroyum.

Arbeiðsbólkurin mælir at enda eisini til, at øll ferðaætlanin hjá SSL verður endurskoðað, so hon framyvir í størri mun tekur atlit at ferðavinnuni. Hetta eigur at verða gjørt í samráð við flutningsfeløg, ferðaskrivstovur, kunningarstovur, menningardeildina hjá VFI og aðrar aktørar í ferðavinnuni, soleiðis at tað verður tryggjað, at almenna infrakervið í størri mun kann stuðla upp undir menningina av ferðavinnuni í Føroyum. Eitt dømi, ið javnan verður tikið fram, er, at SSL bussar bert eru á flogvøllinum til ávísar komur hjá flogførum, og tí standa í heilumørkymlað fólk við Visit Vágar skivuna og kæra sína neyð, tí tey sleppa ikki heim av flogvøllinum. Her er stórur tørvur á samskifti og samskipan millum Atlantsflog, SSL og Vága Floghavn.

Tilmæli:

Arbeiðsbólkurin mælir til, at Samferðslumálaráðið ber soleiðis í bandi, at ein online bíleggingarskipan verður sett í verk í 2017.

Mælt verður til, at ein nýggj og meira smidlig avsláttarskipan verður sett í verk til ferðaseðlakeyp.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at øll ferðaætlanin hjá SSLverður endurskoðað, so hon framyvir í størri mun tekur atlit at ferðavinnuni.

*Ábyrgd:* SMR/SSL

*Tíðarætlan:* 2017

## 5.5 Matstovuvinnan

Matstovuvinnan í Føroyum er eitt týðandi og munagott ískoyti til ferðavinnuna, eins væl og til trivnaðin sum heild í Føroyum. Inntøkugrundarlagið hjá matstovunum er tó lutfalsliga vánaligt og tað er ein stór avbjóðing at fáa rakstur í virksemið, serliga orsakað av dýra innkeypsprísinum á øli og víni umframt einum høgum MVG fyri matstovur. Tað er vanligt í fleiri øðrum londum, at netupp hendan vinnan hevur eitt lægri avgjald, til tess at skapa betri lønsemi og vøkstur innan vinnuna. Høgi innkeypsprísurin hjá matstovunum (m.a. orsakað av flutningskostnaði og høgum mvg'i) ger tað sum heild torført at fáa lønsemi í matstovuvirksemið.

Arbeiðsbólkurin tekur undir við tilmælinum í álitinum "Politikkur fyri skapandi vinnur" frá 2016, sum vísir á týdningin at gera eina gastronomiska vakstrarætlan. Álitið mælir m.a. til, at settur verður arbeiðsbólkur at gera uppskot til átøk, ið kunnu stimbra føroyska framleiðslu, matvinnu og ferðavinnu.[20]

Einkarsølan skerjir møguleikarnar hjá matstovuvinnuni at seta saman vínskrá eftir egnum ynski og í tráð við matarskránna. Í løtuni er innkeypsprísurin, sum matstovuvinnan keypir fyri frá Rúsdrekka-sølu Landsins, bert eitt vet lægri enn prísurin, sum vanligi kundin keypir fyri, umframt at matstovuvinnan skal rinda fyri at hava eitt skeinikloyvi. Hesar umstøður gera tað trupult fyri vinnuna at bera seg fíggjarliga, at skapa vøkstur og ikki minst at menna seg.

Heilsumálaráðið legði á sumri 2015 fram Rúsdrekka- og rúsevnispolitikk Føroya, har eitt tað fremsta tilmæli var at avtaka avlopskravið hjá Rúsdrekkasøluni. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesum tilmæli, sum letur upp fyri eini nýggjari prísskipan hjá Rúsdrekkasøluni, har munur verður gjørdur á privatum og vinnuligum innkeypi.

Arbeiðsbólkurin metir, at ein munagóð loysn kundi verið, at innkeypsmonopolið hjá Rúsdrekkasølu Landsins varð avtikið, soleiðis at skipanin varð eins og í flestu grannalondum okkara, t.e. at umframt einkarsøluna sleppa matstovur eisini at innflyta rúsdrekka beinleiðis. Ein vandi við eini slíkari skipan er tó, at hetta kanska einamest kemur stóru fyritøkunum til góðar, m.a. tí hesar hava møguleika at fáa hópavsláttur, tá keypt verður inn. Tí átti eitt alternativ at verið, at matstovur eisini hava møguleika at keypa rúsdrekka frá einkarsøluni fyri lægri prís enn borgarin. Undir øllum umstøðum er neyðugt at skapa lagaligari treytir fyri innkeypi av rúsdrekka fyri matstovuvinnuna. Hetta er ein neyðug loysn, um vit skulu hava størri menning og framgongd í matstovuvinnuni, serliga uttan fyri miðstaðaraøkið, har tørvur framvegis er á fleiri gistingar- og matstovutilboðum.

Afturat broyttum reglum fyri innkeypi av rúsdrekka, mælir arbeiðsbólkurin til, at lagaligari MVG-reglur verða settar í verk fyri matstovuvinnuna. Í flestu grannalondum okkara eru matstovur álagdar eitt lægri mvg, enn onnur vinna. Í Íslandi er avgjaldið t.d. 11 % og í Svøríki er td 13 %.

Sum útgangsstøði er torført at fáa munagóðan rakstur innan matstovuvinnuna, m.a. tí matur og drekka eru munandi dýrari at keypa inn í Føroyum enn aðrastaðni, men eisini tí at lønarútreiðslurnar eru lutfalsliga høgar í vinnuni. Sum skipanin er í dag, krevur tað tískil eitt gott inntøkugrundarlag (t.e. nógvar gestir) ella stórrasktur, skal matstovan bera seg. Uttanfyri miðstaðarøkið eru fortreytirnar fyri at byrja eina matstovu tískil vánaligar sum útgangsstøði og mett verður, at neyðugt er við átøkum á økinum, vilja vit menna ferðavinnuna kring landið.

20 *Politikkur fyri skapandi vinnur, UVMR 2016*

Mælt verður til, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið orðar broytingaruppskot til løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, ið inniber, at Rúsdrekkasøla landsins kann selja matstovuvinnuni øl og vín fyri ein lægri kostnað enn vanligt. Somuleiðis eigur at verða latið upp fyri, at matstovur fáa møguleika at keypa rúsdrekka beinleiðis frá útlandinum.

*Ábyrgd:* UVMR

*Tíðarætlan:* 2018

Arbeiðsbólkurin mælir somuleiðis til, at mvg'ið innan matstovuvinnuna verður lækkað, soleiðis at tað samsvarar við tær skipanir, grannalond okkara hava. Fíggjarmálaráðið eigur at kanna nærri, hvussu ein slík skipan kann síggja út eftir einum føroyskum leisti og síðani at seta fram uppskot um at lækka mvg'ið fyri matstovur í Føroyum.

*Ábyrgd:* FMR

*Tíðarætlan:* 2018

## 5.6 Inn- og útflutningur av mati og drekka

Í kanningararbeiðinum í sambandi við heildarætlanina, er arbeiðsbólkurin vorðin varugur við, at ávísar avbjóðingar eru við, at útlendsk ferðandi kunnu hava størri nøgdir av mati við til Føroya, bæði við sølu og privatari nýtslu fyri eyga. Tað ber tó ikki til at meta um, hvussu stór hendan avbjóðing er í dag. Vit kunnu tó staðfesta, at vit hava ein felags áhuga í, at ferðavinnan kastar sum mest av sær í Føroyum, og at tey ferðandi, sum koma til landið, í mest møguligan mun keypa neyðugu matvørurnar í landinum. Umframt handilsliga trupulleikan við slíkum mynstri, liggur eisini ein innbygdur vandi fyri matvørutrygdina, at fólk ótarnað kunnu flyta matvørur inn í landið sum teimum lystir, serliga um tað vindur upp á seg. Fyri at forða fyri óhepnu avleiðingunum av hesum, heldur arbeiðsbólkurin, at tað er neyðugt at seta í verk tiltøk, sum byrgja upp fyri teirri vinnuligu avlagan, sum liggur í slíkari skipan.

Í Íslandi verður innflutningur av mati (t.d. í bussum) steðgaður av heilsufrøðiligum ávum. Ferðafólk í útlendskum bussum hava loyvi at hava 3 kg av kjøtvøru í part í teirra egna viðføri, og hetta er bert til privata nýtslu. Tað er ikki loyvt bussum at hava kjøt pakkað í stórum mongdum. Í slíkum førum verður hald lagt á matvørurnar, men oftast goyma tollmyndugleikarnir matin, um fólk biðjur um tað.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at lógarverkið kring inn- og útflutning av matvøru verður tillagað, soleiðis at innflutningur av matvøru verður avmarkaður til privata nýtslu og til fá kilo pr. persón. Somuleiðis eigur at vera ein treyt, at privatpersónar einans hava loyvi at útflyta avmarkaða nøgd av matvøru, t.d. 10 kg, soleiðis at forðað verður fyri óskipaðum (og ólógligum) vinnuligum útflutningi. Hesi viðurskifti eiga sjálvsagt at verða kannað nærri í.s.v. lógarfyrireikandi arbeiði, áðrenn til ber at siga, hvørji krøv og mørk eru skilagóð fyri Føroyar. Eisini eigur at verða kannað, um møguleiki skal vera fyri at gera mun á føroyskum og útlendskum ferðandi, ið flyta mat úr Føroyum til privata nýtslu.

Til ber at taka støði í íslendska leistinum fyri privatan inn- og útflutning av rávørum.

Tað er UVMR, sum varðar av matvørulóggávuni, ímeðan Fíggjarmálaráðið varðar av mvg- og tolllóggávuni. Arbeiðsbólkurin mælir til, at tað verður kannað nærri, hvussu lógarkarmarnir kring privatan inn- og útflutning av mati kunnu tillagast á skilabestan hátt og at lógarbroytingarnar verða fyrireikaðar í tøttum samstarvi við Heilsufrøðiligu starvsstovuna og TAKS.

Fyrireikandi arbeiði eigur at verða sett í verk so skjótt sum til ber, soleiðis at neyðugu lógarbroytingarnar kunnu verða settar í gildi fyrst í 2018.

*Ábyrgd:* UVMR og FMR

*Tíðarætlan:* 2018-2019

## 5.7 Tjalding og húsvognar

Seinastu árini eru fleiri nýggj tjaldingarøki gjørd til húsvognar kring Føroyar og umstøður fyri ferðandi við húsvogni ella tjaldi batna so líðandi. Kortini hevur tað víst seg at vera ein avbjóðing at skipa ferðsluna við húsbilum og tjøldum, soleiðis at hesi ferðandi virða tær reglur, sum eru við avmerktum tjaldstøðum og rinda fyri tær nætur, tey búgva í Føroyum. Tí metir arbeiðsbólkurin, at tað er neyðugt at seta í verk nýggja skipan, sum í størri mun tryggjar, at tjaldarar rinda fyri at búgva í Føroyum og at ferðslan á hesum økinum verður betur skipað. Somuleiðis er tørvur á munandi betri kunning um, hvørjar treytir eru galdandi í mun til tjalding í Føroyum.[21]

Tað eigur at vera møguligt at leggja sína tjaldingarfrítíð til rættis, áðrenn komið verður til Føroya. Hetta kann gerast við at tjaldingarøkini í samstarvi bjóða teimum ferðandi eitt tjaldingarkort, sum gevur atgongd til øll tjaldingarøki í Føroyum. Slíkt tjaldingarkort eigur at vera tøkt á netinum, soleiðis at tey ferðandi kunnu keypa kortið og leggja sína ferð til rættis, áðrenn komið verður til Føroya.[22] Við samstarvi millum tjaldingarplássini og ferðasmiðir, t.d. eini heimasíðu, har øll viðkomandi kunning um tjalding í Føroyum er tøk, og við samstarvi millum tjaldingarpláss um inntøkur og gjøld, hevði borið til at fingið eina munandi betur skipaða og inntøkugevandi tjaldingarvinnu.

Við slíkari skipan tryggja vit, at tjaldarar í størri mun enn í dag rinda fyri at búgva í Føroyum. Somuleiðis tryggja vit, at húsvognar og aðrir tjaldarar, sum áður hava sett bil og tjøld á alskyns støðum, verða eggjaðir at gista á avmerktum tjaldingarstøðum, sum teir hava goldið fyri og sum hava neyðugu hentleikarnar til taks.

---

*21 Tá sipað verður til tjalding og tjaldingarøki, fevnir hetta um camping í breiðari merking, t.e. eisini tjaldingarøki til húsbilar (campinglláss).*
*22 Sí dømi um slíkt kort: www.campingcard.is*

Tað kann tó hugsast, at tað, hóast ein slík skipan verður sett í verk, framhaldandi vera tjaldarar, sum ynskja at gista uttan fyri tjaldingarøkini, t.d. á náttúruvøkrum støðum. Tí er tað somuleiðis neyðugt at tryggja, at tjaldarar fáa greiða kunning um, hvørjar tjaldingartreytir eru galdandi í Føroyum. Mælt verður til, at ferðandi við tjaldi ella húsvogni fáa hetta kunningartilfar í sambandi við, at komið verður til landið. Tað kann vera í sambandi við keyp av ferðaseðli, á felags heimasíðu fyri tjaldingarøkini, umborð á Norrønu (t.d. faldara undir viskaran), á kunningarstovum, bensinstøðum v.m.

Kunningin eigur fyrst og fremst at snúgva seg um, hvørjir tjaldingarmøguleikar, hentleikar og tilboð eru í Føroyum. Ein partur av kunningini eigur tó eisini at vera, hvørjar reglur eru galdandi, hvar tað er loyvt at tjalda (bæði við húsbili og tjaldi) og hvør bótin er, um ferðandi ikki halda seg til galdandi reglur. Her eigur somuleiðis at vera umhugsað at hækka tær bøtur, sum verða álagdar fyri ólógliga parkering eins og politiið eigur at herða handhevjanina á hesum øki, soleiðis at vinnan verður betur skipað og inntøkurnar harvið hægri.

Tað eru føroysku tjaldingarøkini, tað vil siga í flestu førum kommunurnar, sum hava ábyrgd av at skipa hesa vinnu betur. Hetta eigur at verða gjørt í tøttum samstarvi við ferðasmiðir á økinum og VFI kann vegleiða og ráðgeva í sambandi við hetta arbeiði. Serliga í mun til kunnandi tilfarið, heimasíðu v.m. eigur innlendis menningardeildin at veita hjálp og møguliga fígging til at fáa nýggju skipanina upp at standa.

*Ábyrgd:* Kommunurnar

*Tíðarætlan:* 2018-2019

## 5.8 Airbnb

Seinastu árini hevur tað vundið nógv upp á seg kring heimin, at privat leiga hús síni, íbúðina ella eitt kamar til ferðafólk gjøgnum skipanina Airbnb. Í Føroyum hevur eisini verið ein stórur vøkstur í gistingarmøguleikum gjøgnum hesa skipanina, serliga í 2016, har tað veruliga tykist hava tikið dik á seg, at fólk velja at leiga bústað sín út hendanvegin.

Ein leiting á Airbnb (16. januar 2017) vísir, at tað í løtuni eru 271 skráettir bústaðir í Føroyum í skipanini. Hetta tal er møguliga hægri um summarið. Summir bústaðir kunnu hýsa 8 fólkum, meðan tað í øðrum førum er talan um eitt kamar. Siga vit t.d., at hesir 271 bústaðirnir í Føroyum í miðal kunnu hýsa 3 fólkum, er talan um 813 seingjarpláss um dagin, sum kunnu verða leigað út gjøgnum Airbnb. Til samanberingar eru 106 kømur á Hotel Føroyum við íalt 212 seingjaplássum. Airbnb kann við øðrum orðum hýsa nærum 4 ferðir so nógvum ferðafólkum um dagin í mun til Hotel Føroyar.

Talan er sostatt um ein sera stóran part av ferðafólkavøkstrinum, sum ikki telur við í hagtølunum fyri gisting og umsetning innan vinnuna. Vøksturin innan Airbnb hevur sostatt ta avleiðing, at hagtølini innan ferðavinnuna gerast minni eftirfarandi.

Tað er ilt at meta um, hvussu stóran búskaparligan týdning hesin marknaður hevur fyri Føroyar. Leigutreytirnar eru lutfalsliga lagaligar í Føroyum og hetta eggjar borgarum, sum leiga út, at geva inntøkuna upp í skatti. Ein háttur at tryggja at landið fær hagtøl og skattainntøkur frá hesum leigumarknaði er at seta krav um, at øll, sum ynskja at leiga bústað teirra út, skulu skráseta seg hjá t.d. skattamyndugleikunum.[23] Eftir galdandi vegleiðing hjá TAKS skal húsaleiga gerast upp við roknskapi, um tú ikki leigar út til bústaðarendamál og um leiguavtalan ikki er millum teg og leigaran. Hetta er td. tá tú leigar út til vinnuvirksemi ella til nettænastur sum t.d. Airbnb. Tað er lítil og ongin munur á skattainntøkuni hjá landinum, um leiguinntøkan verður givin upp sum bruttoinntøka ella við roknskapi, men hesin uppgerðarháttur er tyngri umsitingarliga hjá útleigarum eins væl og hjá landinum. Hetta ger tað meira tvørligt at leiga út, og kann avmarka leiguútboðið til ferðavinnuna. Tí eigur at verða umhugsað at seta smidligari reglur í gildi, t.d. soleiðis at leiguinntøkur frá Airbnb eisini kunnu gerast upp sum bruttoinntøka.

Tað hevur stóran týdning at útvega hagtøl um, hvussu nógv fólk gista gjøgnum Airbnb. Bæði fyri at fáa størri kunnleika til veruligu menningina í vinnuni og fyri at vita, hvørji møgulig átøk skulu setast í verk fyri at stýra menningini tann vegin, vit vilja.

Airbnb er vorðið so mikið umfatandi nógvastaðni[24], at hetta verður fatað sum ein hóttan móti ferðavinnuni (serliga hotellvinnuni), umframt at Airbnb hevur havt við sær, at útboðið av føstum leigubústøðum er lækkað munandi (og leiguprísurin tí hækkaður), soleiðis at borgarar hava trupulleikar við at finna bústað í fleiri býum. Sostatt er Airbnb vorðið ein vinnupolitisk, bústaðarpolitisk og í summum førum eisini ein skattapolitisk avbjóðing, sum hevur havt við sær, at summi lond (ella býir og økir) hava valt at seta tiltøk í verk fyri at avmarka ella forða Airbnb.

Í Føroyum tekur Airbnb í løtuni broddin av tí fløskuhálsi, sum vit síggja innan gistingarhúsvinnuna í háárstíð. Ferðavinnan fatar tískil ikki Airbnb sum eina hóttan, sum støðan er nú. Var tað ikki fyri privata leigumarknaðin, høvdu vit ikki kunnað hýst so nógvum ferðafólkum sum vit gera. Tó vita vit um, at leigumarknaðurin, serliga í høvuðsstaðnum, er komin undir enn størri trýst seinnu árini, m.a. orsakað av Airbnb.

Tó er tað ein trupulleiki, eisini fyri ferðavinnuna, at vit ikki kenna vavið (og harvið týdningin) av skipanum sum Airbnb. Hetta er vitan sum er neyðug, m.a. fyri at kunna taka avgerð um møguligar útbyggingar og íløgur innan gistingarhúsvinnuna. Somuleiðis er tørvur á hesi vitan, kemur tað upp á tal seinni at seta politisk tiltøk í verk í mun til leigumarknaðin.

Arbeiðsbólkurin mælir í fyrstu syftu til, at tiltøk verða sett í verk sum tryggja, at gistingar via skipanir sum t.d. Airbnb verða skrásettar. Til dømis við at krevja, at allir útleigarar skulu skráseta seg í sambandi við útleigan, samstundis sum tað verður eitt krav at gera upp eina ferð um árið, hvussu nógv bútsaðurin hevur verið leigaður út.

*Ábyrgd:* FMR og UVMR

*Tíðarætlan:* 2018

*23 Hetta er ein skipan sum verður brúkt t.d. í Barcelona, har allir útleigarar skulu skráseta sín bústað, fyri at kunna leiga hann út.*
*24 T.d. Berlin, Barcelona, Reykjavík, Venedig*

# Kapittul 6 Mykines

## 6.1 Ferðafólkatalið í Mykinesi

Mykines er eitt tað størsta ferðavinnumálið í landinum og tí varð valt at brúka Mykines sum dømi um, hvussu ferðavinnan á einum lítlum stað kundi verið skipað.

Sum talvan niðan fyri vísir, er ferðafólkatalið í Mykinesi vaksið nógv seinastu árini.

**Ferðafólk við SSL til Mykinesar 2011-16**

| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| Ferðafólk | 3.303 | 3.968 | 5.014 | 6.352 | 8.009 | 9.765 |

Ferðafólkahagtølini byggja á tøl, sum eru fráboðað Strandferðsluni. Tað merkir, at allir eykatúrar hjá Jósupi, ferðafólk við tyrluni, ferðafólk við øðrum bátum/skipum og útlendskum ferðamanna-skipum ikki eru við. Sostatt er veruliga talið av ferðafólki í Mykinesi sannlíkt munandi hægri enn almennu tølini hjá SSL.

Talið av ferðafólki í Mykinesi er í minsta lagi trífaldað seinastu 5 árini. Sannlíkt er, at talið av ferðafólki í 2016 lá oman fyri 12.000 ferðafólk. Stóri vøksturin í ferðafólkatalinum í Mykinesi hevur longu havt avleiðingar fyri oynna. Hetta sæst serliga aftur á gonguleiðini út í Mykineshólm, har sporini eftir øktu gongdini síggjast týðiliga.

Tað er í dag greitt, at stórur tørvur er á at skipa ferðavinnuna í Mykinesi, soleiðis at hon kann virka á burðardyggum grundarlagi og gerast ein ágóði og ikki ein bági fyri oynna í framtíðini.

Í tilgongdini at tilevna hesa heildarætlan hevur skrivaratoymið kannað, hvussu viðurskiftini í Mykinesi eru skipað og mett um, hvat kann broytast so ferðavinnan í Mykinesi er meira burðardygg. Vit hava verið á fundum í Mykinesi, m.a. við Ramsar-nevndina fyri Mykines, vit hava tosað við hagastýrisformenn, bygdafólk, kommunustýrislimir og onnur, sum hava tilknýti til oynna. Eisini er serfrøði á Búnaðarstovuni, Umhvørvisstovuni, Fiskimálaráðnum og Náttúrugripasavninum eftirspurd.

Hugsanin var, at Mykines skuldi vera ítøkiliga royndarverkætlanin; ein pilotverkætlan, sum síðani kundi eftirmetast og møguliga brúkast sum førdømi til at skipa ferðavinnuna aðrastaðni í landinum. Samstundis (ella kanska av tí sama) byrjaði ein tilgongd í Mykinesi, har hagastýrini tóku stig til grannastevnu, har ætlanin var at skipa ferðavinnuna í oynni betri. Hetta, saman við vantandi heimildum hjá landinum, hevði við sær, at ítøkiliga ætlanin hjá arbeiðsbólkinum varð slept. Mett varð, at tað er rættast, at ein nýggj skipan við støði í grannastevnuni, fyrst eigur at standa sína roynd, áðrenn onnur átøk verða framd.

Tó hava vit avgjørt at koma við einum boði uppá, hvussu ein skipan fyri Mykines kann síggja út. Hetta kann síðani vera eitt ískoyti til ta ferðavinnumenning, sum vit vónandi fara at síggja í Mykinesi komandi tíðina. Í kap. 6.4. lýsa vit í stuttum okkara boð upp á eina skipan fyri Mykines.

## 6.2 Støðan nú

Ferðavinnan í Mykinesi er ikki burðardygg, sum støðan er í dag. Hvørki fyri náttúru og djóralív, sosialt ella búskaparliga. Færri enn 10 fólk búgva fast í Mykinesi og til ber at siga, at oyggin er í ferð við at gerast ferðafólkamál burturav. Tó er framvegis lítið og onki skipað ferðafólkavirksemi í oynni, fastbúgvandi fólkið fáast í avmarkaðan mun við ferðavinnuna og vinnan kastar lítið av sær í oynni.

Í 2012 varð Mykines útnevnt til Ramsar-øki og ein Ramsar-ætlan er síðani gjørd fyri oynna.[25] Endamálið við ætlanini, sum tó ikki er løgfrøðiliga bindandi, er at seta átøk í verk, sum kunnu verja fugl í oynni og umhvørvi teirra. Óskipaða gongdin í haganum og serliga út í Hólmin verður í ætlanini mett sum ein hóttan móti lundanum. Sum úrslit av arbeiðinum hjá Ramsar-nevndini í oynni, vóru teinar av gøtuni umvældir í 2016 og skelti verða sett upp í 2017.

## 6.3 Land og kommuna mangla heimildir

Mykines er kanska skúladømi um, hvussu torført tað í veruleikanum er at seta tiltøk í verk, sum skipa ferðavinnuna á burðardyggum grundarlagi, ikki bara í Mykinesi, men sum heild. Ætlanirnar um at seta ítøkilig tiltøk í verk í Mykinesi, hava víst, hvussu fáar heimildir landsins myndugleikar og kommunur í roynd og veru hava, tá tað snýr seg um lendisumsiting, gongd í haganum o.a. Sum tað framgongur í kap. 3, er galdandi skipan soleiðis háttað, at ógreiða lógargrundarlagið hevur við sær, at jarðareigarar meira ella minni sjálvstøðugt gera av, hvussu gongd í haganum verður skipað, um peningur verður kravdur inn, hvussu peningurin verður nýttur o.s.fr. Einasta greiða amboð, sum landsins myndugleikar hava, smbrt. galdandi lóggávu, er náttúrufriðingarlógin, sum tó inniheldur so mikið veikar orðingar um hesi viðurskifti, at tað er ógreitt, hvussu friðingar skulu handhevjast, umsitast og hvussu eftirlit skal skipast.

Staðfesta vit, at land og kommunur hava ábyrgd av at verja land og umhvørvi, at skipa ferðavinnuna á burðardyggum grundarlagi og at skapa skilagóðar karmar fyri ferðavinnuna, er greitt, at okkum tørvar greiðari lógarheimildir til tess at seta í verk tiltøk.

Ramsar-ætlanin fyri Mykines og arbeiðið at orða hesa heildarætlanina setti sum nevnt gongd á eina tilgongd millum fólk í og við tilknýti til Mykines, ið hevði til endamáls at skipa gongdina út í Hólmin betur. Tað er í sær sjálvum gleðiligt og í tráð við meginreglurnar um burðardygd. Hagastýris-formenninir fyri teir fýra hagarnar í Mykinesi sendu í heyst uppskot til grannastevnusamtykt, sum varð viðgjørt á grannastevnu í Mykinesi 7. apríl 2017. Grannastevnan samtykti at taka gjald á 100 kr. fyri at ganga uttan fyri bøgarðarnar í oynni, men í løtuni er ógreitt, hvussu nýggja skipanin skal umsitast, hvussu peningurin, sum kemur inn, skal brúkast og hvørjar ætlanirnar annars eru við ferðavinnuni í oynni.

Avgerðin at taka gjald frá øllum (uttan fólki við tilknýti til Mykines) fyri at fara út um bøgarðarnar í Mykinesi, tykist sum eitt stórt inntriv og almenna kjakið, sum avgerðin beinanvegin birti undir, prógvar, at hetta er ein sera grundleggjandi spurningur, sum neyðugt er at greina og loysa sum skjótast (sí kap. 3). - Er tað rætt, at allir føroyingar nú skulu rinda fyri at fara ein túr í hagan; hvar gongur markið og verður hetta nú galdandi allastaðni? Tað er ein vandi í, at Mykines nú verður fordømi og at onnur øki í landinum nú fara at gera tað sama við tí úrsliti, at tað fer at kosta, um ein skal út um bøgarðarnar.

Arbeiðsbólkurin metir, at hetta er ein sera óheppin gongd, sum eigur at verða steðgað og skipað í lóg, sum vit mæla til í kap. 3.

25 *Ramsarætlanin fyri Mykines:* http://www.us.fo/Default.aspx?ID=14180

Viðvíkjandi Mykinesi metir arbeiðsbólkurin, at tað er átrokandi neyðugt at seta tiltøk í verk sum tryggja eina skipaða og burðardygga ferðavinnu. Vit meta eisini, at landið hevur eina beinleiðis ábyrgd, fyrst og fremst at tryggja náttúru og djóralív á slíkum viðkvomum støðum sum í Mykinesi. Tí er neyðugt at fylgja við gongdini í Mykinesi eftir grannastevnusamtyktina og eigur landið at vera til reiðar at seta neyðug tiltøk í verk til tess at tryggja eina burðardygga ferðavinnu, sum komið verður inn á niðanfyri.

## 6.3 Tilmæli viðv. Mykinesi

Mett verður, at leiðin út í Hólmin (serliga lundalandið í Lamba) er so mikið serstakt øki, bæði í mun til náttúruvakurleika, fuglalív og tí at nógv gongd og harvið slit er í økinum, at friðingarátøk eiga at verða sett í verk fyri økið, ella í øllum førum eiga at verða umhugsað.

Náttúrufriðingarlógin inniheldir heimildir at seta í verk friðingarátøk fyri serlig øki.[26] Friðingar kunnu m.a. grundast á vakurleikavirði, sereyðkenni í landslagnum, plantugróður ella djóralív. Friðingartiltøk kunnu verða sett í verk við friðingarúrskurði frá friðingarmyndugleikanum ella við at landsstýrið friðar øki í kunngerð, eftir tilmæli frá yvirfriðingarnevndini.

Tað er neyðugt at kanna nærri, hvussu ferðafólkaferðslan kann leggjast soleiðis til rættis, at hon órógvar búfuglin sum minst. Av tí at sildberin er mest virkin í lýsingini og fyrrapart (smbrt. Bergi Olsen, fuglafrøðingi), eigur t.d. ongin ferðsla at vera í lundalandinum hendan partin av degnum ta tíðina, hann er virkin, t.e. í seinnu helvt av juli og í august. Eygleiðarar hava t.d. eisini víst á, at lendið og gøtan út í Hólmin farast illani, tá ið tað hevur regnað. Gøtan gerst runut og hevur hetta við sær, at fólk í størri mun ganga í bønum og traðka nýggjar gøtur og lundaholur niður. Hetta er somuleiðis nakað, sum møguliga eigur at hava við sær avmarkingar, tá tað snýr seg um gongd í vátum veðri, í hvussu er til ein góð gøta er gjørd út í Hólmin.

Mælt verður til, at kanningar verða settar í verk - í fyrstu syftu av lundalandinum í Lamba - sum kunnu staðfesta, hvussu lundin verður órógvaður sum minst. Við støði í hesum kanningum eiga at verða gjørd tilmæli sum áseta, hvussu ferðslan út í Hólmin kann skipast. Er grundarlag fyri at seta friðingar í verk fyri økið, eiga hesi tilmæli síðani at vera grundarlag undir friðingarúrskurði ella kunngerð, sum ásetir, hvussu gongdin út í Hólmin skal skipast.

Við støði í ásetingunum í Ramsar-álitinum umframt kanningum hjá m.a. fuglafrøðingum, eigur landsstýrið at heita á yvirfriðingarnevndina at seta friðingartiltøk í verk fyri Mykines. Í áheitanini eigur at verða neyvari grundgivið fyri, hvat ein friðing skal grundast á og hvørjar ítøkiligar avmarkingar eiga at verða ásettar.

*Ábyrgd:* UVMR (HIMR)

*Tíðarætlan:* 2017

Tá tað snýr seg um at skipa ferðavinnuna, í hesum føri við Mykinesi sum dømi, er tað, eins og umrøtt fleiri staðni áður, avgerandi at staðfesta uppgávu- og ábyrgdarbýtið hjá øllum pørtum, til dømis hjá hagastýrum, kommunu, landi, ferðasmiðjum, kunningarstovu o.s.fr. Tað er ein stórur vansi við galdandi skipan, at tað nettupp ikki er greitt, hvør hevur ábyrgd av hvørjum. Verður skipan sett í verk í Mykinesi, har jarðareigarar

26 *Talan er m.a. um § 6, stk. 1 nr. 2 og § 8 í náttúrufriðingarlógini*

fara at krevja gjald fyri at ganga í haganum, eru tað so hesir somu eigarar, sum hava fulla ábyrgd av at skipa og rinda fyri gonguleiðina út í Hólmin, t.e. at gera neyðugu skeltini, at gera eina hóskandi gøtu o.a.? Og hvør hevur ábyrgd av at tryggja, at hesi viðurskifti verða gjørd skynsamt, soleiðis at t.d. gøta og skelti skemma sum minst og at gøtan er góð og trygg at ganga á?

Verður friðingarúrskurður gjørdur fyri økið, eiga hesir spurningar at vera partur av viðgerðini. M.a. inniheldur náttúrufriðingarlógin reglur um skelting uttan fyri bygt øki, sum sjálvsagt eiga at verða brúktar í hesum føri.

Undir øllum umstøðum er galdandi skipan ikki greið og dømi við Mykinesi vísir, at tað er neyðugt at skilmarka greiðari, hvørja ábyrgd og skyldur jarðareigarar hava, hvørjar skyldur kommunan hevur og hvørjar skyldur og ábyrgd liggja hjá landinum, ferðasmiðjum og tí einstaka ferðandi. Mett verður sum nevnt í kap. 3, at tað er neyðugt at dagføra lóggávuna á økinum fyri at fáa greidleika kring hesi viðurskifti.

Tað er sum nevnt ein avbjóðing at skipa ferðavinnuvirksemi á burðardyggum grundarlagi á einum staði sum Mykinesi. Slíkt tekur tíð at seta í verk, ikki minst tí at skipanin skal taka atlit til tey fastbúgvandi, sum eru ein týðandi partur og sum í so stóran mun, sum til ber, eiga at vera við til at mynda lokalu ferðavinnuna. Tá fólkatalið er so avmarkað og miðalaldurin so høgur, kann hetta sjálvsagt vera ein avbjóðing, hóast tað er útgangsstøðið.

Niðanfyri verður komið við einum boði uppá, hvussu ferðavinnan í Mykinesi kundi verið skipað. Hetta er einasmest ætlað sum eitt íkast til kjakið og møguliga sum íblástur til, hvussu viðurskiftini kunnu skipast.

## 6.4 Uppskot til skipan fyri Mykines

Í tilgongdini at orða eitt uppskot til eina skipan fyri Mykines er tað vorðið greitt, at rættiliga breið semja tykist vera millum Mykinesfólk um fleiri av meginreglunum fyri eini burðardyggari ferðavinnu í oynni.

Semja tykist vera millum Mykinesfólk um, at gjald eigur at verða tikið frá ferðafólki, ið so ella so eigur at fella til oynna, og at tað er tørvur á at avmarka og skipa ferðsluna út í Hólmin betur. Hetta verður m.a. eisini undirbygt av tveimum samrøðum, ið Tórður Mikkelsen hevði í útvarpssendingini "við Tórði á túri" 13. mars 2017, har ferðavinnan í Mykinesi var høvuðsevni. [27] Í samrøðunum kemur m.a. fram, at partur av peninginum, sum fer at koma inn, eigur at fella til jarðareigararnar, men at bróðurparturin av peninginum eigur at fara í ein grunn, sum m.a. hevur til endamáls at fríðka um í oynni, gera ábøtur o.a. Millum annað at byggja uppaftur niðurfalnar grótgarðar og torvhús.

Tað er onki at ivast í, at Mykines er og verður ein perla í ferðavinnuhøpi og at ferðafólk altíð vilja leita sær út í Mykines. Inntøkugrundarlagið frá ferðavinnuni er og verður tískil gott. Arbeiðsbólkurin er samdur um, at tað er avgerandi fyri framhaldandi menning og undirtøku fyri ferðavinnuni í oynni, at ferðavinnan verður betur skipað. Sum nevnt er spurningurin um gjald trupul at taka støðu til, áðrenn spurningurin er lýstur gjølliga og politiska skipanin hevur gjørt av, hvat hon vil.

Sum útgangsstøði kann peningur sjálvsagt takast frá skipaðum ferðavinnuvirksemi, har goldið verður fyri t.d. ferðaleiðara og mat. Málið eigur í fyrstu syftu at vera at tryggja nøktandi útboð av fyriskipaðum túrum og eggja fólki at brúka hesar, heldur enn at ganga sjálv.

Útgangsstøðið eigur somuleiðis at vera, tá gjald verður tikið, at ein partur av vinninginum fellur aftur til oynna, soleiðis at peningurin kann verða brúktur til at menna og skipa ferðavinnuna í oynni betur. Tað er

*27 KVF – "við Tórði á túri" frá 13. mars 2017*

somuleiðis mennandi fyri allar partur, um peningur eisini verður nýttur til onnur uppbyggjandi og fríðkandi átøk í oynni, sum víst verður á omanfyri. Á henda hátt kann Mykines gerast ein fyrimynd fyri, hvussu stóran týdning ferðavinnan kann hava í mun til útjaðaramenning, trivnað og eina burðardygga ferðavinnu.

Sum vit áður hava víst á, er endamálið við at skipa ferðavinnuna í t.d Mykinesi í høvuðsheitum at:

- verja náttúruna

- skapa nýggjar inntøkur og at fáa ferðavinnuna at gerast eina týðandi vinnu í føroyska og lokala búskapinum

- Taka tey fastbúgvandi við upp á ráð og verja teirra áhugamál (m.a. við at tryggja, at pengar liggja eftir á staðnum)

- skapa góðar upplivingar fyri ferðafólk (m.a. við atliti til trygd, góða kunning, skipað viðurskifti og at tryggja eitt nøktandi støði og breidd av tilboðum)

Útgangsstøðið er, at tað framhaldandi skal vera frítt hjá øllum at koma út í Mykines. Trupulleikin við ferðsluni út í Hólmin er millum kl. 11:00 og 17:00, tá Jósup kemur og fer við ferðafólki. Tað er í hesum tíðarbilinum at tað er átrokandi at seta avmarkingar fyri ferðsluni út í Hólmin. Hetta kann gerast við at fyriskipa túrar við ferðaleiðara og við at áseta hægst loyvda ferðafólkatal pr. túr. og pr. dag. Útgangsstøðið eigur at vera, at bert góðkendur ferðaleiðari kann fara við fólki út.

Í tráð við tilmælini í kap. 2 mælir arbeiðsbólkurin til, at verkætlanarsett starvsfólk undir menningardeildini á VFI fær ábyrgd av at samskipa og menna eina burðardygga ferðavinnu í Mykinesi í samstarvi við kommunu, borgararnar á staðnum og vinnuna.

Starvsfólkið eigur at stuðla og vegleiða pørtunum í at byggja upp eina ferðavinnu í økinum og at verða bindilið millum avvarðandi partar og myndugleikar, sum mugu samstarva, skal talan vera um eina væl skipaða ferðavinnu.

Grundað á niðurstøðu frá friðingarmyndugleikanum um avmarkingar í ferðsluni út í Hólmin, metir arbeiðsbólkurin, at fylgjandi skipan kundi verið hóskandi:

1. Ein Mykines-bólkur verður skipaður. Hesin kann t.d. verða settur saman soleiðis: Mykinesfólk velja tvey umboð við servitan um staðbundnu viðurskiftini, kommunan eitt, eitt umboð frá Visit Vágar og eitt umboð frá Visit Faroe Islands (og møguliga eitt umboð við servitan innan náttúru- og djóravernd). Nevndin skipar seg sjálv.

2. Mykines-bólkurin ger nærri reglur um ferðaleiðarar, ásetir gjald fyri fyriskipaðar túrar, sum skulu fella til oynna, og ger av, hvussu inntøkurnar skulu umsitast og brúkast. Møguliga skal bólkurin eisini seta hægst loyvda tal av fólki, ið fer út í Hólmin um dagin.

3. Avvarðandi partar og myndugleikar fáa uppskotið til reglugerð til ummælis, áðrenn tað verður sett í gildi.

# Fylgiskjal 1 – Fundarrøð kring landið

## Fundarrøð við ferðavinnuaktørar kring landið

Skrivaratoymið hevur hildið uml. 60 fundir við yvir 100 persónar, umframt luttikið á ráðstevnum, hildið framløgur o.a.

**Februar 2016:**

Visit Faroe Islands, Guðrið Højgaard og Johannes Jensen

Niclas Heri Jákupsson

62N, Hildur Djurhuus

Visit Tórshavn, Theresa T. Kreutzmann

***Norðoyggjar:***

Norðoya Kunningarstova, Elsa Olsen

Norðlýsið, Olivur Joensen o.o. frá Visit Kalsoy

Klaksvíkar kommuna, Jógvan Skorðheim, borgarstjóri og Palli Ziskasen, mentanarleiðari

Luttøka á aðalfundinum hjá Ferðavinnufelagnum, har arbeiðsbólkurin leggur fram um arbeiðið við heildarætlanini

Strandfarðaskip Landsins, Hilmar Eliasen, stjóri

**Mars 2016:**

***Í Vágum:***

Visit Vágar, Sølvi Símunarson

Jósup, Maja Henriksen

Atlantic Airways, Johanna á Bergi, stjóri og Árni Olsen, marknaðarstjóri

Vága Floghavn, Jákup Sverri Kass, stjóri

Tróndur Niclasen, bóndi í Bø

Olivia Døgg Fríðfinnsdóttir, bach. Í antropologi, skrivar høvuðsuppgávu í upplivingarbúskapi/ferðavinnu

***í Havn:***

Útoyggjafelagið, Olga Biskupsstøð

FNÚ, Elisabeth S. Olsen

Tórshavnar Havn, Annfinn Hjelm

í Suðuroy:

Vágs kommuna, Dennis Holm, borgarstjóri

Kunningarstovan, Heidi Kilgour

Kunningarstovan á Tvøroyri, Poula Strøm

Økisferðavinnufelagið, Arni Nielsen

Tvøroyar kommuna, Kristin Michelsen, borgarstjóri

SALT, Ólavur Rasmussen

***Í Eysturoy:***

Sunda kommuna, Heðin Zachariassen, borgarstjóri og Noomi Rasmussen

Runavíkar kommuna, Torbjørn Jacobsen, borgarstjóri

Kunningarstovan í Runavík, Bárður Højgaard

Gjáargarður, Eirikur Suni Danielsen

Luttøka á ferðavinnudegi í NLH

Búnaðarstovan, Tróndur Leivsson, stjóri

Greengate, Fríðun Jacobsen og Marni Hjalnafoss

Norðurlandahusið, Sif Gunnarsdóttir, stjóri

**Apríl 2016:**

Elin Brimheim, fyrrv. Stjóri á Samvit

Norðlýsið, Birgir Enni

Bóndafelagið, Sigert Patursson

Kirkjubøgarður, Jóannes og Guðrið Patursson

Ferðaleiðarafelagið, Bergur Samuelsen og Elin Hentze,

Náttúrufrøðingar: Anna Maria Fossaa, Janus Hansen, Jan Sørensen og Bergur Olsen,

Nax, Eyðun Berg, stjóri

Rib62, Signar Signarsson.

Arbeiðsferð í Íslandi: Fundir við m.a. Ferðamálaráðið, Umhvørvismálaráðið, Visit Reykjavík, ferðasmiðir o.o.

**Maj-juni:**

Arbeiðsferð í Skálavík

Arbeiðsferð við Ramsar nevndini í Mykinesi

Søvn Landsins, Andrass Mortensen, stjóri og Erland Viberg,

KF, fund við borgarstjórar í Kommunufelagnum

Framløga á arkitekturdøgum

Heilsu- og innlendismálaráðið, Anni á Hædd

Umboð fyri Sílaveiðufelagið

**Juli - oktober:**

MB Tours, Magni Mouritsen

Tor Shipping, Hentzar Steingrímsson

Hiking.fo, Pól Skarðenni

Fiskimálaráðið, Rógvi Reinert, aðalstjóri

Fiskimálaráðið, Marjun Magnussen og Ulla Vang

Fiskimálaráðið, Høgni Hoydal, landsstýrismaður

Fuglafjarða kunningarstova, Kristina Berg

Fund við allar kunningarstovurnar

Bjørn Patursson, Koltur

Vestmanna Tourist Center, Gunnar Skúvadal

Sørvágs kommuna, Suni Jacobsen, borgarstjóri

Mykines, Heini Heinesen

Hugskotið/Tórshavnar Kommuna, Jónhild Rasmussen og Súsanna Laursen

Ymisk lesandi

## Fylgiskjal 2 – Ferðavinnukanning frá Hagstovuni

Visit Faroe Islands

ATT: Guðrið Højgaard

Gongin 9

Boks

Fo-100 Tórshavn

Argir, tann 09.01.2017

### Ferðavinnukanningin 2015



## Samandráttur

Vøksurin í incoming ferðavinnuni heldur fram og var umsetningurin frá útlendskum ferðafólkum í 2015, 665 milliónir krónur. Hetta er ein vøkstur upp á 89 milliónir krónur, sum svarar til ein vøkstur upp á 13,4%. Havast skal í huga, at hetta árið eisini var sermerkt á tann hátt, at sólarmyrking var í mars mánaði. Kanning vísir, at at útlendsk ferðafólk keyptu vørur og tænastur fyri góðar 110 milliónir krónur, sum var umleið 65 milliónir krónur meira enn í mars 2014. Sambært vinnuni er hásesongin um at vera útseld, tað vil siga, at ilt er at taka ímóti fleiri gestum í juni, juli og august mánaði.

Greiningin av úrslitinum vísir, at í 2015 var stór framgongd hjá øllum ferðavinnubólkum. Sí nærri undir: Úrslitið av kanningini 2015.

## Kanningarháttur:

Kanningin lýsir beinleiðis ávirkanina á ferðavinnuna í Føroyum og á tann føroyska búskapin frá eftirspurninginum av vørum og tænastum frá útlendskum ferðfólki. Hetta verður gjørt við at lýsa beinleiðis søluna til ferðafólkini.

Lyklatølini í lýsingini av búskaparliga týdninginum eru:

- Sølan til útlendsku ferðafólkini
- Virðisøkingin, ið harav stendst
- Hvussu stórt var meirvirðisgjaldið
- Hvussu nógv eru ársverkini, sum standa fyri veitingunum til útlendsku ferðafólkini

Kanninginí 2015 umfatar 342 respondentar, og liggur responsurin á 58,6%. Hetta er ikki heilt nøktandi. Ein orsøk kann vera, at fleiri fyritøkur/feløg ikki eru beinleiðis partur av ferðavinnuni, tó at málbólkurin í hesi ferðavinnukanning er allar fyritøkur, ið hava eitt viðskifti við útlendsk ferðafólk.

Í mun til kanningina fyri 2014 eru nakrir respondentar (fyritøkur) skiftir út, tí hesi feløg ikki hava nakað viðskifti við útlendsk ferðafólk, tó at tey hava sølu til útlond (útflyta vørur) ella hava einki viðskifti yvirhøvur við útlendsk ferðafólk.

Sum dømi kan nevnast: SP/F Norðfra, og onnur líknandi feløg ið útflyta vørur/tænastur ella Landssjúkrahúsið, ið veitir tænastur til føroyska samfelagið við hjálp av útlendskari arbeiðsmegi (læknar, sjúkrarøktarfrøðingar o.l. starvsfólk við serkunnleika).

Eitt annað dømi er innanoyggja persónsflutningur. Her er tað eitt úrval av fyritøkum, ið reka flutning av ferðafólki við bussi, hýruvognskoyring, ella sum leiga bilar út til tey, ið hava tørv á flutningi. Við hesum er allur flutningur við lastbilum og vørubilum útilokaður, tó at tað kunnu finnast fyritøkur, ið eru umboðaðar, tí hesar reka bæði lastbilafluting og persónsflutning. Spurningurin er so, um hesi feløg skulu við ella ikki. Hagstovan hevur avgjørt, at hesi feløg skulu teljast við fyri at røkka endamálinum, sum er at finna út av, hvussu nógv útlendsk ferðafólk keypa fyri av vørum og tænastum í einum ári. Ávirkanin frá umsetninginum verður nærri viðgjørdur undir yvirskriftini: Góðskan í kanningarháttinum.

Spurningarnir, sum respondentarnir (fyritøkur/heimildarfólk) hava fingið, eru:

- hvussu stórur var umsetningurin hjá fyritøkuni í alt uttan mvg?
- hvussu stórur prosentpartur av hesum var søla til útlendsk ferðafólk?
- hvussu nógv vóru ársverkini í fyritøkuni?

Respondentarnir (fyritøkur/heimildarfólk) verða vald út frá vinnugreinaðu virkisskránni og út frá kunnleika annars um virksemið hjá respondentunum.

## Góðskan í kanningarháttinum:

Úrslitið av kanningini er kannað fyri normalitet, ið merkir, at dátur hava eitt býti, sum kan sigast at vera normalbýtt. Stikkprøva-úrslitið er kannað og testað og vísir úrslitið, at dátur eru í lagi. Mynd 1 vísir Z-virði, plottað sum funktión av umsetninginum fyri 2015 í milliónum krónum.

Mynd 1: Umsetningurin sum funktión av Z-virði




Myndin vísir, at dátur eru á einari beinari linju, sum merkir, at kravið til datakonsistens er rokkið, og merkir eisini, at estimeringin av umsetninginum fyri populatiónini N og estimeringin av umsetninginum av sølu til útlendingar kann setast í verk. Tó eru óvissur til staðar, sum kunnu ávirka úrslitið av estimeringini.

1. Smærri óvissur kunnu standast av, at fyritøkur kunnu vera dotnar burtur í millum og av veikleikum í upprokningini.

Tann fyrsta óvissan stendst av blandaðum virksemi hjá respondentinum. Her er støðan tann, at tað ikki ber til at býta raksturin sundur í ferðavinnu og aðra vinna. Hetta hevur við sær, at tíðum er roknskaparligi umsetningurin hjá respondentinum væl størri, enn um talan bert var um rakstur í ferðavinnuni. Úrslitið av brøkinum: Søla til útl. ferðafólk/ums. í alt gerst alt ov lítil, tí at umsetningurin í alt er alt ov stórur í mun til veruliga umsetningin, um talan bert var um rakstur í ferðavinnuni.

2. Fyritøkurnar hava mett um partin av umsetninginum, ið stavar frá sølu til útlendsk ferðafólk, og góðskan á uppgerðini veldst sostatt um, hvussu rætt hesar fyritøkur hava mett.

Harnæst er tað sjálv metingin eftir bestu sannføring um, hvussu nógv útlendsk ferðafólk keypa fyri, tá tey eru her í Føroyum. Orsøkin til hesa umbøn "eftir bestu sannføring" er hon, at sera fáir respondentar skráseta sína sølu upp á ávikavist føroyingar og útlendingar. Ein søla er ein søla, um tað so er til ein føroying ella útlending. Av hesum ávum hevur Hagstovan valt at heita á respondentarnar um at gera eina varisliga meting av søluni til útlendsk ferðafólk. Heldur vera varin enn at skjóta langt og høgt yvir mál.

3. Tann statistiska óvissan er nú avmarkað til háttin at estimera umsetningin o.s.f.

Afurat hesum kemur so eisini, at óvissan partvís er grundað á hagfrøðiligu metoduna til estimering av úrslitinum. Afturat hesum koma so: feilir og ótalt, tvs. skrásetingarfeilir hjá respondentum, umframt nonrespons, m.a. at nøkur feløg ikki vóru til at fáa fatur á, sjálvt um tey vórðu útvald.

Tað skal viðmerkjast, at allir stóru aktørarnir innan ferðavinnu í Føroyum luttaka í hesi kanning og svara spurnablaðnum. Stikkprøvarnir fyri 2015 vístu, at: 58,6% svaraðu spurnablaðnum, 41,4% svaraðu ikki, t.v.s. non-respons. Fyri at røkka eini umboðan, ið kann sigast at vera nøktandi fyri estimeringina, eigur responsin upp á spurnablaðið at vera oman fyri tey 65 – 70%.

Leypandi broytingar verða gjørdar í arbeiðinum at estimera søluna til útlendsk ferðafólk, m.a. viðførir hetta broytingar í dátugrundarlagnum og sjálvum útrokningarháttinum.

1. Feløg/heimildarfólk eru tikin burturúr, tí hesi vórðu mett at vera uttan fyri málbólkin.
2. Feløg/heimildarfólk eru løgd afturat, tí hesi hava ikki verið við í kanningini áður.
3. Samansetingin av stratabólkunum er broytt, tí feløg/heimildarfólk hava verið bólkað á skeivum grundarlagi.

4. Hagstovan er í tøttum samstarvi við feløgini fyri at menna kanningararbeiðið. M.a. verða givnar upplýsingar enduskoðaðar, um orsøk er til tess.

Sjálv estimatiónin verður roknað sum ein stratifiserað estimering við atliti at 7 ferðavinnubólkum, sum eru:

- Millumlanda flutningsfeløg, cruise-vinna og ferðaskrivstovur
- Gistingar og annað hotel- og gistingarvirksemi
- Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur
- Persónsflutningur innanlands og leiga av bili
- Upplivingar og aðrir aktivitetir
- Klæðir og fótbúnaður
- Onnur søla

*Útrgreining av innihaldi í bólkunum er at finna á síðu 13.*

Eitt 95% konfidens interval verður roknað við atliti at tí estimeraða umsetninginum av søluni til útlendsk ferðafólk. Við 5% signifikansi kann staðfestast, at 95% av søluni liggur innan fyri ovara og niðara mark fyri konfidens interval. Við hesum átøkum tryggjar Hagstovan, at góðskan er í lagi og at teir feilir, ið eru/verða funnir, eru/verða rættaðir, og at óvissan leypandi verður minkað.

## Rokniháttur:

Populatiónin N = 342 respondentar er býtt sundur í somu 7 ferðavinnubólkar, eisini kallaðir stratabólkar, sum víst omanfyri. Stratabólkarnir eru vektaðir eftir tali av respondentum í bólkunum, í mun til samlaða talið av respondentum. Sí talvu 1: Stratavektir.

Stratavektin: Er lutfallið millum N-populatión í stratabólkinum / N-populatiónin í kanningini, t.v.s. samlaða talið av respondentum í kanningini. Tvs. 13/342 = 0,0380. Sí talvu 1: Stratavektir.

**Talva 1: Stratavektir**

| **Stratabólkur** | **N1** | **N2** | **N3** | **N4** | **N5** | **N6** | **N7** | **N** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av N-populatión í stratabólki | **13** | **26** | **68** | **72** | **75** | **49** | **39** | **342** |
| Stratavekt pr. bólk | 0,0380 | 0,0760 | 0,1988 | 0,2105 | 0,2193 | 0,1433 | 0,1140 | 1,0000 |

*Øll tøl í talvuni eru frá kanningini í 2015*

Nú fýra kanningar eru gjørdar, sum umfata tíðarskeiðið 2011 – 2015, kann staðfestast, at ymisk onnur viðurskifti hava eisini gjørt seg galdandi, tá ið estimeringin skuldi gerast. Millum annað var fyri 2014 neyðugt at gera eina meting av gongdini hjá ávísum feløgum. Orsøkin var, at kanningin ikki fekk nóg stóra undirtøku millum respondentarnar hetta árið. Metingin, sum var ein framskriving, bygdi á roknskapartøl fyri 2014 hjá hesum respondentum og lutfallið millum umsetningin alt 2013 og umsetningin av søluni til útlendingar fyri 2013.

**Talva 2: Úrvalsbrøkur**

| **Stratabólkur** | **N1** | **N2** | **N3** | **N4** | **N5** | **N6** | **N7** | **N** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av N-populatión í stratabólki | 13 | 26 | 68 | 72 | 75 | 49 | 39 | 342 |
| Stikkprøvavekt pr. stratabólk | 1,0000 | 0,8462 | 0,6029 | 0,6111 | 0,4800 | 0,7755 | 0,7949 | 0,6579 |
| Stikkprøvastødd pr. 2015, t.v.s. tal av respons í 2015. | **13** | **22** | **41** | **44** | **36** | **38** | **31** | **225** |

*Øll tøl í talvuni eru frá kanningini í 2015*

Úrvalsbrøkurin ella stikkprøvavektin: Er lutfallið millum N-populatión í stratabólkinum / n-stikkprøvastødd fyri stratabólkin, tað eru teir respondentar, ið hava svarað spurnablaðnum ella umvegis telefon hava avgreitt spurningarnar. Dømi N2: 22/26 = 0,8462. Sí talvu 2: Úrvalsbrøkur.

Samlaða talið av N í stikkprøvastødd kann gott vera størri enn talið av respondentum, ið hava svarað spurnablaðnum, sum er sent út. Hetta merkir, at tað eru nakrir respondentar, ið hava virksemi í fleiri bólkum. Tað kann tildømis verða í bólkunum: Gistingar og annað hotelvirksemi umframt matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur.

Arbeiðið við at estimera søluna til útlendsk ferðafólk, krevur meira enn bert at hava fokus á sjálva søluna til útlendsk ferðafólk og ársverkini, sum er partur í hesum virksemi. Fyri at fáa lýst innkomandi ferðavinnuna objektivt, er neyðugt eisini at finna fram til, hvussu stórur umsetningurin hjá hesum feløgum er og hvør rakstrarkostnaðurin er fyri at finna fram til virðisøkingina, sum hesin partur av ferðavinnuni skapar. Harafturat kemur so eisini meirvirðisgjald fyri ymsar vørur og tænastur, sum útlendsku ferðafólkini keypa.

Tað samlaða talið av ársverkum verður upplýst av respondentunum og talt saman fyri hvønn stratabólk. Arbeiðshátturin, ið nýttur er fyri at finna talið av ársverkum, sum skal til fyri at skapa umsetningin "søla til útlendsk ferðafólk", er: Søla til útlendingar / Samlaða umsetningin (tað er nettosølan) x Samlað tal av ársverkum.

## Úrslitið av kanningini í 2015

Var ein vøkstur upp á 13,4% í mun til 2014. Í peningi svarar hetta til uml. 89 mill. kr. Tann størsti %-vøksturin er at finna í bólkinum persónsflutningur innanlands og leiga av bili, har framgongdin var 37,8% og svarar hetta til 17 milliónir krónur. Sannlíkt er, at sólarmyrkingin í mars mánaði hevur havt sína ávirkan á úrslitið fyri persónsflutning og leigu av persónbilum.

Í krónum var størsti vøksturin í bólkinum: Millumlandaflutningsfeløg, cruise-vinna og ferðaskrivstovur. Her vaks sølan við 38 milliónum krónur.

Gistingar og hotelvirksemi vaks við 20,0% og svarar hetta til umleið 18 milliónir krónur. Viðmerkjast skal, at Airbnb og Booking.com ikki eru tikin við í útrokningina, tí at ongar upplýsingar eru tøkar frá hesum virkseminum enn.

Eisini tann parturin av ferðavinnuni, sum tekur sær av at veita tænastur sum upplivingar, t.v.s. útferðir á landi og á sjónum, umframt aðrar aktivitetir til útlendsk ferðafólk, hevði framgongd í 2015. Vøksturin í mun til 2014 var 22,5%, ið svarar til 9 milliónir krónur. Yvirlit yvir gongdina er at finna á síðunum 9 - 12.

**Talva 1: Úrslitið av ferðavinnukanningini 2015 í mun til 2014 í milliónum krónum**

| **Blk.** | **Ferðavinnubólkar** | **2014** | **2015** | **Broyting í mió. kr.** | **Broyting í %** |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Millumlandaflutningsfeløg, cruise-vinna og ferðaskrivstovur | 361 | 399 | 38 | 9,5 |
| 2 | Gistingar og annað hotelvirksemi | 72 | 90 | 18 | 20,0 |
| 3 | Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur | 67 | 73 | 6 | 8,2 |
| 4 | Persónsflutningur innanlands og leiga av bili | 28 | 45 | 17 | 37,8 |
| 5 | Upplivingar og aðrir aktivitetir | 31 | 40 | 9 | 22,5 |
| 6 | Klæðir og fótbúnaður | 10 | 11 | 1 | 9,1 |
| 7 | Onnur søla | 6 | 8 | 2 | 25,0 |
| | **Estimeraður umsetningur í alt** | **576** | **665** | **89** | **13,4** |

*Mynd 2 niðan fyri vísir gongdina av umsetninginum frá søluni til útlendsk ferðafólk í tíðarskeiðinum 2011 – 2015.*

**Mynd 2: Søla til útlendsk ferðafólk fyri árini 2011 – 2015 í milliónum krónum**




**Talva 2: Søla til útlendsk ferðafólk fyri árini 2011 – 2015 í milliónum krónum**

| lk. | Ár | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Millumlandaflutningsfeløg, cruise-vinna og ferðaskrivstovur | 254 | 308 | 333 | 361 | 399 |
| 2 | Gistingar og annað hotelvirksemi | 58 | 61 | 70 | 72 | 90 |
| 3 | Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur | 54 | 58 | 67 | 67 | 73 |
| 4 | Flutningur innanlands og leiga av bili | 21 | 22 | 26 | 28 | 45 |
| 5 | Upplivingar og aðrir aktivitetir | 18 | 29 | 30 | 31 | 40 |
| 6 | Klæðir og fótbúnaður | 7 | 8 | 10 | 10 | 11 |
| 7 | Onnur søla | 3 | 5 | 5 | 6 | 8 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Estimeraður umsetningur í alt | 416 | 492 | 541 | 576 | 665 |
| | 95% Konfidensinterval + | 501 | 576 | 626 | 648 | 768 |
| | 95% Konfidensinterval - | **331** | **407** | **457** | **504** | **563** |

**Talva 3: Søla til útlendsk ferðafólk fyri árini 2011 – 2015 í %**

| **Ár** | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| Millumlandaflutningsfeløg, cruise-vinna og ferðaskrivstovur | 61,1 | 62,6 | 61,6 | 62,7 | 60,0 |
| Gistingar og annað hotelvirksemi | 13,9 | 12,4 | 12,9 | 12,5 | 13,5 |
| Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur | 13,0 | 11,8 | 12,4 | 11,6 | 11,0 |
| Flutningur innanoyggja og leiga av bilum | 5,0 | 4,5 | 4,8 | 4,9 | 6,8 |
| Upplivingar og aðrir aktivitetir | 4,3 | 5,9 | 5,5 | 5,4 | 6,0 |
| Klæðir og fótbúnaður | 1,7 | 1,6 | 1,8 | 1,7 | 1,7 |
| Onnur søla | 0,7 | 1,0 | 0,9 | 1,0 | 1,2 |
| **Umsetningur í alt** | **100,0** | **100,0** | **100,0** | **100,0** | **100,0** |

Ársverkini eru estimerað til umleið 470,6 fulltíðarstørv, sum taka sær av útlendsku ferðafólkunum og er hetta ein vøkstur upp á 84,7 fulltíðarstørv síðani 2011.

**Talva 4: Roknað ársverk í incoming ferðavinnuni fyri tíðarskeiðið 2011 – 2015**

| **Ár** | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| Ársverk | 385,9 | 396,3 | 411,9 | 412,5 | 470,6 |

Í alt eru umleið 900 ársverk knýtt at kjarnuøkjunum hjá føroysku ferðavinnuni. Hesi eru: Millumlandaflutningsfeløg, cruise-vinna, ferðaskrivstovur, gisting, annað hotelvirksemi, matstovur, skeinkistøð, persónsflutningur innanlands, leiga av bili umframt upplivingar og aðrir aktivitetir.

**Talva 5: Virðisøking og meirvirðisgjald í milliónum krónum fyri tíðarskeiðið 2011 - 2015**

| **Ár** | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| Virðisøking | 165 | 192 | 215 | 225 | 235 |
| Meirvirðisgjald | 19 | 22 | 25 | 27* | 30* |

**Árini 2014 – 2015 eru framskrivað.*

Virðisøkingin ínnan ferðavinnuna er vaksin úr 165 milliónum í 2011 til 235 milliónir kr. í 2015. Hetta er ein vøkstur upp á 29,8%. Meirvirðisgjaldið, ið verður skapt av ferðavinnuni, er umleið 30 milliónir og er vaksið úr 19 míllíónum krónum í 2011. Í 2014 var meirvirðisgjaldið umleið 27 milliónir krónur.

**Talva 6: BTÚ í mun til virðisøking í milliónum krónum**

| Ár | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ | 13.254 | 13.650 | 14.678 | 15.536 | 16.505 |
| Virðisøking | 165 | 192 | 215 | 225 | 235* |
| Virðisøking í % av BTÚ | 1,2 | 1,4 | 1,5 | 1,4 | 1,4 |

**Árið 2015 er framskrivað.*

Samanborðið við BTÚ, er incoming ferðavinnan vaksin í mun til BTÚ, sum er tann samanlagda virðisskapanin í Føroyum. Talva 6 vísir, at virðisøkingin innan ferðavinnuna er vaksin úr 1,2% av BTÚ í 2011 til 1,4% í 2015. Hetta kann tykjast lítið, men havast skal í huga, at BTÚ er vaksið munandi meira í sama tíðarskeiði í mun til incoming ferðavinnuna. Av tí sama sæst vøksturin ikki aftur, tá ið roknað verður sum eitt lutfall av BTÚ.

Í mun til útflutningin av vørum sæst, at ferðavinnan nú er næstan komin upp á 10% av útflutningsvirðinum.

**Talva 7: Umsetningur frá útl. ferðafólki í mun til vøruútflutningin í milliónum krónum**

| Ár | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| Útflutningur av vørum | 5.407 | 5.515 | 6.104 | 6.368 | 6.852 |
| Umsetningur frá útlendskum ferðafólki | **416** | **492** | **541** | **576** | **665** |
| Ums. frá útl. ferðafólki í % av útflutninginum | 7,7 | 8,9 | 8,9 | 9,0 | 9,7 |

**Talva 8: Umsetningur frá útl. ferðafólki í mun til tænastuútflutningin í milliónum krónum**

| Ár | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| Útflutningur av tænastum | 1.422 | 1.545 | 1.645 | 1.988 | 2.272 |
| Umsetningur frá útlendskum ferðafólki | **416** | **492** | **541** | **576** | **665** |
| Ums. frá útl. ferðafólki í % av tænastuút-flutninginum | 29,3 | 31,8 | 32,9 | 29,0 | 29,3 |

**Talva 9: Umsetningur frá útl. ferðafólki í mun til vøru- og tænastuútfl. í milliónum krónum**

| Ár | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| Útflutningur av vørum og tænastum | 6.829 | 7.061 | 7.749 | 8.356 | 9.124 |
| Umsetningur frá útlendskum ferðafólki | **416** | **492** | **541** | **576** | **665** |
| Ums. frá útl. ferðafólki í % av vøru- og tænastuúflutninginum | 6,1 | 7,0 | 7,0 | 6,9 | 7,3 |

## Sólarmyrkingin í mars 2015

Tølini í talvu 8 niðan fyri vísa úrslitið av kanningini, ið var gjørd í sambandi við sólarmyrkingina í 2015. Roknað var við, at ein ferðafólkainnrás fór at taka seg upp og mett varð frammanundan, at eini 10 – 12 túsund ferðafólk fóru at vitja í Føroyum um 21. mars 2015. Fyri at kunna samanbera úrslitið, varð avgjørt, at kanningin skuldi umfata allan mars mánað 2015 og mars mánaði 2014 til at samanbera við.

Úrslitið var ein vøkstur í umsetninginum frá 2014 til 2015. Fyri mars 2015 var samlaði umsetningurin estimeraður til áleið 192 mill kr. og gevur hetta ein vøkstur upp á 61 mill. kr. ella 46% samanborið við mars 2014. Umsetningurin frá sølu til tey mongu útlendsku ferðafólkini var 110,7 milliónir krónur samanborðið við 50 milliónir krónur í mars 2014. Ein vøkstur upp á 121.2%.

**Talva 8, Høvustøl frá kanningini (umsetningur í krónum)**

| | Mars 2015 | Mars 2014 | Munur | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| Estimeraður umsetningur. í alt (N) | 192.394.692 | 131.877.690 | 60.517.002 | 45,89 |
| | | | | |
| Estimeraður umsetningur frá útlendingum (N) | 110.698.369 | 50.034.554 | 60.663.814 | 121,24 |
| | | | | |
| Miðal ums. pr. mánað 2014 (N) (úr MvG skrá) | | 188.562.590 | | |
| | | | | |
| Estimeraður miðalums. pr. felag (N) (ums. í alt) | 748.617 | | | |
| Konfidensinterval 95% + | 963.249 | | | |
| Konfidensinterval 95% - | 533.986 | | | |
| | | | | |
| Estimeraður miðalums. pr. felag (N) (ums. útlendingar) | 430.733 | | | |
| Konfidensinterval 95% + | 586.500 | | | |
| Konfidensinterval 95% - | 274.966 | | | |
| | | | | |
| Est. arbeiðstímar í alt (N) | 297,911 | 275.118 | 22.793 | 8,28 |
| Arb. tímar í alt: Stk.pr. (n) | 169.115 | 158.778 | 10.336 | 6,51 |
| Eyka tímar mars 2015: Stk. pr. (n) | 7.907 | 4.379 | 3.528 | 80,57 |
| | | | | |
| Populatiónin - N | 257 | | | |
| Stikkprøvapopulatiónin – n | 94 | | | |

Spurnakanningin vísti, at nakað av eyka arbeiðsmegi varð nýtt fyri at nøkta eftirspurningin av vørum og tænastum frá ferðafólki. Respondentanir hava upplýst, at 7.907 arbeiðstímar vórðu nýttir, hetta er áleið 4 ársverk, t.v.s. fulltíðarstørv. Hetta talið skal takast við fyrivarni, men merkir í høvusheitum, at vinnan sum heild hevur havt resurssir tøkar og hevur verið væl fyrireikað. Í alt brúkti vinnan áleið 297.911 arbeiðstímar, samsvarandi 143 ársverk í mars 2015 sammett við 275.118 tímar í mars 2014.

Kanningin í sambandi við sólarmyrkingina kann ikki beinleiðis samanberast við tølini í árligu kanningini fyri 2015, tí ikki allar atknýttar vinnur vórðu tiknar við í mars 2015. Millum annað vóru matvøruhandlar ikki tiknir við í hesi kanning, tí mett varð, at ferðafólkasamansetingin var soleiðis háttað, at hon hevði ein

serligan áhuga í sólarmyrkingini og at gestirnir tí vitja fyrst og fremst matstovur, fara útferðir og til aðrar aktivitetir og møguliga vitja handlar, ið selja klæðnavørur.

## Niðurstøða

Samanumtikið vaks incoming ferðavinnan í 2015 við 13,4% og umsetningurin til útlendsk ferðafólk var 665 milliónir krónur. Allir stratabólkar í árligu kanningini 2015 høvdu framgongd. Eisini kann staðfestast við kanningini í mars 2015, at sólarmyrkingin var við til at geva øllum stratabólkunum ein munandi vøkstur, sum sæst aftur í kanningini fyri árið 2015.



Útgreining av innihaldi í ferðavinnu-/stratabólkunum:

1. **Millumlanda-flutningsfeløg, cruise-vinna og ferðaskrivstovur**: Millumlanda-flutningsfeløgini, agentar og havnaskrivstouvur, ið hava samband við cruise-vinnuna, umframt Vága Floghavn og ferðaskrivstovurnar. Sølutølini fevna um ferðaseðlar, tax-free søluna hjá Atlantic Airways og Smyril Line, agent-fee og tænastuveitingar frá føroyskum havnum til útlendsk cruise-reiðarí umframt tænastuveitingar til útlendsk flogfeløg, ið nýta flogvøllin í Vágum.

2. **Gistingar og annað hotelvirksemi:** Fevna um alt virksemi í sambandi við gisting á hotellum, vallaraheimum, summarhúsum (kunningarstovurnar), kamping, tjalding og ból og biti. Afturat hesum er eisini íroknað annað virksemi á hotellum sum til dømis: útleigan av fundarhøli og øðrum tilhoyri, matur og drekka úr matstovuni o.s.fr. Sjálvstøðugu matstovurnar, sum feløgini, ið reka hotelvirksemi, eiga heilt ella partvís, eru at finna í bólki 3.

3. **Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur:** Matstovur, matstøð, kaffistovur og vertshús, matvøruhandlar og Rúsdrekkasøla Landsins eru at finna í hesum bólkinum.

4. **Flutningur innanoyggja og leiga av bili:** Fevna um flutning við hýruvogni, Bygdaleiðum og Strandferðsluni. Tunnilsgjøld, bensinstøðir og útleigan av bilum "persónbilar til leigu" til útlendsk ferðafólk eru eisini í hesum bólkinum.

5. **Upplivingar og aðrir aktivitetir:** Fevna um bygdasøvn, Søvn Landsins og virksemið hjá teimum, ið skipa fyri útferðum á sjógvi og á landi, tað vil siga bussferðir í sambandi við útferðir, umbidnar av ferðamannaskipum (cruise-skip).

6. **Klædnavørur og fótbúnaður:** Klædnahandlar, mannfólka- og konufólkaklæðir, barna- og ítróttarklæðir og ullvørur.

7. **Onnur søla:** Aðrir handlar, tað vil siga bókahandlar, ur- og gullsmiðir, optikarar og onnur, ið kunnu hugsast at hava eitthvørt áhugavert til útlendsk ferðafólk.

# Fylgiskjal 3 – Frágreiðing um økisferðavinnu og kunningarstovur

## Endurskoðan av stuðli til økisferðavinnu + stuðli til marknaðarføring

Í sambandi við, at løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands er sett í gildi, skal nýggj kunngerð, sum skipar stuðulin til ferðavinnuna sbrt. § 7, stk. 4 í lógini, gerast. Hóast lógin nú hevur nøkur ár á baki, er nýggja kunngerðin ikki tilevnað. Høvuðsorsøkin er, at ætlanin leingi hevur verið at broyta galdandi stuðulsskipan og hevur hetta arbeiði drigið út.

§ 7 í lógini um Visit Faroe Islands ásetir í stk. 1, at "landsstýrismaðurin kann í samstarvi við kommunur og lokalu vinnuna stuðla økisferðavinnufeløgum fíggjarliga." Somuleiðis er ásett í § 7, stk. 2, at landsstýrismaðurin eftir umsókn kann lata ferðavinnuni stuðul at marknaðarføra Føroyar. Her er talan um sonevnda krónu-fyri-krónu stuðulin, har stuðul kann verða latin marknaðarføringsátøkum við teirri treyt, at umsøkjarin sjálvur rindar helvtina.

Tað er heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um, hvussu hesar báðar stuðulsskipanir skulu umsitast.

Stuðulin til økisferðavinnufeløgini hevur áður verið skipaður í kunngerð nr. 84 frá 22. oktober 2002 um stuðul til økisferðavinnufeløg. Hóast kunngerðin m.a. ásetir treytir og krøv til stuðulsmóttakaran, verða hesar treytir í dag ikki brúktar í sambandi við stuðulsveitingina. Kunngerðin frá 2002, sum í dag ikki hevur lógarheimild, eftirsum gamla lógin um Ferðaráðið er sett úr gildi, er afturútsigld og eru flest øll samd um, at hon í síni heild eigur at verða dagførd, soleiðis at hon í størri mun livir upp til tær treytir og umstøður, sum økisferðavinnufeløg, kunningarstovur og ferðavinnan í síni heild standa við í dag.

Í 2015 var ein arbeiðsbólkur settur at eftirmeta og endurskoða galdandi stuðulsskipanir innan ferðavinnuna og at gera tilmæli um, hvussu stuðulsskipanirnar kunnu verða skipaðar framyvir, soleiðis at tær í størst møguligan mun eru ferðavinnuni í Føroyum at frama. Hetta arbeiði kom ikki á mál, einamest tí at politiska skipanin ynskti at seta arbeiði í gongd at gera eina heildarætlan fyri ferðavinnuna í Føroyum. Ein natúrligur liður í hesum arbeiðinum var tí at viðgera stuðulsskipanirnar í eini heild saman við kørmunum kring alla vinnuna.

Sostatt er ein týðandi partur av heildarætlanini at finna fram til, hvussu ein skilagóður bygnaður, herundir stuðulsskipanir, kunnu síggja út í framtíðini.

Niðanfyri verður greitt frá galdandi skipan og virkseminum í ymisku økjunum. Endamálið er at geva lesaranum eina heildarmynd av galdandi skipan, soleiðis at tað verður greitt, hví tørvur er á eini endurskoðan. Sostatt skal fylgjandi frágreiðing lesast sum bakstøði fyri teimum tilmælum, sum arbeiðsbólkurin er komin fram til.

## Søgulig gongd – hvussu er galdandi skipan komin í lag?

*Stuðul til økisferðavinnufeløg*

*Kunngerðin frá 1990*

Tann stuðulin, sum í dag verður veittur økisferðavinnufeløgunum, stavar upprunaliga frá fyrstu løgtingslógini um Ferðaráð Føroya, sum varð sett í gildi 12. juni 1990. Við heimild í hesi lóg, varð "kunngerð um stuðul til kunningarstovur" sett í gildi. Kunngerðin ásetti, at Ferðaráð Føroya kundi veita stuðul av játtanini á fíggjarlógini til rakstur av kunningarstovunum.

Kunngerðin ásetti, at játtaði stuðulin til kunningarstovurnar "kann vera upp til 25 % av mettu rakstrarútreiðslunum hjá kunningarstovuni, tó í mesta lagi 150.000 kr." og var stuðulin treytaður av, at kommunan ella kommunurnar í økinum í minsta lagi veita 50 % í stuðli til raksturin av kunningarstovuni. Somuleiðis var ein treyt, at reglugerð viðv. virkseminum há kunningarstovuni skuldi góðkennast av landsstýrismanninum eftir ummæli frá Ferðaráðnum. Við umsóknini um stuðul skuldi fylgja rakstrarætlan fyri árið, søkt verður um stuðul til, umframt roknskapur fyri farna árið.

Sostatt varð upprunaliga lagt upp til, at landið kann veita kunningarstovunum lutvísan stuðul til beinleiðis rakstur av virkseminum, tó undir teirri fortreyt, at kommunurnar í minsta lagi rinda fyri helvtina av rakstrinum.

*Kunngerðin frá 1991*

Longu í juli 1991 varð lógin um Ferðaráð Føroya broytt og kunngerðin frá 1990 eisini broytt samsvarandi. Nú ásetti kunngerðin, at Ferðaráðið kundi veita stuðul av játtanini til "stovnsetan av kunningarstovum." Í serligum førum, kundi stuðul verða latin til rakstur í eitt avmarkað tíðarskeið, ið ikki kundi vera longur enn 3 ár.

Somuleiðis varð treytin fyri at fáa stuðulin broytt soleiðis, at Føroya landsstýri í fyrstu atløgu skuldi góðkenna reglugerð og virksemi hjá avvarðandi kunningarstovu og í øðrum lagi, at landsstýrið skuldi góðkenna stuðulin, um hann fór upp um 150.000 kr. fyri eitt rakstrarár.

Í mun til kravið um kommunalan stuðul, ásetti nýggja kunngerðin, at Ferðaráðið "kann seta sum treyt fyri at játta stuðul, at upp til 50 % av mettu rakstrar- ella stovningarútreiðslunum verða latnar sum stuðul frá kommununum."

Soleiðis síggja vit longu í 1991, at stuðulsveitingin verður flutt frá rakstrinum av virkseminum til eitt slag av fíggjarligum stovningarískoyti til nýggjar kunningarstovur. Samstundis verður bloytt upp fyri teimum treytum, sum upprunaliga vórðu settar kommununum í sambandi við stuðulsveitingina, soleiðis at tað nú skuldi vera Ferðaráðið og ikki landsstýrismaðurin, sum skuldi avgera ella meta um, hvørt tað skuldi vera ein treyt, at kommunurnar eisini veita stuðul til rakstur ella stovnsetan. Somuleiðis letur kunngerðin tað upp í hendurnar á Ferðaráðnum at avgera, hvørjar treytir skulu setast, í mun til tíðarfreist fyri umsóknum og hvørji skjalprógv skulu fylgja við umsóknini.

*Kunngerðin frá 1998*

Í 1998 kom enn ein dagførd kunngerð við somu lógarheimild. Í hesi nýggju kunngerðini verður farið frá stuðli til kunningarstovurnar til stuðul til økisferðavinnufeløg. Tað er ógreitt, hví avgjørt varð, at stuðulin sum nakað nýtt skuldi veitast økisferðavinnufeløgum heldur enn kunningarstovunum. Sannlíkt er tó, at het-

ta hevur verið ein roynd í størri mun at fáa vinnuna og kommunurnar inn í raksturin av lokalu ferðavinnuni, eins og hetta skuldi vera við til at tryggja samstarv innan ferðavinnuna millum kommunur innan tilskilað øki.

Kunngerðin frá 1998 ásetir, at Ferðaráðið kann veita økisferðavinnufeløgum stuðul. Tað er Ferðaráðið sum kann góðkenna økisferðavinnufeløgini og ásetir kunngerðin, hvørjar treytir skulu vera loknar, t.d. í viðtøkunum fyri felagið, fyri at kunna gerast økisferðavinnufelag. Somuleiðis er heimilað Ferðaráðnum at seta aðrar treytir í sambandi við stuðulsveitingina, t.d. framløgu um rakstrarætlan, um grannskoðaðan roknskap ella krav um partvísa eginfígging.

Smbrt. kunngerðini frá 1998 tekur Ferðaráðið á hvørjum ári avgerð um, hvussu stórur partur av játtanini hjá Ferðaráðnum skal verða latin økisferðavinnufeløgunum. Stuðulin varð býttur millum økisferðavinnufeløgini eftir reglum, sum vórðu nærri ásettar í avtalu millum økisferðavinnufeløgini og Ferðaráðið.

*Kunngerðin frá 2002 – skipanin í dag*

Í 2001 kom nýggj lóg um Ferðaráð Føroya, sum var meira einføld enn gamla lógin. Lógin staðfesti, at Ferðaráðið "kann, í samstarvi við kommunur og lokalu vinnuna, stuðla økisferðavinnufeløgum fíggjarliga." Og at "Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um treytir fyri , at økisferðavinnufeløgini kunnu fáa stuðul." Sostatt varð beinleiðis lógarheimild nú fingin til vega at veita økisferðavinnufeløgum fíggjarligan stuðul. Við heimild í nýggju lógini varð enn ein kunngerð lýst um stuðul til økisferðavinnufeløg. Í høvuðsheitum er talan um somu ásetingar, sum í kunngerðini frá 1998, tó verður ikki nevnt í kunngerðini frá 2002, at Ferðaráðið kann krevja lutvísa eginfígging. Ístaðin verður nú latið upp fyri, at Ferðaráðið kann seta sum treyt, at stuðulin verður verkætlanartengdur. Annars eru treytirnar fyri stuðlinum framhaldandi, at økisferðavinnufeløgini á hvørjum ári skulu lata inn grannskoðaðan roknskap fyri undanfarna ár umframt at framleggja ætlanir fyri komandi árið.

Kunngerðin frá 2002 hevur heimild í lóg frá 2001, sum varð sett úr gildi, tá P/F Visit Faroe Islands varð sett á stovn. Sostatt er í roynd og veru talan um eina kunngerð og fyriskipan, sum ikki hevur galdandi lógarheimild. Tó verður kunngerðin brúkt sum leistur fyri stuðulsveitingini framvegis og til nýggj kunngerð er sett í verk.

*Samanumtøka - skipanin í dag*

Stutta søguliga yvirlitið yvir kunngerðir, sum gjøgnum tíðirnar hava skipað innanoyggja ferðavinnustuðulin til lokalu ferðavinnuna, vísir, at tað hevur verið ein heldur trilvandi og umskiftilig skipan, sum ikki tykist at hava funnið eina góða og trygga legu, hóast tað eru 27 ár síðani, at stuðulsskipanin byrjaði. Ongar skjalfestar grundgevingar ella eftirmetingar eru gjørdar, sum lýsa, hví avgjørt hevur verið at broyta skipanina so tíðum. Vit kunnu bara staðfesta, at vit so líðandi eru farin frá eini stuðulsskipan, sum upprunaliga varð ætlað sum fíggjarligt ískoyti hjá kommununum til stovnsetan og rakstur av kunningarstovunum, til eina skipan, har landið letur ein fastan árligan stuðul til økisferðavinnufeløgini, uttan at stórvegis krøv verða sett stuðulsmóttakaranum.

Hóast kunngerðin frá 2002 ásetir sum krav, "at økisferðavinnufeløgini, sum søkja stuðul, skulu innan 1. apríl leggja fram grannskoðaðan roknskap fyri undanfarna ár og innan 1. mai framleggja ætlanir fyri tað komandi árið", hevur hetta krav ikki verið lokið av øllum feløgum eins og handhevjanin av kunngerðarásetingunum annars hevur haltað. Til dømis hevur møguleikin í kunngerðini at áseta aðrar treytir í sambandi við stuðulsveitingina, t.d. verkætlanir,  heldur ikki verið nýttur.

Kunngerðin frá 2002 ásetir, at Ferðaráðið á hvørjum ári skal taka avgerð um, hvussu stórur partur av játtan stovnsins skal nýtast til at stuðla økisferðavinnufeløgum. Hóast hesa áseting, so hevur skipanin í roynd og

veru í nógv ár verið soleiðis, at serstøk játtan er sett av á fíggjarlógini til "produktmenning og økisferðavinnufeløg", sum tað eitur í fíggjarlógini. Játtanin er í dag 1,525 mió. kr. og verður hesin peningur lutaður út til tey 6 ferðavinnufeløgini, sum í dag eru í Føroyum og fáa øll, uttan mun til stødd ella onnur kriteriir, somu upphædd at ráða yvir, uttan at sett verða krøv um, hvussu játtanin kann ella skal nýtast.

Sostatt er í roynd og veru talan um eina passiva stuðulsjáttan í dag, sum árliga verður veitt økisferðavinnufeløgunum. Tað eru økisferðavinnufeløgini, sum síðani sjálvstøðugt gera av, hvussu tey nýta hesa játtan á 240.000 kr. hvør. Í flestu førum verður stuðulin, uttan víðari viðgerð ella støðutakan, sendur kunningarstovunum sum ein rakstrarjáttan.

Økisferðavinnufeløgini eru ikki sett á stovn, tí man í ymsu økjunum hevur mett tað skilagott at skipa ferðavinnusamstarv millum ymsu kommunurnar og vinnulívið í økinum. Samstørvini eru einans komin í lag sum avleiðing av, at kunngerðin frá 1998 setti sum krav, at skipast skulu økisferðavinnufeløg fyri at fáa stuðulin frá landinum. Hetta er kanska ein orsøk til, at hesi samstørv ikki tykjast at vera serliga virkin og at stuðulin frá landinum verður fluttur beinleiðis víðari til kunningarstovurnar; við øðrum orðum kann hetta síggjast sum eitt dýrkandi millumlið millum land og kunningarstovur.

## Lýsing av virkseminum í einstøku økjunum

Í dag eru 6 góðkend økisferðavinnufeløg, sum fáa stuðul frá landinum: Tórshavn, Vágar, Eysturoy, Norðoyggjar, Sandoy og Suðuroy. Í tveimum økjum, Suðuroy og Eysturoy eru tvinnar kunningarstovur. Sostatt eru 6 økisferðavinnufeløg, sum á ymsan hátt býta stuðulin víðari til 8 kunningarstovur kring landið.

Tað er sera ymiskt frá øki til øki, hvussu virksemið hjá økisferðavinnufelagnum og samstarvið millum økisfelag og kunningarstovur er skipað. Somuleiðis er sum nevnt ymiskt, hvussu játtanin verður umsitin.

Niðanfyri er stutt frágreiðing um, hvussu ymsu økini hava skipað seg. Frágreiðingin er grundað á viðtøkur, roknskap og ætlanir hjá feløgunum, spurnakanning sum VMR gjørdi í august 2015 og samrøður, sum arbeiðsbólkurin hevur gjørt í sambandi við heildarætlanina fyri innlendis ferðavinnu.

## Tórshavn

Økisferðavinnufelagið, sum ber heitið "Felagið Tórshavn", rekur kunningarstovuna í Tórshavn (Vist Tórshavn) og hevur nevndin í økisfelagnum sostatt eisini fíggjarliga ábyrgd av kunningarstovuni og góðkennir fíggjarætlanina og virksemisætlanina hjá Visit Tórshavn. Stjórin í kunningarstovuni er settur og vísir til nevndina í økisfelagnum.

Felagið Tórshavn er eitt felag fyri vanligar borgarar og fyri handlar í Tórshavn og endamálið við felagnum er at skapa upplýsing um býin og virksemið í býnum. Í 2013 vóru 590 limir í Felagnum Tórshavn - 480 húski, 17 feløg og 93 fyritøkur, og er tað limagjaldið frá hesum og annar stuðul, ið fíggjar virksemið hjá VisitTórshavn.

Nevndin telur 7 limir, sum verða valdir fyri 2 ár í senn. Í nevndini sita umboð fyri handilsvinnuna, ferðavinnuna, einstaklingar, Tórshavnar Kommunu, gongufelagið og søvnini. Nevndin góðkennir fíggjarætlanina og virksemið hjá VisitTórshavn annars.

Visit Tórshavn (VT) er somuleiðis á fíggjarætlanini hjá Tórshavnar Kommunu og hevur VT tætt samstarv við kommununa í sambandi við tiltøk, verkætlanir o.a.

Virksemið hjá Visit Tórshavn verður einamest fíggjað við inntøkum frá sølu (t.e. m.a. atgongumerki, íbúðir og útferðir) og stuðli frá kommununi, landinum og Felagnum Tórshavn. Samlaðu inntøkurnar hjá Visit

Tórshavn vóru í 2015 8,4 mió. kr. Av hesum stava 6,4 mió. kr. frá sølu, ímeðan knappar 2 mió. kr. eru stuðul. 1,55 mió. kr. koma frá Tórshavnar Kommunu, ímeðan landið einans stendur fyri 240.000 kr. og Felagið Tórshavn letur 200 tús. kr. í rakstrarstuðli.

Ein stórur partur av søluinntøkunum skal avskrivast orsakað av, at talan er um víðarisølu av íbúðum, atgongumerkjum o.ø., sum VT fær provisjón fyri at selja. Rakstrarkostnaðurin hjá VT var í 2015 góðar 5 mió. kr. umframt at útreiðslur til løn o.a. vóru góðar 2,3 mió. kr. Samanumtikið er talan um eitt ársúrlit fyri 2015 á 157 tús. kr.

Stuðulin frá kommununi og ein partur av sølu-inntøkunum fer til rakstur av kunningarstovuni. Stuðulin á 240 tús. kr. frá landinum fer í mestan mun til at fíggja verkætlanir av ymsum slag, sum annars ikki høvdu verið møguligar, eftirsum meginparturin av orkuni - bæði fíggjarliga og starvsfólkaliga - hjá VT fer til at selja og skipa fyri tiltøkum o.ø. í høvuðsstaðnum. Sum tølini oman fyri vísa er tó greitt, at stuðulin frá landinum á 240 tús. kr. hevur sera lítlan týdning fyri samlaða raksturin hjá VT.

*Meting*

Grundað á sína støðd og lutfalsliga stóra virksemi, ber illa til at sammeta Kunningarstovuna og skipanina innan ferðavinnuna í høvuðsstaðnum við onnur øki í landinum. Umframt eina munandi størri fíggjarætlan, hevur Visit Tórshavn eisini ein munandi størri starvsfólkahóp enn hinar kunningarstovurnar og nógvar professionellar samstarvsfelagar innan ferða- og handilsvinnuna, sum hevur við sær, at kunningarstovan og virksemið kring ferðavinnuna í økinum kann vera meira professionelt rikið.

Visit Tórshavn kann onkursvegna síggjast sum høvuðs-kunningarstovan í Føroyum, sum bæði fyriskipar og selur tiltøk í høvuðsstaðnum, men sum eisini selur og marknaðarførir ferðavinnutilboð kring alt landið, eftirsum nógv tey flestu ferðafólkini koma til Havnar, búgva í Havn ella brúka Havnina sum útgangsstøði, tá tey vitja oyggjarnar. Saman við kunningarstovuni á flogvøllinum, er kunningarstovan í Tórshavn eitt sonevnt "ferðavinnu-knútapunkt" ella eitt portur, sum tekur ímóti og ráðgevur nógv størsta partinum av útlendsku ferðafólkunum í Føroyum.

Sum nevnt omanfyri, hevur almenni stuðulin til kunningarstovurnar sera avmarkaðan týdning fyri virksemið hjá VT. Mett verður ikki, at ein umskipan av galdandi stuðulsskipan kemur at hava stórvegis avleiðingar fyri virksemið hjá VT.

## Eysturoy

Økisferðavinnufelagið í Eysturoy: "Ferðavinnan í Eysturoy" varð sett á stovn í 1995. Kunningarstovurnar í Fuglafirði og í Runavík vórðu settar á stovn í ávikavist 1994 og í 1995. Frá byrjan hevur skipanin verið soleiðis, at økisfelagið hevði uppgávuna av at reka kunningarstovurnar, men at Fuglafjarðar kommuna og Runavíkar kommuna skuldu rinda eyka fyri raksturin av kunningarstovunum, orsakað av teimum fyrimunum, sum vórðu mettir at fylgja við at hava kunningarstovuna á staðnum. Runavíkar kommuna og Fuglafjarðar kommuna rinda í dag bróðurpartin av rakstrinum í teimum báðum kunningarstovunum.

Í felagnum eru 7 nevndarlimir, harav 2 eru politiskt valdir av vertskommununum. Hinir 5 limirnir verða valdir av aðalfundinum at umboða vinnuna í økinum.

Sambært viðtøkunum, er endamálið hjá ferðavinnuni í Eysturoy "at menna og at samskipa ferðavinnuna í Eysturoy og at vera partur av ferðavinnuni í Føroyum".

Seinastu nógvu árini hevur nevndin einamest virkað sum eitt slag av ráðgevandi nevnd hjá kunningarstovunum.

Felagið flytur allan stuðulin frá landinum óskerdan til kunningarstovurnar umframt helvtina av stuðlinum frá kommununum (limagjald á 30 kr. pr. borgara). Harafturat hevur felagið rindað fyri aðrar útreiðslur, sum eru knýttar at kunningarstovunum, m.a. heimasíðu og ráðstevnur hjá kunningarleiðarunum. Sostatt fer meginparturin av inntøkunum hjá økisfelagnum til beinleiðis rakstur av teimum báðum kunningarstovunum og tað er tí avmarkað, hvussu nógvur peningur er eftir til menningarætlanir e.t. sum felagið kann seta í gongd via stuðulsskipanina, sum er galdandi í økinum.

Kunningarstovurnar virka sum sjálvstøðugar eindir undir vertskommununum. Leiðararnir á kunningarstovunum eru starvssettir hjá avvarðandi kommunu. Ongar formellar avtalur eru millum økisferðavinnufelagið og kunningarstovurnar um, hvat stuðulin kann ella skal brúkast til.

Inntøkurnar hjá ferðavinnuni í Eysturoy stava í høvuðsheitum frá landsstuðlinum (240 tús. kr.) og limagjaldi frá kommununum (195 tús. kr.). Í 2015 vóru inntøkurnar tilsamans 452 tús. kr. Av hesum fara uml. 365,4 tús kr. beinleiðis til rakstur av kunningarstovunum. Av teimum 87 tús. kr., sum felagið hevði eftir, fóru 53, 6 tús. kr. til fyrisiting (t.e. skeið, heimasíða, bókhald, fundir o.a.). Ársúrslitið fyri 2015 var 28.275 kr.

*Meting*

Kunningarstovurnar í Runavík og Fuglafirði eru báðar integreraður partur av virkseminum hjá vertskommununum, sum eisini rinda bróðurpartin av rakstrinum. Sostatt er í stóran mun talan um kommunalar kunningarstovur, tó at hesar fáa part av rakstrinum (183 tús. kr. hvør) frá økisferðavinnufelagnum.

Hesin bygnaður, har kunningarstovurnar kunnu sigast at vera undir tvíbýttari leiðslu, hevur við sær eitt ógreitt ábyrgdar- og uppgávubýti, sum hevur ført til ónøgd, bæði fyri kunningarstovurnar, men eisini fær tær kommunur, ið ikki hava eina kunningarstovu, men sum rinda fyri samstarvið umvegis limagjaldið. Mangt bendir eisini á, at vertskommunurnar sjálvar ynskja at koma burturúr galdandi bygnaði, soleiðis at tær framyvir hava fult ræði á egnari kunningarstovu.

Ferðavinnufelagið í Eysturoy er ikki eitt virkið felag og tykist tað tilvildarligt, hvør mannar nevndina. Tað hevur víst seg at vera trupult at manna nevndina við røttu førleikunum og tað kann ikki sigast, at økisferðavinnufelagið í Eysturoy er ein virkin leikari innan ferðavinnumenning í Eysturoy sum støðan er í dag.

Tað eru fleiri kommunur í Eysturoy, um ikki allar, sum halda at kunningarstovurnar eiga at vera kommunalar burturav og at ferðavinnustuðulin heldur eigur at verða brúktur til ferðavinnuátøk av felags áhuga.[28]

Eysturkommuna hevur gjørt av at taka seg úr ferðavinnusamstarvinum, eftirsum tey ikki meta, at tey fáa nóg mikið burturúr limagjaldinum. Í staðin er ætlanin at seta á stovn egna kunningarstovu í kommununi. Somuleiðis bendir mangt á, at Runavíkar Kommuna, sum hevur eitt ynski um at reka kunningarstovuna sjálvstøðugt, longu er í eini tilgongd at fáa hetta framt.

Mett verður tískil ikki, at tað fær týdning fyri kunningarstovurnar í Eysturoynni, um stuðulin til økisferðavinnu verður endurskoðaður. Tvørturímóti tykist vera tørvur á tí, nú kommunurnar sjálvar eru farnar undir eina broytingartilgongd í mun til bygnaðin innan ferðavinnuna í økinum.

*28 Hetta er bygt á samrøður við Runavíkar Kommunu, Sunda Kommunu, Kunningarstovuna í Runavík og á felags fundi við kunningarstovurnar.*

## Norðoyggjar

Økisferðavinnufelagið í Norðoyggjum, "Ferðavinnan í Norðoyggjum", verður rikið av nevnd felagsins, sum telur 5 nevndarlimir. Smbrt. viðtøkum felagsins eru ongar treytir fyri, hvør kann verða valdur í nevndina. Tað eru gjaldandi limir, sum hava atkvøðurætt á aðalfundinum at velja nevndina. Øll kunnu vera limir í felagnum (einstaklingar, feløg, fyritøkur, stovnar og kommunur).

Økisfelagið hevur tætt samstarv við kunningarstovuna, sum er sett at útinna dagliga virki felagsins. Leiðarin á kunningarstovuni er settur og verður løntur av økisfelagnum. Stuðulin frá landinum verður fluttur beinleiðis til Norðoya Kunningarstovu, sum hevur fullan ræðisrætt á peninginum og hevur stuðulin frá landinum einamest verið brúktur til beinleiðis rakstur av kunningarstovuni. Afturat stuðlinum frá landinum rinda smærru kommunurnar 45 kr. pr. íbúgva fyri limaskap í felagnum (hetta hevur tó ikki verið goldið av øllum kommunum.) Klaksvíkar Kommuna rindar 200 tús kr. árliga til kunningarstovuna, umframt at kommunan rindar fyri høli, el og hita.

Hóast Norðoya Kunningarstova fær fíggjarligan stuðul, serliga frá Klaksvíkar Kommunu, eru kunningarstovan og økisfelagið óheft av kommununum. Tó er tætt samstarv millum kunningarstovuna og kommunurnar um menning av ferðavinnuni í økinum og stendur kunningarstovan fyri at samskipa tiltøk og verkætlanir fyri kommununa. Eisini ger kunningarstovan eitt lutfalsliga stórt søluarbeiði, bæði við at útleiga summarhús, men eisini í sambandi við tiltøk, tjalding, cruise-gestir o.a.

Samlaðu inntøkurnar hjá Norðoya Kunningarstovu vóru í 2015 1,35 mió. kr., ímeðan samlaðu útreiðslurnar (serliga til lønir og av- og niðurskrivingar og fíggjarligar útreiðslur) vóru oman fyri 1,5 mió. kr. Sostatt var ársúrslitið fyri 2015 666 tús kr. í halli.

*Meting*

Tað hevur stundum verið torført hjá kunningarstovuni at fáa endarnar at røkka saman fíggjarliga og hevur arbeiðið hjá kunningarstovuni verið merkt av arbeiðinum at fáa nøktandi fígging til virksemið. Líkt er tó til, at Klaksvíkar Kommuna framyvir fer at lata meira enn 200 tús. kr. í stuðli til virksemið og soleiðis vera við til at tryggja raksturin hjá kunningarstovuni.

Ferðavinnufelagið í Norðoyggjum er eyðkent av somu avbjóðingum sum hini økisfeløgini og er tað eisini í Norðoyggjum ein avbjóðing at fáa fólk við ferðavinnuútbúgving ella øðrum fakligum førleikum at luttaka í arbeiðinum, soleiðis at økisfelagið veruliga verður ein drívmegi fyri menningina í økinum.

Tað er avgerandi fyri framtíðina hjá kunningarstovunum og kanska serliga tí í Norðoyggjum, at funnin verður ein trygg lega at arbeiða í. Í løtuni er virksemið hjá kunningarstovuni ógreitt, eftirsum bæði fíggingin og sjálvur raksturin er ein samantvinnan av almennum og privatum peningi og áhugamálum. Tí valdar eisini ein støðug óvissa um fíggjarligu viðurskiftini hjá kunningarstovuni. Hetta hevur við sær, at kunningarstovurnar ikki kunnu leggja langtíðarætlanir fyri ferðavinnuna í økinum.

Um avgjørt verður, at landsstuðulin ikki longur skal brúkast til rakstur av kunningarstovunum, er neyðugt, at kommunurnar í økinum eru til reiðar at lyfta hesa uppgávuna. Tá hugsað verður um fíggjarliga førleikan hjá Klaksvíkar Kommunu, eigur tað tó ikki at vera ein fíggjarlig avbjóðing, skuldi landsstuðulin til økisfeløgini verið umlagdur til annað ferðavinnuvirksemi enn rakstur av kunningarstovunum.

## Vágar

Felagið Vágar, sum økisfelagið í Vágunum kallast, er mannað við umboðum úr handilsvinnuni, ferðavinnuni, aðrari vinnu og kommununum í økinum (sum hava hvør sín nevndarlim í nevndini). Leiðarin á Kunningarstovuni (Visit Vágar) verður settur av felagnum og er leiðarin sambindingarlið millum nevnd, starvsfólk, vinnulív og aðrar áhugabólkar. Høvuðsuppgávan hjá felagnum er at reka kunningarstovuna og annars at virka til gagns fyri alt vinnu- og mentanarlív í Vágum og í Mykinesi.

Virksemi hjá kunningarstovuni í Vágum er býtt í tvey: kunningarstovan og kunningardiskurin, sum bæði eru staðsett á flogvøllinum. Hetta ger virksemið hjá kunningarstovuni í Vágum serligt og øðrvísi enn hjá hinum kunningarstovunum, eftirsum virksemið setir heilt onnur krøv til upplatingartíðir (og manning) umframt at ein stórur partur av virkseminum hjá kunningarstovuni fer við at veita ferðafólkum á flogvøllinum kunning og tænastu.

Raksturin av kunningarskivuni og kunningarstovuni er somuleiðis býttur í tvey. Kunningarskivan fær sínar inntøkur frá virksemi á flogvøllinum: søla av tænastum fyri telefeløg (teletíð), bilaútleigan, ferðakort fyri SSL, Atlantic Airways og útflýggjan av tax-free pengum. Harafturat fær kunningarskivan 84 tús. kr. í landsstuðli (afturat teimum 240 tús. kr. sum kunningarstovan fær).

Fíggingin av kunningarstovuni sjálvari kemur, afturat landsstuðlinum, í høvuðsheitum frá limagjøldum frá kommununum, sum í 2015 vóru 540 tús kr. (kom.) + 52 tús. kr. (onnur limagj.). Kommunustuðulin verður latin sambært umsókn frá kunningarstovuni til kommunurnar á hvørjum ári og broytist hesin stuðul nógv frá ári til ár (380 tús í 2014 og 540 tús í 2015), alt eftir hvørja raðfesting ferðavinnan fær og hvør fíggjarstøðan hjá kommununum er. Afturat hesum hevur kunningarstovan, eins og hinar, inntøkur frá útferðum, summarhúsútleigan, tiltøkum o.ø. Hølini hjá kunningarstovuni og kunningardiskinum verða fíggjað av Vága Floghavn, sum eisini hevur umboð í nevndini í Felagnum Vágar.

Viðvíkjandi teimum íalt 324 tús. kr., sum Felagið Vágar fær í landsstuðli, verður hesin fluttur óskorin til kunningarstovuna og kunningardiskin, sum síðani brúkar ein stóran part av peninginum til rakstur.

*Meting*

Kunningarstovan í Vágunum var fyri fáum árum síðani løgd á flogvøllinum, soleiðis at raksturin á kunningarstovuni og kunningardiskinum kann samskipast. Kommunurnar eru tó ikki áhugaðar í at fíggja part av virkseminum hjá kunningardiskinum og hevur ávís ónøgd verið um hetta.

Fíggjarviðurskiftini á Visit Vágar hava yvirhøvur verið óstøðug, játtanin er broytt frá ári til ár og hevur tað verið ein árligur dystur at fáa nóg mikið av peningi til raksturin.

Tað er mangt sum bendir á, at væntanirnar hjá ymsu pørtunum um, hvat kunningarstovan kann/skal, eru ymiskar. Vága Floghavn hevur eina fatan, kommunurnar eina aðra og vinnan í økinum eina triðju. Hetta hevur havt við sær, at samskiftið millum kunningarstovuna og kommunurnar hevur verið trekt og partarnir meta, at tað er neyðugt at gera tað greiðari, hvør uppgávan hjá kunningarstovuni er og ikki (t.d. í mun til lokal trivnaðartiltøk o.t.).

Kunningarstovan virkar undir sera óstøðugum fíggjarligum viðurskiftum, har tað afturvendandi er neyðugt at stríðast fyri eini játtan, sum broytist hvørt ár og har tað áhaldandi er neyðugt at rættvísgera virksemið mótvegis avvarðandi pørtum.

Mett verður, at tað er neyðugt at skapa eitt greiðari ábyrgdarbýti á kunningarstovuni. Tað skapar órógv at so nógvir ymiskir partar hava ábyrgd av at fíggja raksturin av ávikavist kunningardiski og kunningarstovu. Mælt verður til, at tað framyvir verður Vága Floghavn, sum hevur ábyrgd av at fíggja og reka kunningardiskin, meðan tað hinvegin verða kommunurnar, sum eiga og reka kunningarstovuna.

Kunningardiskurin er beinleiðis knýttur at flogferðsluni og er hetta at skilja sum ein tænasta, sum verður veitt teimum, sum ferðast um flogvøllin burturav. Í dag fíggjar landið kunningardiskin, bæði beinleiðis við stuðli, men eisini óbeinleiðis via SSL og Atlantic Airways og Vága Floghavn, sum báðar eru landsfyritøkur. Mett verður, at tað hevði havt við sær ein meira skynsaman og handilsliga grundaðan rakstur, sum kundi verið neyvt samskipaður við virksemið í Vága Floghavn, um tað var greitt, at tað er Vága Floghavn, sum hevur ábyrgdina av at reka kunningardiskin.

## Suðuroy

Økisferðavinnufelagið í Suðuroy, Suðuroyar Ferðavinnufelag, er mannað við 7 limum; einum frá hvørjari kommunu í oynni.

Suðuroyggin hevur skipað seg øðrvísi enn restin av landinum í ferðavinnuhøpi. Eins og aðrastaðni er tað økisferðavinnufelagið, sum tekur ímóti stuðlinum frá landinum á 240 tús. kr. um árið. Hesin stuðul verður tó ikki brúktur sum ískoyti til raksturin av teimum báðum kunningarstovunum í oynni, sum sostatt eru kommunalt fíggjaðar burturav. Í staðin verður stuðulin umsitin av nevndini í Suðuroyar Ferðavinnufelag, sum eisini fær limagjald frá øllum kommunum í oynni (37 kr. pr. borgara). Í 2014 var kommunala limagjaldið 174 tús. kr. og í 2015 var tað 172 tús. kr. Tilsamans eru inntøkurnar hjá Felagnum Suðuroy góðar 400 tús. kr. um árið.

Peningurin verður nýttur til verkætlanir og onnur tiltøk í oynni. Øll, sum á einhvønn hátt arbeiða við ferðavinnu, hava møguleika at søkja um stuðul frá felagnum. Somuleiðis kunnu kunningarstovurnar søkja um stuðul til at luttaka á ferðavinnumessum o.t. Sum dømi um átøk/verkætlanir, sum Suðuroyar Ferðavinnufelag hevur valt at stuðla seinastu árini, eru: Víkingadagar í Hovi, SALT, langhylurin í Vági, kikarin í Akrabyrgi, Søvn í oynni o.a.

*Meting*

Sum útgangsstøði tykist tað rigga væl, at ferðavinnan í Suðuroy hevur skipað seg við greiðum arbeiðsbýti. Vertskommunurnar (Vágur og Tvøroyri) standa sjálvstøðugt fyri rakstrinum av kunningarstovunum í oynni, sum sostatt eru integreraður partur av virkseminum hjá teimum báðum kommununum. Ferðavinnufelagið, sum umboðar alla oynna, arbeiðir hinvegin meira breitt fyri at menna ferðavinnuna í oynna við at lata stuðul til ymiskar verkætlanir og tiltøk.

Hetta ger tað lutfalsliga einfalt í Suðuroy at umskipa stuðulin til økisferðavinnufeløgini, eftirsum tað ikki kemur at hava ávirkan á virksemið hjá kunningarstovunum.

Í Suðuroynni eru fólk tó ógreið á máli um, hvussu væl skipanin virkar og mangt bendir á, at ávísar avbjóðingar eru í samstarvinum millum kunningarstovurnar báðar og ferðavinnufelagið. Spurnartekin kann eisini setast við, hvussu skilagott tað er at hava tvinnar kunningarstovur, í Vági og á Tvøroyri, meðan ongin ferðavinnukunning er at finna á Krambatanga, har ferðafólkini koma í land.

Harafturat tykist tað, eins og í flest øðrum økjum, at vera ein avbjóðing at manna nevndina í felagnum við fólki, sum hava holla vitan og førleikar innan ferðavinnu, soleiðis at felagið kann gerast ein verulig drívmegi fyri ferðavinnumenningina í oynni.

Av tí at stuðulin longu í dag er verkætlanartengdur og óheftur av kommunalum rakstri, verður tað ikki mett sum ein avbjóðing í Suðuroy, skuldi stuðulin verið endurskoðaður.

## Sandoy

Økisferðavinnufelagið í Sandoy, Sandoyar Sýslu Ferðalag, rekur Sandoyar Kunningarstovu.

Limir í felagnum kunnu vera einstaklingar, virki, feløg ella stovnar. Limagjaldið er 100 kr. fyri einstaklingar og 500 kr. fyri virki. Nevndin verður mannað av limum felagsins og telur nevndin 5 nevndarlimir.

Kunningarstovan hevur ½ fólk í starvi alt árið.

Virksemið hjá kunningarstovuni er serliga eyðkent av virkseminum um summarið, t.e. at skipa fyri útferðum, gongutúrum, tiltøkum, kvøldsetum, summarhúsútleigan, bóli og bita o.ø. Minni enn helmingurin av inntøkunum hjá kunningarstovuni koma frá slíkum virksemi. Kommunurnar lata knappar 80 tús. kr. um árið í stuðli og landið 240 tús. kr. Stuðulin frá landinum fer óskorin til rakstur av kunningarstovuni og er ikki markaður til ávíst virksemi. Tilsamans hevur kunningarstovan inntøkur áljóðandi 460 tús. kr. um árið. Útreiðslurnar eru eitt vet lægri, soleiðis at raksturin javnvigar.

Um hugt verður eftir, hvussu stóran lut av inntøkunum ymsu partarnir fíggja, sær býtið áleið soleiðis út: Landið 54%, kommunurnar í Sandoyar Sýslu (undantikið Skopun) 17% og inntøkur frá sølu eru uml. 30 %.

Lutfalsliga rinda kommunurnar í Sandoynni sostatt lítlan part av rakstrinum sammett við aðrar kunningarstovur í Føroyum. Eins og hjá øðrum kunningarstovum í Føroyum, hevur tað verið trupult at fáa nóg mikið av inntøkum til at fíggja virksemið og lítil ivi man vera um, at tað er ov lítið at manna kunningarstovuna við einum hálvtíðarsettum starvsfólki.

*Meting*

Økisfelagið í Sandoy er minsta økisfelag í Føroyum og er fíggjarliga orka felagsins meira avmarkað enn aðrastaðni, serliga orsakað av lítla fólkagrundarlagnum. Tí er tað eisini ein afturvendandi avbjóðing at fáa nøktandi fígging til virksemið, serliga nú eftirspurningurin eftir tænastum og vegleiðing vindur upp á seg.

Í mun til eina endurskoðan av økisferðavinnustuðlinum, sum inniber, at landið ikki longur veitir fígging til rakstur av kunningarstovunum, merkir hetta, at kommunurnar í Sandoynni høvdu verið noyddar at raðfesta hetta virksemi munandi hægri, enn tær í dag gera. Eins og aðrastaðni kundi ein loysn verið, at kommunurnar rinda eitt fast gjald pr. íbúgva, soleiðis at fíggingin verður býtt rættvíst.

Sum tølini oman fyri vísa, so er raksturin av kunningarstovuni lutfalsliga lítil. Skal verandi virksemi halda áfram uttan stuðul frá landinum, merkir hetta í fyrstu syftu, at kommunurnar í felag skulu finna 240 tús. kr. afturat til at fíggja virksemið. Verður hetta gjørt í felag út frá einum býtislykli sum oman fyri nevnt, er talan um ein lítlan post á fíggjarætlanini hjá kommununum, sum pláss eigur at vera fyri. Tað er ein spurningur um raðfesting. Somuleiðis letur nýggja stuðulsskipanin upp fyri, at peningur til mennandi verkætlanir kann fáast til vega á øðrvísi hátt, sum greitt verður frá í heildarætlanini.

## Samanumtøka

Søguliga yvirlitið saman við lýsingini av virkseminum hjá teimum ymsu kunningarstovunum gevur eina mynd av, hvussu skipanin við økisferðavinnufeløgum og kunningarstovum er skipað í dag.

Samanumtikið ber til at siga, at stuðulsskipanin handan kunningarstovurnar í Føroyum hevur havt eina sera trilvandi og umskiftiliga tilveru, sum ikki hevur funnið eina trygga legu. Skipanin, sum varð sett í verk í 2002 við økisferðavinnufeløgum kring landið, hevur heldur ikki reiðiliga vunnið hevd, eftirsum fleiri partar eru ónøgdir við skipanina og tí at virksemið hjá flestu feløgunum hevur verið rættiliga lítið. Økisferðavinnufeløgini hava uttan iva havt týdning í mun til fleiri verkætlanir gjøgnum árini, men ikki ber til at siga, at feløgini hava megnað at savna ferðavinnuna í teimum 6 økjunum og at vera drívmegi handan menning og samstarv innan ferðavinnuna í Føroyum. Síðani 2002 hevur tað verið ein fortreyt fyri at fáa stuðul frá landinum, at økisfelag verður sett á stovn við egnum viðtøkum. Hetta tykist vera høvuðsorsøkin til, at feløgini yvirhøvur eru sett á stovn.

Felags eyðkenni fyri flestu økisferðavinnufeløgini er, at tey hava avmarkaða fíggjarliga orku, lítla ella onga umsiting og er virksemið av tí sama avmarkað. Í flestu økjum er tað ein avbjóðing at manna nevndirnar og eru tað ikki fólk við serligum førleikum ella vitan innan ferðavinnu, sum manna nevndirnar.

Í dag eru kommunur í landinum, sum ikki eru partur av nøkrum økisferðavinnusamstarvi, hóast søkt hevur verið um tað. Fyri hesi øki verður galdandi skipan upplivað avmarkandi og órættvís. Av tí at kunningarstovurnar eru undir økisfeløgum, sum hava fleiri limakommunur, hevur ónøgdsemi eisini valdað millum tær kommunur, sum ikki eiga kunningarstovurnar, eftirsum fatanin summastaðni er, at kunningarstovurnar meira eru at fata sum forlongdi armurin hjá vertskommunununum heldur enn umboðandi alt økið. Aðrar kommunur, sum eru vertskommunur fyri kunningarstovu (t.d. Runavíkar kommuna), umhugsa somuleiðis sína støðu í samstarvinum, orsakað av ógreiða uppgávu- og ábyrgdarbýtinum. Sostatt er mangt sum bendir á, at galdandi skipan í ávísum økjum longu er í ferð við at detta sundur. Hetta er í øllum førum galdandi í Eysturoynni, har Eysturkommuna hevur valt at taka seg burturúr samstarvinum, Sunda kommuna umhugsar tað sama og Runavíkar kommuna hevur boðað frá, at tey hava í hyggju at gera tað í 2018.

Frá fleiri vinnuligum aktørum hevur eisini verið víst á, at tað ikki er rætt ella nøktandi, at kunningarstovurnar í dag í veruleikanum virka sum eitt slag av ferðaskrivstovum, sum selja túrar, summarhús, tiltøk o.a., sum kunnu sigast at vera í kapping við privata marknaðin. Ávísir vinnuligir aktørar fata við øðrum orðum kunningarstovurnar sum ein kappingarneyta heldur enn ein samstarvsfelaga; eina kappingarstøðu við ójøvnum fortreytum, eftirsum kunningarstovurnar jú verða riknar við almennum stuðli. Er hetta støðan, er trupult hjá landsstýrinum at argumentera fyri, at stuðulin skal varðveitast í sínum núverandi skapi.

Gjøgnumgongdin oman fyri gevur eina fatan av fløkta uppgávu- og ábyrgdarbýtinum í galdandi skipan. Onki øki er skipað á sama hátt, tað er ymiskt, hvørjar leiklutir og uppgávur kunningarstovur og økisfeløg hava og er tað yvirhøvur ógreitt, hvat endamálið við verandi skipan er.

Vit hava í dag eina skipan, har avmarkaða játtanin verður sundurliðað í 6 eins stórar partar, soleiðis at hvørt øki, óheft av støðd, virksemi ella førleika, fær 240 tús. kr. frá landinum at ráða yvir. Í flestu førum fer játtanin til beinleiðis rakstur av kunningarstovunum. Tað er tí torført at fáa eyga á mennandi elementið í galdandi stuðulsskipan, tá stórt sæð øll upphæddin verður brúkt til rakstur (t.e. lønarútreiðslur) á kunningarstovum, sum kunnu sigast at vera ein samanblanding av kommunalum, privatum og almennum uppgávum.

Tá hugt verður eftir øðrum økjum í landinum (t.d. Vestmanna kommunu, Sunda kommunu og Kallsoynni), sum kanska kunnu sigast at vera millum best skipaðu økini uttan fyri høvuðsstaðin innan ferðavinnu, hava hesi støð tað felags eyðkenni, at ferðavinnan í hesum økjum er bygd upp og ment uttan um galdandi skipan við økisferðavinnufeløgum og kunningarstovum og uttan stórvegis av almennum stuðli. Her er talan um samstarv og menning, sum sprettir úr lokalumhvørvinum og sum ikki er komið í lag orsakað av eini stuðulsskipan frá landinum. Hesi øki eru dømi um burðardygga ferðavinnumenning og at stuðul frá landinum ikki er ein fortreyt fyri ferðavinnumenning, kanska heldur tvørturímóti.

Tá hetta er sagt, er neyðugt at hava fyri eyga, at gjøgnumgongdin oman fyri burturav er ein eftirmeting av

galdandi stuðulsskipan og galdandi bygnaði við økisferðavinnufeløgum sum millumliðum millum land og kunningarstovur. Hetta skal ikki lesast sum ein eftirmeting av sjálvum virkseminum hjá kunningarstovunum, sum hava ein týðandi leiklut innan ferðavinnuna í Føroyum.

## Stuðulsskipanin til marknaðarføring uttanlands (sonevnda króna-fyri-krónu skipanin)

Eins og við økisferðavinnustuðlinum, er torført at finna skjalfesting fyri, nær og hví skipanin upprunaliga varð sett í verk. Sambært Visit Faroe Islands er skipanin sett í verk við íblástri úr Íslandi, har tey hava havt eina líknandi skipan. Endamálið við stuðulsskipanini hevur sannlíkt verið at hjálpa vinnuni við marknaðarføringsátøkum, sum í ein ávísan mun liggja uttan fyri vanligu marknaðarføringina hjá vinnuni. Endamálið hevur ivaleyst eisini verið at bjóða smærru veitarunum, ið ikki hava fíggjarligt rásarúm til marknaðarføring uttanlands, fíggjarligan stuðul.

Fyrstu nógvu árini varð upphæddin á fíggjarlógini 1 mió. krónur, sum tó seinnu árini er lækkað niður í 500.000 kr. Í 2016 og í 2017 hevur játtanin verið 475 tús. kr. Fyri at tryggja, at tiltøkini, sum stuðul verður latin til, eru seriøs og hava eina støðd, sum ger mun og sæst aftur, er ein minsta upphædd á 25.000 kr. ásett. Treytin fyri at fáa stuðul er, at veitarin í minsta lagi fíggjar helmingin av kostnaðinum fyri marknaðarføringsátakið sjálvur (harav kr.-fyri-kr. stuðul).

Fyrstu nógvu árini var treytin eisini, at tað bara vóru ferðavinnuveitarar, sum kundu søkja um stuðulin. Tá Ferðaráðið og Menningarstovan vórðu løgd saman til SamVit, varð skipanin tó broytt til eisini at fevna um aðrar aktørar, so leingi endamálið var at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál í eini breiðari merking. Í 2014 varð vegleiðingin aftur broytt, soleiðis at hon eisini kann fevna um MICE tiltøk í Føroyum. Grundgevingin frá Visit Faroe Islands var, at vit hava tørv á dømum um væleydnað MICE tiltøk fyri betur at kunna selja Føroyar sum MICE ferðamál. Í nógv ár vóru tað serliga stóru leikararnir á marknaðinum, t.e. Smyril Line og Atlantic Airways, ið fingu stuðul til átøk á útvaldum marknaðum sum Danmark, Týsklandi og Stóra Bretlandi. Av serligum átøkum kunnu nevnast Ferie-øerne, sum var eitt digitalt átak hjá Atlantic Airways og stuttfilmar hjá Kovboyfilm, ið liggja á Youtube og sum skuldu lýsa ymisk økir í Føroyum, sum t.d. tónleikafestivalar, mat, binding umframt yvirskipaðir filmar um Føroyar sum ferðamál. Báðar hesar verkætlanir fingu fulla játtan á 250.000 kr. Seinnu árini hava stóru aktørarnir í minni mun søkt stuðul frá kr.-fyri-kr. játtanini og eru tað serliga minni og í ein ávísan mun nýggir aktørar, sum hava søkt um og fingið stuðul.

Vanliga fær Visit Faroe Islands umsóknir, ið liggja langt oman fyri stuðulsupphæddina, men nógvar av hesum umsóknum lúka ikki krøvini til at fáa stuðul. Allur stuðulin hevur verið útlutaður á hvørjum ári. Tó er tað komið fyri, at verkætlanirnar ikki hava verið førdar út í lívið, ella at bara ein partur av verkætlanini er gjøgnumførdur, og tí kemur fyri, at øll upphæddin ikki er nýtt.

*Meting*

Eftir at Ferðaráð Føroya varð umskipað og nýggj ætlan fyri virksemið hjá Ferðaráðnum varð løgd, har satsað verður miðvíst upp á marknaðarføring uttanlands, verður øll játtanin hjá Visit Faroe Islands nú oyramerkt til marknaðarføring uttanlands. Harafturat var tað eitt av endamálunum við umskipanini av VFI til alment partafelag, at privati parturin av marknaðarføringini skuldi økjast via betri samstarv um marknaðarføringina millum VFI og privatu veitararnar.

Tað ber væl til at grundgeva fyri, at tað er tørvur á at stuðla vinnuni við peningi til marknaðarføring uttanlands. Men eftir at virksemið hjá VFI er umskipað og meginparturin av játtanini í dag verður brúktur til marknaðarføring uttanlands, sum helst skal samskipast við vinnuna, er ikki neyðugt við enn eini stuðulsskipan, markað til júst sama endamál.

Tí mælir arbeiðsbólkurin til, at hesin peningur heldur verður nýttur til menningarátøk innanlands.

## Fylgiskjal 4 – Notat frá UVMR um Cruise-vinnu

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur fleiri ferðir fingið fyrispurningar og áheitanir frá pørtum innan ferða- og shippingvinnuna viðvíkjandi virkseminum hjá stórum ferðamannaskipum, sum koma til Føroya. Tað kemur fyri, at hesi ferðamannaskip kasta akker uttan fyri oyggjarnar, eitt nú út fyri Mykinesi, seta skjóttgan-gandi bátar á sjógv og sigla kring oyggjarnar. Eisini kemur tað fyri, at ferðafólkini koma upp á land og gera útferðir á landi, uttan at føroyskir myndugleikar á nakran hátt eru við.

Ymiskt bendir á, at hetta er virksemi, sum er í ferð við at vinda upp á seg, eftir sum partar innan ferða- og shipping vinnuna fáa fyrispurningar frá ferðamannaskipum, sum hava í hyggju at koma til Føroya og skipa fyri útferðum við skjóttgangandi bátum og kajakkum frá skipunum. Ferðamannaskipini spyrja seg fyri um reglurnar á økinum og vilja vita, um serlig loyvi eru kravd í sambandi við tílíkt virksemi í Føroyum.

Galdandi reglur um trygd á sjónum og loðs forða ikki fyri, at skip kasta akker uttan fyri oyggjarnar og gera útferðir við t.d. kajakkum á sjónum. Eftir reglunum um arbeiðsloyvi, sum er danskt málsøki, er sum útgangsstøði heldur ikki neyðugt, at ferðaleiðarar o.o. sum virka frá skipunum, hava serlig arbeiðsloyvi ella visum, so leingi talan er um tænastu (útferðir), sum verður veitt ferðafólkunum á skipinum burturav. Heldur ikki er tað eitt lógarkrav, at tey skulu brúka føroyskar veitarar (t.d. ferðaleiðarar), tá tey gera útferðir á landi.

Talan er sostatt í stóran mun um eitt øki, sum ikki er skipað í lóg í dag.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er tørvur á at skipa hesi viðurskifti betur, soleiðis at neyðug atlit verða tikin at umhvørvi, trygd og vinnu. Neyðugt er at viðgera, hvussu vit í Føroyum kunnu leggja upp fyri teimum avbjóðingum, sum ein vaksandi cruise-ferðavinna kann hava við sær. Tað er í fyrstu syftu neyðugt at tryggja, at neyðug trygdaratlit verða tikin, í øðrum lagi er neyðugt at tryggja, at hetta virksemi ikki virkar kappinga-ravlagandi fyri ferðavinnuna í Føroyum og í triðja lagi er neyðugt at hava neyðugu trygdar- og umhvørvis-tilbúgvingina tøka, skuldi óhappið verið úti.

### Føroyska lóggávan

### Loðslógin

Føroyska loðslóggávan, sum kom í gildi 1. januar 2013, krevur bara loðsing, um eitt loðsskyldugt skip skal í ella úr føroyskari havn. Loðslóggávan gevur sostatt ikki heimild til at krevja loðs umborð á útlendskum ferðamannaskipum, sum ikki skulu í føroyska havn, men sum einans sigla ímillum oyggjarnar, ella kasta akker uttan fyri øki, sum havnamyndugleikarnir varða av (vanliga havnamerkini).

Galdandi loðslóggávan fevnir sostatt ikki um t.d. útlendsk ferðamannaskip, sum sigla/kasta akker millum oyggjarnar, uttan at koma í føroyska havn, og loðslógin gevur heldur ikki avvarðandi landsstýrismanni he-imild til at áseta reglur hesum viðvíkjandi. Loðslógin heimilar tó at veita loðs, um eitt skip *sjálvboðið* biður um loðs.

### Havumhvørvislógin

Á havumhvørvisverndarøkinum eru reglur galdandi um ymisk sløg av útláti frá skipum, tað verið seg olja, burturkast, spillvatn o.a. Eisini eru reglur um, hvussu farið verður fram, um oljudálkingar eru frá einum skipi ella báti. Bæði land og kommunur hava tilbúgvingarábyrgd at basa oljudálking og aðalreglan er, at dálkarin, t.e. avvarðandi skip ella bátur, endurrindar landinum ella kommununum fyri basingarútreiðslur.

## Løgtingslógin um trygd á sjónum

Løgtingslógin um trygd á sjónum hevur onga beinleiðis áseting um loðsskyldu ella aðra regulering fyri oman fyri nevndu ferðamannasigling, men § 31 í lógini heimilar avvarðandi landsstýrismanni m.a. at *"…áseta reglur og geva almenn og ítøkilig boð ella forboð til tess at tryggja fría skipaferðslu, fyribyrgja óskili og vanda á sjónum, undir hesum um siglingarreglur, brúk av loðsi í innanoyggjasigling.."*. Nevnda § 31 kann sostatt brúkast sum heimildargrundarlag fyri einari kunngerð, sum regulerar siglingina hjá fremmandum ferðamannaskipum innanoyggja í Føroyum, herundir fráboðanarskyldu, loðskrav, siglingarleiðir, bannað siglingarøki, fjarstøðumørk, ferðavmarkingar, forboðsøki v.m.

## Grannalondini

Ein leyslig gjøgnumgongd av viðkomandi danskari og norskari lóggávu vísir t.d., at í Danmark er heimild til at krevja loðsskyldu í einstaka førinum, um trygdin á sjónum krevur tað (líkist heimildini í okkara § 31), og at uppankring í donskum sjóøki krevur loðs og er ikki fevnd av altjóða grundregluni um rættin til "uskadelig passage". Í Noregi koma ferðamannaskip + 24 metrar undir loðsskyldu í innanoyggja sigling, tó undantikið ferðamannaskip í fastari innanoyggja rutusigling. Í Noregi er eisini heimild til at krevja loðs í einstaka førinum av trygdarávum, eins og norska lóggávan ásetur, at loðsfrítøka ikki fevnir um skip, sum eru + 150 metrar til longdar.

## Arktiska arbeiðið

Sum liður í altjóða arbeiðinum at fyrireika arktiska økið til væntaða vøksturin av skipaferðsluni í Arktis í framtíðini, verður arbeitt við at menna sonevndu "Polarkoduna", sum skal skipa sigling og umhvørvisvernd í arktiska økinum. Tá Føroyar í reint geografiskum høpi ikki eru partur av arktiska økinum, samstundis sum Føroyar í politiskum og/ella norðurlendskum høpi hoyra til útjaðaran av arktiska økinum, so er lítið sannlíkt, at Polarkodan - ella møguligar aðrar komandi altjóða reguleringar fyri skipaferðsluni í Arktis - koma at regulera ella bøta um her umrøddu nationalu avbjóðingarnar, sum Føroyar hava av fremmandum ferðamannaskipum í innanoyggja sigling í Føroyum. Í regionalum høpi arbeiða danir samstundis við "Kongeriget Danmarks Strategi for Arktis", sum m.a. fevnir um at áseta siglingarleiðir fram við Føroyum og Grønlandi. Tað er eyðsæð, at henda strategi er mest viðkomandi fyri Grønland, og spurningurin um siglingarleiðir kring Føroyar fer væntandi bert at snúgva seg um at áseta altjóða góðkendar siglingarleiðir *uttan fyri føroysku grundlinjuna.* Nevnda strategi fer tí væntandi heldur ikki at loysa avbjóðingina viðv. fremmandum ferðamannaskipum í innanoyggja sigling í Føroyum.

## Fuglaveiðilógin

Ein og hvør kann í dag sigla tætt við landi kring allar oyggjar (undantikið Ramsar). Einasta avmarking í lóggávu er § 14 í fuglaveiðilógini, har ásett er, at "innanfyri tey í hesi grein nevndu mark og tíðarskeið er forboð ímóti at órógva fugl av ótørvandi óljóði frá skipspípum ella øðrum gangi." – Hetta er ein ótíðarhósakndi áseting, sum átti at verið dagførd við nýggjum reglum sum regulera sigling og annað virksemi nær landi ávísa tíð á árinum fyri at verja fuglin (frá Ramsar-Mykines).

## Ramsar

Arbeitt hevur somuleiðs verið við at áseta reglur, sum skulu avmarka sigling við skjóttgangandi bátum undir fuglabjørgum framvið Nólsoy, Skúvoy og Mykinesi og møguligt annað virksemi, tí hesar oyggjar eru útnevndar sum sonevnd RAMSAR-øki, har ein fyrisitingarætlan skal gerast til tess at verja serstaka fuglalívið á hesum oyggjum. Hesar reglur verða tó bara galdandi fyri júst hesar oyggjarnar og verða ikki ólíkar teimum

reglum, sum eru ásettar í okkara grannalondum, sum eisini hava útnevnt RAMSAR-øki.

Í RAMSAR-ætlanunum fyri tey 3 økini verður mælt til at seta í gildi kunngerð (v. heimild í havumhvørvislógini), sum avmarkar siglingina kring oynna - t.d. við at áseta hægst loyvdu ferð 5 fjórðingar um tíman nærri enn 500 m. úr landi frá 1. apríl til 1. september. Somuleiðis verður mælt til at seta í gildi eina loyvisskipan fyri vinnuliga ferðafólkasigling, sum m.a. veitir undantak frá forboðum, krøvum um loyvdar rutur, skelting umborð, eftirliti (t.d. AIS) og luttøku á viðkomandi skeiði um fugl og náttúru. Hesi krøv eiga eisini at vera galdandi fyri gummibátar o.t. frá útlendskum ferðamannaskipum.

Ferðafólkaskip eiga ikki at kunna liggja ella sigla nærhendis oyggjunum uttan loyvi frá kommununi. Kommunurnar eiga at velja hóskandi øki, har hesi skip kunnu liggja.

## Tilmæli

Markamótið millum umhvørvi, trygd, tilbúgving og vinnulív ger, at vit hava ein felags áhuga í at greiðar reglur verða ásettar fyri sigling millum oyggjarnar, at tað verður hildið vakt við, hvagar skip sigla, at hesi skip t.d. 24 tímar áðrenn komu, upplýsa tal av fólki umborð, mongd og slag av olju í tangunum o.s.fr., at loðsskyldan møguliga verður herd, at peikað verður út ein ella fleiri neyðhavnir og at eftirlit veruliga verður hildið við, at krøvini verða lokin. Krøv, sum lógin um trygd á sjónum heimiðlar og partvís kanska eisini lógin um verju av havumhvørvinum.

Tilmæli um loysn veldst um, hvørjar avmarkingar tað politiskt, trygdar- og havumhvørvisliga verður ynskt at seta fremmandum ferðamannaskipum í Føroyum. Um vit aleina hava trygdar- og umhvørvisatlit í huga, so kann hugsast, at innanoyggja siglingarbann er rætta amboðið. Er ætlanin hinvegin bara at fáa meira skipað viðurskifti á økinum, so eiga amboð so sum fráboðanarskyldur, loðsskylda og aðrar nærri ásettar avmarkingar rætta amboðið. Hetta er somuleiðis ein loysn, sum kann taka hædd fyri vinnuligum atlitum, t.d. við at seta krøv um gjøld fyri at kasta akker, loyvi + gjøld fyri at seta bátar á sjógv, loyvi + gjøld fyri at sleppa upp á land, krav um føroyskan ferðaleiðara o.a.

# Fylgiskjal 5 – Yvirlit yvir tilmæli

| ***Kapittul*** | ***Niðurstøða*** | ***Tilmæli*** | ***Ábyrgd*** | ***Kostnaður*** | ***Tíðarætlan*** |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Kap 1.8 Bakstøði og arbeiðs-setningur*** | Tað er avgerandi fyri framhaldandi menning av ferðavinnuni, at vit hava neyvari tøl og harvið vitan um tey ferðandi sum koma. | Vága Floghavn eigur at seta í verk og fíggja skipan, sum tryggjar, at øll ferðafólk verða skrásett, tá tey ferðast um flogvøllin. | SMR/Vága Floghavn | | 2017-18 |
| ***Kap 2.1.1 Bygnaður*** | UVMR hevur høvuðsábyrgd av ferðavinnuni, men onnur ráð hava ábyrgd av nógvum økjum, sum eru nær tengd vinnuni. Tá ábyrgdin er so spjødd, er samskipan og toghaldan altavgerandi. | Ein stýrisbólkur verður settur í 5 ár, undir leiðslu av UVMR, at samskipa arbeiðið at menna ferðavinnuna.<br>Bólkurin skal syrgja fyri, at tilmælini í hesum áliti verða útint, umframt regluliga eftirmeta, hvussu tey virka og rætta inn so hvørt tørvur er á at broyta.<br>Fyri at geva arbeiðinum neyðuga tyngd, skal bólkurin vera mannaður við landsstýris-fólkum frá teimum seks aðalráðunum, ið hava ábyrgd av ymsum økjum innan ferðavinnuna. | UVMR<br>Hini ráðini:<br>HIMR,<br>MMR, SFR,<br>FMR, FISK | | 2017 - 2022 |
| ***Kap 2. Bygnaður*** | Landið setir karmarnar, lóggávuna og hevur ráðgeving og stuðulsskipanirnar, sum gera tað lagaligt at skipa nýggj tilboð. Men verulig ferðavinnumenning kemur, tá kommunurnar, saman við kunningarstovum, lokala vinnulívinum og eldsálum í økinum, raðfesta ferðavinnuna. | Kommunurnar eru stigtakarar og hava ábyrgd av at menna ferðavinnuna í sínum øki. Stuðulsskipanir og stovnar, sum landið varðar av, kunnu stuðla kommununum í at menna ferðavinnuna, men tað er kommunan, sum skal vera drívmegin. | Kommunur | | 2018 - |
| ***Kap 2.2 Bygnaður*** | 1.Uppgávu- og ábyrgdarbýtið viðv. ferðavinnuni er sera spjatt og ógreitt í dag. Tað er ein avbjóðing hjá kunningarstovum at fáa raksturin at bera seg.<br>Ferðavinnan sprettir úr lokal- umhvørvinum, tí eiga kommunur og økir fremstu ábyrgd av ferðavinnumenning í sínum øki. | 1. Kommunur avgera, hvar kunningarstovur skulu vera og hvørji samstørv eru um kunningarstovur og hvussu tær skulu fíggjast. | Kommunur/ økissamstørv | - | 2017- |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | 2. Tað er torført at finna nøktandi játtan til raksturin av kunningardiskinum á flogvøllinum, m.a. orsakað av ógreiða ábyrgdarbýtinum. Landið stuðlar í dag kunningardiskinum beinleiðis við játtan á fíggjarlógini umframt at landið kann sigast at stuðla óbeinleiðis, bæði via Vága Floghavn, Atlantic Airways og SSL. Virksemið á kunningardiskinum er beinleiðis tengt at virkseminum á flogvøllinum og kann sigast at vera natúrligur partur av flogvallar-virkseminum heldur enn ein vanlig ferðafólkaskrivstova. | 2. Arbeiðsbólkurin mælir til, at Vága Floghavn rindar fyri raksturin av kunningardiskinum. | Vága Floghavn | | 2018 |
| ***Kap 2.2 Bygnaður*** | 1.Tað er altavgerandi fyri ferðavinnuna, at neyðug orka og tilfeingi verða sett av at fremja menningina í verki. | 1. Ein menningardeild verður sett á stovn á VFI.<br>Mett verður, at tað í byrjanini er tørvur á tveimum starvsfólkum.<br>Menningardeildin skal skipast við serstakari játtan og undir egnum navni og samleika. | UVMR | Íalt 7 mió kr til menning.<br><br>Umskipa økisstuðulin uml. 2 mió kr<br>Harumframt nýggj játtan á 5 mió kr árliga setast av á fíggjarlógini | 2018 |
| | 2. Galdandi skipan við stuðli til økis-ferðavinnufeløg og kunningarstovur er ikki skynsom.<br>Sum liður í at kommunurnar taka ábyrgd av ferðavinnuni og harvið kunningarstovunum er neyðugt at umskipa stuðulin til økisfeløgini. | 2. Økisstuðulin og kr./kr. stuðulin til marknaðarføring uttanlands (áleið 2 mió. kr. íalt) verður settur úr gildi og lagdur afturat játtanini til menning. | UVMR | | 2018 |
| | 3. Alneyðugt er, at játtan verður sett av á fíggjarlógini, sum nýggja menningar-deildin | 3. Uml. 5,5 mió. kr. verða settar av til menning og deildar í tvinnar puljur. 2,75 mió. kr. fara til vinnuligar/kommunalar | VFI | | 2018- |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | kann arbeiða við til tess at menna økini kring landið. | verkætlanir eftir kr./kr. regluni. Hinar 2,75 mió. kr. fara til aðra menning, m.a. til verkætlanarsett fólk, skelti, kunning o.a. | | | |
| ***Kap 2.2 Bygnaður*** | Neyðugt er at fyrireika og skipa nýggju menningardeildina hjá VFI og virksemi hennara. | Mælt verður til, at árið 2017 verður brúkt til at fyrireika nýggju skipanirnar, orða menningarætlanir, fáa fíggingina upp á pláss og at seta starvsfólk í menningardeildina hjá VFI, m.a. fólk, sum fara at hava ábyrgd av at umsita stuðulsskipanina. | VFI/UVMR | - | 2017 |
| ***Kap 2.2 Bygnaður*** | Tilmæli um at skipa nýggja menningardeild krevur lógarbroytingar í lógini fyri VFI. | Lógin fyri VFI skal broytast soleiðis, at neyðuga lógargrundarlagið undir nýggja bygnaðinum innan ferðavinnuna verður fingið til vega í 2017. | UVMR | - | 2017 |
| ***Kap. 3.1 Náttúra*** | 1. Stórur tørvur er á at raðfesta náttúruvernd. Tað er náttúran, sum er grundarlag undir øllum – trivnaði hjá almenninginum eins og hjá stóru vinnugreinunum í Føroyum.<br><br>2. Umsitingarlig orka má fylgja við nýggjari náttúruverndarlóg. | 1. Tað er alneyðugt at raðfesta arbeiðið at smíða nýggja náttúruverndarlóg, ið eisini leggur upp fyri ferðavinnuni.<br><br>2. Neyðugt er at raðfesta eina munagóða náttúrufyrisiting. | HIMR<br><br>HIMR | <br><br>Leys meting: 2-3 mió kr árliga | 2017-18<br><br>2018-2020 |
| ***Kap. 3.1 Náttúra*** | Ein náttúruumsiting hevur nógvar ymsar uppgávur, ið eru neyðugar fyri m.a. at menna ferðavinnuna og verja náttúruna móti skaðiligum árinum av ferðavinnuni. | Ein náttúruumsiting skal m.a:<br>Fara undir yvirskipaðar kanningar og kortlegging av føroysku náttúruni.<br>Fara undir skipaðar stovnsmetingar, serliga fuglateljingar.<br>Fremja árinskanningar og meta um burðarevni.<br>Skipa fyri, at neyðugar friðingar ella aðrar avmarkingar í atgongd verða gjørdar á viðkvomum økjum ella har plantur, fuglur ella búøki standa fyri hóttafalli. | HIMR | | 2018 - |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Kap. 3.2 Náttúra*** | At koyra við motorakførum í haganum fer sera illa við lendinum. Motorakfør á sjógvi og landi órógva fugl.<br>Somuleiðis er ofta talan um váðafult virksemi í føroysku náttúruni, ið krevur neyðuga vitan og førleikar um náttúru og trygd. | Tørvur er á at gera reglur fyri koyring í haganum og fyri sigling á sjónum (serliga undir fuglabjørgum) og vøtnum. Sum útgangsstøði eigur krav at verða um loyvi til at brúka motorakfør.<br>Feløg og ferðaleiðarar, sum bjóða túrar í náttúruni, skulu hava møguleika til at fáa góðkenning til sítt virksemi. | HIMR/ UVMR | | 2018 |
| ***Kap. 3.2 Náttúra*** | Ferðafólkaskip kasta viðhvørt akker, seta skjóttgangandi bátar á sjógv og sigla kring oyggjarnar. Ferðafólk verða sett í land og gera útferðir á landi, uttan at føroyskir myndugleikar ella ferðasmiðir á nakran hátt eru kunnað ella eru við.<br>Talan er um virksemi, ið vindur upp á seg og tað er neyðugt at skipa hesi viðurskifti betur, soleiðis at neyðug atlit verða tikin til umhvørvi, trygd og vinnu. | Mælt verður til, at forboð verður sett ferðamannaskipum at kasta akker millum oyggjarnar.<br>Hetta kann gerast við støði í kunngerðarheimildini í § 31 í lógini um trygd á sjónum. | UVMR | | 2018 |
| ***Kap. 3.3 Náttúra*** | Stórur tørvur er á greiðum reglum fyri, hvørji rættindi og skyldur bøndur hava, tá tað snýr seg um gongd í haga, hvørjar mannagongdir eiga at verða fylgdar, tá tað snýr seg um fyriskipan av gongutúrum í ferðavinnuhøpi umframt at tað er neyðugt at gera vegleiðingar um, hvussu ferðasmiðir, ferðafólk, bøndur og fólk annars, eiga at bera seg at, tá gingið verður í haganum.<br>Bøndur eru farnir at ynskja at fáa meira skipað viðurskifti, so hvørt ferðslan í høgum og fjøllum veksur.<br><br>**Trygd og gjøld:** Umframt atlit til náttúruna er eisini neyðugt at taka atlit til trygd og gjøld. Í dag hevur festarin, bæði sambært lóg og | Lóggáva eigur at verða sett í verk, sum nærri løgskipar hesi viðurskiftini, tá tað snýr seg um rættin at ferðast í náttúruni. Lóggávan skal verða í samsvari við reglur um almannarætt, samstundis sum lagt verður upp fyri rætti jarðareigarans at reka landbúnað.<br><br>Sum grundarlag undir slíkari lóggávu eigur kanningararbeiði fyrst at verða gjørt, sum útgreinar oman fyri nevndu viðurskifti nærri. Mælt verður til, at ein arbeiðsbólkur undir HIMR verður settur at orða tilmæli til landsstýrið um, hvussu ein nýggj lóg um frítíðarvirksemi kann verða skipað. | HIMR leiðir arbeiðsbólk | | Primo 2018 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | festibrævinum, brúksrætt á lendinum, og tí eigur ferðavinnu- fyriskiparin í útgangsstøðinum at gera avtalu við festaran um, hvørt ferðavinnan móti gjaldi kann virka í økinum. | Kanningararbeiðið skal vera grundarlag undir eini nýggjari lóggávu um frítíðarvirksemi í náttúruni. Tað skal eisini viðgerða spurningin um gjøld og orða tilmæli um, hvussu hetta kann skipast í lóg. | | | |
| ***Kap. 3.3 Náttúra*** | Umráðandi at skipa viðurskiftini viðv. bygda- og varðagøtunum og gera "ferðagøtur" kring landið.<br><br>Serliga eigur atlitið til trygd at verða raðfest. Tað er eisini neyðugt at spjaða trýstið á mest brúktu bygda- og varðagøturnar (t.d. millum Havnina og Kirkjubø og út í Mykineshólm). | Kommunur, í samstarvi við hagastýri, menningardeildina hjá VFI og aðrar viðkomandi partar, eiga at fara undir at seta verandi bygda- og varðagøtur í stand, at upptekna og uppmerkja gøturnar og gera nýggjar ferðagøtur.<br><br>Kommunur og menningardeildin hjá VFI skulu hava eitt samlað talgilt yvirlit (t.d. serstaka heimasíðu) yvir allar gøtur og túrar, ið eisini inniheldur almenna kunning um atlit til náttúruvernd og trygd í sambandi við gongd í haga.<br><br>Partarnir í ferðavinnuni hava ábyrgd av at tryggja, at ferðafólk, í so stóran mun sum til ber, fáa neyðuga kunning um tað at ferðast í føroysku náttúruni. Undir hesum er týðandi, at kunnað verður um váðar og trygdaratlit við at ferðast í føroysku náttúruni, soleiðis at byrgt verður upp fyri, at óhapp og vandastøður íkoma. | Kommunur (í samstarvi við fleiri partar)<br><br>Menningdeild hjá VFI og ferðasmiðir | | 2018-2020 |
| ***Kap. 4.1 Mentanartilboð og førleikar*** | Tað er avgerandi, at ein ferðaleiðaraútbúgving kann takast í Føroyum. | Regluliga og eftir tørvi eiga ferðaleiðaraskeið at verða boðin út, ið geva stig, soleiðis at ein eftir ávíst tal av skeiðum fær heitið og autorisatión sum ferðaleiðari. | MMR og Yrkisdepilin | | 2017-18 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Formliga skal talan vera um eina útbúgving, (sum kann vera sett saman av modulum). Útbúgvingin skal lúka altjóða krøv. | | | |
| ***Kap. 4.1 Mentanartil boð og førleikar*** | 1.Tørvur er á einari ferðavinnu-útbúgving, ið kann byggjast upp á eina lærlingaútbúgving. Harvið hevði borið til hjá vinnuni at víðari útbúgvið starvsfólk og hildið fast í teimum. Ferðavinnan er ein vinna, har tú arbeiðir teg upp eftir og leggur afturat tínari útbúgving.<br><br>2.Fyri at skapa áhuga fyri ferðavinnuni millum tey ungu, - eisini fyri íverksetan – er neyðugt at bjóða ferðavinnu-lærugreinar út á t.d. búskaparleiðini á miðnámi.<br><br>3. Tað er tørvur á grundleggjandi skeiðum, ið eru praktisk og tænastu-rættað. Hetta skulu verða styttri skeið, ið geva eitt diplom í tænastu innan ferða-vinnu, rættað móti øllum, ið meta seg fáa gagn av hesum í vinnuni. Eitt nú: buss-førarar, tænarar, hýruvognsførarar, móttøkufólk o.o. | 1.Skipa eina service økonom útbúgving í samstarvi við yrkisskúla, t.v.s. eina eitt- ella tvey-ára ferðavinnuútbúgving, ið kann byggjast omaná t.d. skrivstovuútbugving ella miðnám.<br><br>2. Lærugreinar innan ferðavinnu eiga at bjóðast út á miðnámi.<br><br>3. Skipa fyri einum tænastuskeiði, møguliga eina ferð um árið, ið endar við at fólk fáa eitt diplom í tænastu innan ferðavinnu. Eisini í samstarvi við viðkomandi yrkisskúla. | MMR og Yrkisdepilin | | 2018-2020 |
| ***Kap. 4.1 Mentanartil boð og førleikar*** | Fyri at menna ferðavinnuna, mugu vit framleiða vitan um hesa vinnu. Ferðavinnan er eitt fakøki, ið fevnir um nógvar ymsar tættir - innan mentan, mat, náttúru, jarðfrøði, burðardygd o.s.fr. | Ávís upphædd eigur at verða sett av til gransking í ferðavinnu. Granskingarráðið og Setrið eiga at raðfesta arbeiðið við at framleiða vitan um ferðavinnu í breiðum týdningi.<br>Setrið eigur at seta skeið og útbúgvingar saman, ið kunnu lyfta ferðavinnuna upp á hægri støði. | MMR/Fróð-skaparsetrið og Granskingar-ráðið | | 2018-2020 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Kap. 4.1.4 Mentanartilboð og førleikar*** | Fyritøkur, ið bjóða ymsar serligar upplivingar, t.d. klintring, síging, sigling við skjóttgangandi bátum o.s.fr. hava tørv á, at onkur myndugleiki góðkennir teirra virksemi. Bæði út frá einum sjónarmiði um trygd og heilsuvandar og fyri at fáa eitt góðskustempul, sum kann brúkast í marknaðarføringini. | VFI eigur, saman við viðkomandi pørtum, at kanna hvussu vit eiga at fara fram, tá tað snýr seg um at seta autorisasjónsskipan í verk. | Menningardeildin hjá VFI saman við øðrum viðkomandi myndugleikum. | | 2018-2020 |
| ***Kap. 4.2.3 Mentanartilboð og førleikar*** | 1.Tey flestu ferðandi hava - umframt náttúruna - eisini stóran áhuga í okkara mentanararvi, søgu og søvnum og ynskja góða kunning um søgulig støð, fornminnir, útgrevstir o.a.<br><br>Avbjóðingin við bygdasøvnunum er, at tey flestu hava sjáldan opið og bert eitt ella tvey av bygdasøvnunum kunnu sigast at vera professionell við fakfólki í starvi.<br><br>2. Framsýningin hjá Fornminnis-savninum er góð og áhugaverd, men hon liggur ov fjarskotið í mun til miðbýin í Havn og tað ger, at ov fá fólk vitja framsýningina.<br><br>3. Týðandi fyri at gera Føroyar áhugaverdar sum ferðafólkamál er at arbeiða við at fáa Føroyar á listan yvir heimsarv hjá UNESCO. Hetta er ikki bara fyrimunur frá einum ferðavinnu sjónarmiði, men m.a. tí at aðalhugsanin handan UNESCO arbeiðið er at fáa tey, ið búgva á staðnum, at taka virknan | 1. Kommunurnar eiga at taka ábyrgd av bygdasøvnunum og samstarva við aðrar bygdir og við Søvn Landsins um størri eindir, har til ber at seta søgufólk í starv, soleiðis at bygdasøvnini kunnu vera opin ávísar, fastar tíðir og framsýningarnar gerast meira áhugaverdar og kunnandi.<br><br>Tað er átrokandi at skapa umstøður (lógir og játtan) hjá Søvnum Landsins til at styrkja framsýningarpartin sum heild, herundir bygdasøvn, skelting, faldarar, kunningartilfar og tiltøk o.m.a.<br><br>2. Neyðugt er at fáa partar av framsýningini hjá Fornminnissavninum oman í miðbýin í Havn.<br><br>3. Arbeiðið, at fáa Føroyar á listan yvir heimsarv hjá UNESCO eigur at hava høga raðfesting.<br>Mong onnur átaksøkir undir Søvnum Landsins eiga at verða raðfest, ið høvdu bøtt munandi um upplivingina hjá ferðafólki. | MMR (Søvn Landsins), kommunur) | | 2018-2020 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | lut, og tað viðførir menning kring landið í síni heild. | | | | |
| ***Kap. 5.1 Inntøkumøgu-leikar frá ferðavinnuni*** | Tað er neyðugt at kenna búskaparliga týdningin av ferðavinnuni fyri samfelags-búskapin. Av tí at ferðavinnan er ein fløkt vinnugrein við nógvum smáum leikarum á marknaðinum, samstundis sum ferðavinnutilboð kunnu vera torfør at skilmarka at hoyra til ferðavinnuna aleina, er torført at gera upp, hvønn búskaparligan týdning ferðavinnan í roynd og veru hevur fyri eitt land. | Búskaparligar frágreiðingar um ferðavinnuna eiga at verða gjørdar regluliga (t.d. 5. hvørt ár) soleiðis, at vit fáa yvirlit yvir veruliga búskaparliga týdningin av ferðavinnuni. | UVMR/VFI | Leys meting uml. 0,5 mió 5. hvørt ár | 2019-2022 |
| ***Kap. 5.2 Inntøkumøgu-leikar frá ferðavinnuni*** | Galdandi skipan við ferðaavgjaldi hevur samanumtikið fleiri lýti og til ber at spyrja, um galdandi skipan er rættvís, sum hon virkar í dag. Ferðaavgjaldið er at fata sum ein generellur skattur hjá flestu ferðandi úr Føroyum og ikki ein ferðafólkaskattur sum so. | Eftirmeting av galdandi avgjaldsskipan fyri ferðafólkaflutningi til og úr Føroyum. | FMR og UVMR | | 2018 |
| ***Kap. 5.4 Inntøkumøgu-leikar frá ferðavinnuni*** | Strandfaraskip Landsins er ein lyklaleikari, tá tað snýr seg um góða og smidliga tænastu til ferðavinnuna. Tí hevur tað stóran týdning fyri inntøku-møguleikar hjá vinnuni, at Strandferðslan veitir ferðavinnuni góða tænastu. | Ein online-bíleggingarskipan skal setast í verk.<br>Ein nýggj og meira smidlig avsláttarskipan eigur at verða sett í verk til ferðaseðlakeyp.<br>Øll ferðaætlanin hjá SSL eigur at verða endurskoðað, so hon framyvir í størri mun tekur atlit at ferðavinnuni. | SFR/SSL | | 2017 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Kap. 5.5 Inntøkumøgu-leikar frá ferðavinnuni*** | Høgi innkeypsprísurin hjá matstovunum (m.a. orsakað av flutningskostnaði og høgum mvg'i) ger tað torført at fáa lønsemi í matstovuvirksemi. | Rúsdrekkasøla Landsins skal hava heimild at selja matstovuvinnuni øl og vín fyri lægri kostnað enn vanligt, samstundis sum latið verður upp fyri, at matstovur fáa møguleika at keypa rúsdrekka beinleiðis frá útlandinum.<br><br>Mvg'ið innan matstovuvinnuna skal lækkast, soleiðis at tað samsvarar við tær skipanir, grannalond okkara hava. | UVMR/FMR<br><br>FMR | | 2017<br><br>2017 |
| ***Kap. 5.6 Inntøkumøgu-leikar frá ferðavinnuni*** | Ávísar avbjóðingar eru við at útlendsk ferðandi kunnu hava størri nøgdir av mati við til Føroya, bæði við sølu og privatari nýtslu fyri eyga.<br>Neyðugt er at forða fyri óskipaðum (og ólógligum) vinnuligum útflutningi. | Lógarverkið kring inn- og útflutning av matvøru verður tillagað, soleiðis at innflutningur av matvøru verður avmarkaður til privata nýtslu og til fá kilo pr. persón. Privatpersónar skulu einans hava loyvi at útflyta avmarkaða nøgd av matvøru, t.d. 10 kg. | UVMR og FMR | | 2018-19 |
| ***Kap. 5.7 Inntøkumøgu-leikar frá ferðavinnuni*** | Tað er ein avbjóðing at skipa ferðsluna við húsbilum og tjøldum, soleiðis at hesi ferðandi virða tær reglur sum eru við avmerktum tjaldstøðum og rinda fyri tær nætur, tey búgva í Føroyum. | Kommunurnar (í samstarvi við ferðasmiðir) hava ábyrgd av at skipa tjaldingarøkini betur. | Kommunur | | 2018-19 |
| ***Kap. 5.8 Inntøkumøgu-leikar frá ferðavinnuni*** | Airbnb er vaksandi í Føroyum og talan er um ein stóran part av ferðafólka-vøkstrinum, sum ikki telur við í hagtølunum fyri gisting og umsetning innan vinnuna.<br>Neyðugt er at tryggja, at landið fær hagtøl og skattainntøkur frá hesum leigumarknaði. | Tiltøk skulu setast í verk sum tryggja, at gistingar via skipanir sum t.d. Airbnb verða skrásettar. Til dømis við at krevja, at allir útleigarar skulu skráseta seg í sambandi við útleigan, samstundis sum tað verður eitt krav at gera upp eina ferð um árið, hvussu nógv bústaðurin hevur verið leigaður út. | FMR og UVMR | | 2018 |
| ***Kap. 6.3 Mykines*** | Tað er neyðugt at avmarka og skipa ferðavinnuna út í Hólmin. | Kanningar skulu gerast, ið staðfesta, hvussu lundin verður órógvaður sum minst. | UVMR (HIMR) | | 2017 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Við støði í hesum kanningum, verða tilmæli gjørdu um, hvussu ferðslan út í Hólmin skal skipast.<br>Landsstýrið skal heita á Yvirfriðingar-nevndina um at seta friðingar í verk fyri Mykines. | | | |

UTTANRÍKIS- OG
VINNUMÁLARÁÐIÐ



Álitið er at finna á www.uvmr.fo